| | | |
|---|---|---|
| | **Býráðsfundur**<br>28. oktober 2021 | Blað nr.: 970<br><br>Formansins merki: |

# GERÐABÓK

**Dato:** 28. oktober 2021 **Kl**. 17:00
**Stað:** Býráðssalurin
**Málsnr: 245/21 – 280/21**

**FUNDARLEIÐARI:**
Heðin Mortensen

---

**VIÐ LUTTØKU AV:**
Annfinn Brekkstein
Tróndur Sigurðsson
Kári Johansen
Kristianna Winther Poulsen
Súna Mørk
Bjørg Dam
Elsa Berg
Gunvør Balle
Annika Olsen
Birgir Nielsen
Ruth Vang
Jón Kragesteen

**LUTTÓKU EISINI:**
Bogi Jacobsen
Eyðfríð Jacobsen
Eyðna Justinussen
Barbara Vang

**LUTTÓKU IKKI:**

**SKRIVARI:**
Bjørgfríð Ludvig

**PROTOKOLLFØRARI:**
Magnus Dam

**Innihaldsyvirlit** **Síða**

**Til viðgerðar**

| | | | |
|---|---|---|---|
| 245/21 | 21/00012-1 | Mál beind í nevndir 2021 | 973 |
| 246/21 | 21/04168-2 | Loyvi til víðarisølu. Matr. nr. 1øu, Hoyvík. | 975 |
| 247/21 | 20/01519-2 | Møguligt keyp av grundstykkið burtur av matr.nr. 43a, Velbastaður. | 977 |
| 248/21 | 14/05387-17 | Afturkeyp matr.nr. 135pu, Hoyvík. | 981 |
| 249/21 | 21/04320-1 | Havnar søga og myndasavn | 983 |
| 250/21 | 21/03792-3 | Tórshavnar kvøldskúli : Samstarv við Sørvágs og Vága kommunur um undirvísing - føroyskt sum annaðmál | 985 |
| 251/21 | 17/03551-2 | Róðrarfelagið Knørrur : Umsókn um høli / grundstykki so felagið kann samla virksemið á einum stað | 987 |
| 252/21 | 21/03395-2 | Rescue LÌV : Umsókn um stuðul til framhaldandi uppstigan av bjargingarbátinum Rescue LÍV | 992 |
| 253/21 | 20/00975-3 | Umsókn um makaskifti millum matr. nr. 1465a við matr. nr. 1467d, Tórshavn | 994 |
| 254/21 | 15/01400-1 | Serstøk nevnd at fyrireika nýggjan svimjihyl | 998 |
| 255/21 | 19/01708-1 | Kanningar í sambandi við møguligan parkeringstunnil í Havn | 1014 |
| 256/21 | 19/03973-1 | Dagføring av reglugerðini fyri Parkeringsloyvir í Miðbýnum | 1017 |
| 257/21 | 20/04650-3 | Áheitan um at broyta byggisamtyktina fyri matr. nr. 1175i, Tórshavn | 1020 |
| 258/21 | 20/00719-6 | Nýggj serstøk byggisamtykt fyri vindmyllur í Hoyvíkshaga | 1025 |
| 259/21 | 21/02199-6 | Umsókn um at broyta byggisamtyktina fyri matr. nr. 66, Nólsoy | 1029 |
| 260/21 | 21/03382-1 | Endurskoðan av byggisamtyktini fyri Velbastað | 1031 |
| 261/21 | 18/03758-1 | Almenn wc í Tórshavnar kommunu | 1037 |
| 262/21 | 19/01667-3 | Brúgv oman fyri Sandagerði | 1040 |
| 263/21 | 14/00813-13 | Frílendið við Hoydalsá (2012-0881) | 1042 |
| 264/21 | 19/00558-2 | Træplanting 2019, løguætlan 6275 | 1046 |
| 265/21 | 15/03637-1 | Kloakk á Signabø | 1049 |
| 266/21 | 16/04347-1 | Planlegging av kloakkskipan á Stadionøkinum | 1051 |
| 267/21 | 17/03875-1 | Umskipan av kloakk frá Óðinshædd til Boðaneshamar | 1054 |
| 268/21 | 18/01774-1 | Dagføring av kloakk í Tróndargøtu | 1056 |

| | | | |
|---|---|---|---|
| 269/21 | 18/01775-1 | Dagføring av kloakk í Bringsnagøtu | 1058 |
| 270/21 | 18/01992-1 | Orkuumvæling í Svimjihøllini – Knýta svimjihøllini í fjarhita | 1060 |
| 271/21 | 19/01619-1 | Fjarhiti til Býlingshúsið vesturi á Flat, matr. nr. 1xæ, Hoyvík | 1062 |
| 272/21 | 19/01620-1 | Fjarhiti til Dagstovnin á Landavegnum, matr. nr. 918b, Tórshavn | 1064 |
| 273/21 | 19/01621-1 | Fjarhiti til Badmintonhøllina, matr. nr. 1268a, Tórshavn | 1067 |
| 274/21 | 19/01622-1 | Sólsellur til Dagstovnin á Velbastað, matr. nr. 50af, Velbastað | 1069 |
| 275/21 | 17/00954-1 | Kommunala tilbúgvingin hjá Sløkkiliðstøðini | 1072 |
| 276/21 | 20/03394-3 | Umsókn frá Nord Pack Group um leigu av grundøki á Oyrareingjum til bygging av pakkhúsi | 1073 |
| 277/21 | 21/03575-2 | Umsókn frá P/F Sandskip um leigu av grundøki á Sundi til bygging av goymsluhøll | 1076 |
| 278/21 | 21/00927-1 | Víðkan av sølutorginum í Vágsbotni | 1078 |
| 279/21 | 21/03493-3 | Fíggjarætlan 2022, Tórshavnar kommuna | 1084 |
| 280/21 | 21/00010-1 | Góðkenning av mánaðarroknskapinum 2021 | 1091 |

**Til viðgerðar**

## 245/21 Mál beind í nevndir 2021

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Býráðsfundur | 28.01.2021 | 38/21 | 21/00012-1 |
| 2 Býráðsfundur | 25.02.2021 | 48/21 | 21/00012-1 |
| 3 Býráðsfundur | 25.03.2021 | 74/21 | 21/00012-1 |
| 4 Býráðsfundur | 27.05.2021 | 138/21 | 21/00012-1 |
| 5 Býráðsfundur | 23.06.2021 | 163/21 | 21/00012-1 |
| 6 Býráðsfundur | 30.09.2021 | 207/21 | 21/00012-1 |
| 7 Býráðsfundur | 28.10.2021 | 245/21 | 21/00012-1 |

**Upprunin til málið:**

**Lýsing av málinum – samandráttur**

**Lógir, ásetingar o.a.**

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

**Møgulig frávik/lættar frá ásetingum**

**Umhvørvisárin**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl**

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** **(set x)**

| | **Fyri Tórshavnar kommunu** | **Fyri ávís økir í kommununi** | **Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir** | **Fyri vinnuna** |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |

| | |
|---|---|
| **Býráðsfundur**<br>28. oktober 2021 | Blað nr.: 974 |
| | Formansins merki: |

| | | | | |
|---|---|---|---|---|
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** **Ja ☐** **Nei ☐**

**Tilmæli:**

**Býráðsfundur 28. januar 2021:** Einmælt samtykt.

**Býráðsfundur 25. februar 2021:** Einmælt samtykt.

**Býráðsfundur 25. mars 2021:** Einmælt samtykt.

**Býráðsfundur 27. mai 2021:** Einmælt samtykt.

**Býráðsfundur 23. juni 2021:** Einmælt samtykt.

**Býráðsfundur 30. september 2021:** Einmælt samtykt.

**Býráðsfundur 28. oktober 2021:** Enmælt samtykt.

# 246/21 Loyvi til víðarisølu. Matr. nr. 1øu, Hoyvík.

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 20.10.2021 | 241/21 | 21/04168-2 |
| 2 Býráðsfundur | 28.10.2021 | 246/21 | 21/04168-2 |

**Upprunin til málið**

Umsókn dagfest 04.10.2021.

**Lýsing av málinum**

Matr.nr. 1øu, Hoyvík.  Vídd. 3.600m2. Økið er frábýtt matr.nr. 1of.

Vøruhúsið ( P/F frá 11. mai 1993 er eigari av omanfyri nevndu ognum.

Ognin ( matr.nr. 1øu, Hoyvík ) skal seljast til Sp/f Búðir.

Vísandi til tinglýstan servitutt, á uppruna skeytinum, krevst loyvi til víðari søluna frá Tórshavnar kommunu.

Forsøgan til servituttin er hendan. Málingahandilin keypti í 1989 matr. nr. 1 of Hoyvík, og tað framgongur av skeytinum § 3d, at tað  ikki er loyvt at selja stykkið víðari fyrr byggingin er fullførd (Vøruhúsbygningurin) ella 1. byggistig góðkent innan 4 ár. Byggingin er sum kunnugt fullførd fyri nógvum árum síðani, men ásetingin er ongantíð strikað.

Sambært §3e, kann Tórshavnar kommuna krevja sær ognarrættin til økið aftur, ímóti fullum endurgjaldi av dokumenteraðum útreiðslum til eigaranum við rentu 5% p.a. frá yvirtøkudegnum at rokna, hetta tó í fyrsta lagi frá tí av at rokna, at ein útreiðsla er borin. Er nøkur bygging farin fram, so endurrindar Tórshavnar kommuna keyparanum dokumenteraðu útreiðslur hansara til hesa, um annars nýtsla kann gerast av tí bygda.

Søluskeytið varð undirskrivað 23.05.2005 og var søluprísurin 2.126.196,00.

Við 5% í rentum, verður møguligur afturkeyps prísur 4,75 mill. kr. umframt dokumenteraðar útreiðslur hjá eigara. Advokatur eigarans upplýsir, at eigari hevur havt útreiðslur til planering av stykkinum, men kennir advokaturin ikki til fulnar hvørjar útreiðslur eigarin hevur havt av hesum.

Tað kann viðmerkjast, at matr.nr. 1ør, Hoyvík, upprunaliga var eitt sjálvstøðugt matrikkul nr. Kommunan seldi við skeyti tinglýst 03.06.2005, ognina til Sp/f Frá 11. mai 1993, Á Hjalla 188 Hoyvík, og varð tá tinglýst sum servituttur at ognin matr.nr. 1ør, Hoyvík, skal leggjast saman við matr.nr. 1of, Hoyvík. Samanlegging av matriklunum var avgreidd í 2005.

Matr.nr. 1øu,  Hoyvík varð í fjør frábýtt frá matr.nr. 1of, Hoyvík, og hevur kommunan viðmælt  frábýtið.  ( Mál 20/04195 – 3 )  Talan er um sama matrikkul sum upprunaliga var matr.nr. 1ør, og sum nú er matr.nr. 1øu.

Advokatur umsøkjarans metir at tá ið bygningurin hjá Málingahandlinum á sinni varð bygdur á matr.nr. 1of, átti servitutturin av sær sjálvum at verið strikaður. Til nevnda kann viðmerkjast, at kommunan ikki strikar servituttir so hvørt  sum eigari lúkar treytirnar um t.d bygging og garðskyldu

Tá ið matr.nr. 1øu, var frábýtt matr.nr. 1of, fylgdu uppruna servituttirnir við yvir á matr.nr. 1øu.

**Lógir, ásetingar o.a.** Servituttir.

**Upplýsingar frá umsitingini**

| | Býráðsfundur<br>28. oktober 2021 | Blað nr.: 976 |
|---|---|---|
| | | Formansins merki: |

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl**

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** **(set x)**

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Møgulig frávik/lættar frá ásetingum** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** **Ja** ☐ **Nei** ☒

**Tilmæli:** Kommunustjórin og leiðarin á stjórnarskrivstovuni, mæla til at loyva víðarisølu av matr.nr. 1øu, Hoyvík. Víðarisøluskeytið skal vísa til verandi tinglýstar servituttir.

**Fíggjarnevndin 20. oktober 2021:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 28. oktober 2021:** Einmælt samtykt.

Birgir Nielsen boðaði frá, at hann er ógegnigur. Býráðið tók fráboðanina til eftirtektar og Birgir Nielsen luttók ikki í viðgerðini av málinum.

| Býráðsfundur<br>28. oktober 2021 | Blað nr.: 977<br>Formansins merki: |
|---|---|

## 247/21 Møguligt keyp av grundstykkið burtur av matr.nr. 43a, Velbastaður.

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 17.06.2020 | 160/20 | 20/01519-2 |
| 2 Tekniska nevnd | 08.09.2020 | 34/20 | 20/01519-2 |
| 3 Byggi- og býarskipanarnevndin | 09.09.2020 | 154/20 | 20/01519-2 |
| 4 Fíggjarnevndin | 16.09.2020 | 210/20 | 20/01519-2 |
| 5 Býráðsfundur | 24.09.2020 | 185/20 | 20/01519-2 |
| 6 Býráðsfundur | 26.11.2020 | 271/20 | 20/01519-2 |
| 7 Tekniska nevnd | 01.12.2020 | 67/20 | 20/01519-2 |
| 8 Byggi- og býarskipanarnevndin | 02.12.2020 | 245/20 | 20/01519-2 |
| 9 Fíggjarnevndin | 09.12.2020 | 323/20 | 20/01519-2 |
| 10 Býráðsfundur | 17.12.2020 | 295/20 | 20/01519-2 |
| 11 Tekniska nevnd | 04.10.2021 | 65/21 | 20/01519-2 |
| 12 Fíggjarnevndin | 20.10.2021 | 240/21 | 20/01519-2 |
| 13 Býráðsfundur | 28.10.2021 | 247/21 | 20/01519-2 |

**Upprunin til málið:** Eigarin av grundstykkinum bjóðar kommununi grundstykkið til keyps.

Umleið 535m2, verða frámatrikuleraðir matr.nr. 43a, Velbastaður. Stykkið liggur beint hinumegin skúlan á Velbastað.

**Lýsing av málinum – samandráttur**

Parkeringsviðurskiftini við Skúlan á Velbastað eru sera trupul.

Verandi eigari av ognini matr. nr. 43a, hevur vent sær til kommununa. Hann bjóðar kommununi eitt grundstykki á uml. 535m2, til keyps fyri uml. 500.000,00
( Uml. 935 kr.m2 )

Longdin á grundstykkinum framvið vegnum verður uml. 20,25 metrar.

Um kommunan ognar sær lendið, ber til at gera parkeringsøkið á grundstykkinum.

Stykkið hevur staðið á sølulista hjá ognarmeklara, men er fyribils tikið av sølulista aftur, meðan frábýtismálið verður avgreitt.

**Lógir, ásetingar o.a.**

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

**Møgulig frávik/lættar frá ásetingum**

**Umhvørvisárin. Ongi.**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl**

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** (set x)

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** **Ja ☒ Nei ☐**

**Tilmæli:** Kommunustjórin og leiðarin á stjórnarskrivstovuni mæla til at beina málið í teknisku nevnd og í byggi- og býarskipanarnevndina.

**Fíggjarnevndin 17. juni 2020:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í teknisku nevnd og byggi- og býarskipanarnevndina.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin, býarverkfrøðingurin og býararkitekturin mæla til, at kommunan ognar sær økið til parkeringspláss til skúlan.

**Tekniska nevnd 08. september 2020:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 09. september 2020:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Ískoyti.** Verkætlanin verður fíggjað av konto 8175, Vegir Íløgur, L00002, framfluttur karmur.

**Tilmæli:**
Kommunustjórin og leiðarin á stjórnarskrivstovuni mæla til, at keypa ognina, sum nú er frámatrikulerað og hevur fingið matr.nr. 43i, Velbastaður. Vídd 477m2, fyri í mesta lagi 500.000,00 svarandi til 1.050 kr.fermeturin.

**Fíggjarnevndin 16. september 2020:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 24. september 2020:** Jákup Dam legði fram soljóðandi broytingaruppskot: Mælt verður til at keypa uml. 535 fermetrar av matr. nr. 43a og 43i, Velbastaður, sambært upprunaliga tilmælinum til teknisku nevnd og byggi- og býarskipanarnevndina og sambært kortskjali, j.nr. 20/01519/3.

Fyrst varð atkvøtt um broytingaruppskotið frá Jákupi Dam, ið varð einmælt samtykt.

**Ískoyti:**

Grundstykkið er matrikulerað, og er breiddin til vegin einans uml. 20 metrar, vísandi til at ein geiri á 4 metrar er matrikuleraður til økið omanfyri.

Umsitingin hevur verið í samráðingum við eigaran av ognini, og eigarin er sinnaður til at selja kommununi lendi á uml. 310 fermetrar burtur av matr. nr. 43i og 43h, fyri kr. 400.000,00 Hetta verður gjørt við marknaumskipan.

Breiddin til vegin verður tá uml. 26 metrar, og ber tá til at gera 10 parkeringsbásar á økinum, sí kortskjal j. nr. 20/01519-9.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin, býarverkfrøðingurin og leiðarin á byggi- og umhvørvisdeildini mæla til at taka undir við omanfyri nevndu loysn, sí kortskjal j. nr. 20/01519-9 Kort yvir parkeringsøkið við skúlan á Velbastað.

**Býráðsfundur 26. november 2020:** Tikið av skrá.

**Ískoyti:**
Nýtt tilfar er komið inn í málinum, sum verður viðgjørt í umsitingini og møguliga verður klárt til fundin.

**Tekniska nevnd 01. desember 2020:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 02. desember 2020:** Samtykt at taka undir við tilmælinum, samstundis sum umsitingini verður heimilað at yvirtaka geilina matr. nr. 22a, sum kommunan hevur gjørt til gøtu, har fyrsti partur er trappa, tí talan er um brattlendi. Gøtan er føst farleið millum skúla og dagstovn og við eini yvirtøku kann gøtan eisini gerast atgongd til matr. nr. 43a og síðani við eini marknaumskipan kann kommunan fáa tvey eyka parkeringspláss fram við vegnum og at beina málið í býráðið umvegis figgjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 09. desember 2020:** Samtykt at taka undir við Byggi- og býarskipananevndini og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 17. desember 2020:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Til verkætlanina at keyp lendið og gera parkeringspláss í Velbastað, eru 400 tkr. játtaðar á L81041. Sambært kostnaðarmeting frá umsitingini er samlaða kostnaðurin mettur til 1.100.000 kr. Sostatt íresta kr. 700.000.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býarverkfrøðingurin mæla til, at kr. 700.000 verða játtaðar av konto 8175, LK81043, Parkeringstunnil, á konto 8175, L81041, Parkering við skúlan á Velbastað, og beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Tekniska nevnd 04. oktober 2021:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Ískoyti:**

Í samráðingartilgongdini ynskti eigarin at minka um søluna til kommununa við uml. 128 fermetrum netto, soleiðis at tað lendi hann hevur eftir til samans verður uml. 1.018 fermetrar.

Málsviðgeri á teknisku umsiting hevur viðgjørt verkætlanina um ger av parkeringsøkinum, og vísir til, at kommunan bert tørv á lendinum framvið vegnum ( gula markeraða økið j.nr. 20/01519-35 ) sum til samans er til víddar 184 m2. ( Harav uml. 128 m2 eru burtur av matr.nr. 43i og uml. 56 fermetrar av húsamatrikklinum matr.nr. 43 h.) Tískil letur tað seg gera at selja avlopsfermetrarnar netto uml. 128 fermetrar aftur til eigara av matr.nr. 43i og 43h.

**Tilmæli.**

Kommunustjórin og leiðarin av stjórnarskrivstovuni mæla býráðnum til, umvegis fíggjarnevndina, at fylgja samtyktini frá teknisku nevnd, og eisini at selja umsøkjara uml. 128 fermetrar netto, ( Sí kortskjal j. nr. 20/01519-35 ) Søluprísur kr. 50.000,-

**Fíggjarnevndin 20. oktober 2021:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 28. oktober 2021:** Atkvøtt varð um tilmælini frá teknisku nevnd 4. oktober 2021 og fíggjarnevndini 20. oktober 2021, ið vórðu einmælt samtykt.

| | Býráðsfundur<br>28. oktober 2021 | Blað nr.: 981<br><br>Formansins merki: |
|---|---|---|

# 248/21 Afturkeyp matr.nr. 135pu, Hoyvík.

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 20.10.2021 | 242/21 | 14/05387-17 |
| 2 Býráðsfundur | 28.10.2021 | 248/21 | 14/05387-17 |

**Upprunin til málið.** Grundstykkið liggur óbygt, og hevur kommunan rykt uppá byggifreist.

**Lýsing av málinum.**

Grundstykki matr.nr. 135pu. ( Útstykking Oman Gil )
Søluprísur 518.976,00
Skeytið tinglýst 03.10.2016.

Kommunan hevur rykt uppá byggifreist, og er málið á gáttini til at verða latið til sakførara at lata stevning inn til fútarættin.

Eigari er nú sinnaður til at lata stykkið innaftur, um so er at kommunan rindar fyri tinglýsing av afturkeypsskeytinum.

**Lógir, ásetingar o.a.** Servituttur í skeyti um byggifreist v.m.

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl.** Skeyti 14/05387-18. Kort 14/05387-19.

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** (set x)

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| Umsitingaravleiðingar | | | | |
| Umhvørvisavleiðingar | | | | |
| Møgulig frávik/lættar frá ásetingum | | | | |
| Sosialar avleiðingar | | | | |
| Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar | x | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar: Ja ☒ Nei ☐**

**Tilmæli:** Kommunustjórin og leiðarin á stjórnarskrivstovuni, mæla til at keypa grundstykkið aftur fyri uppruna keypsprís kr. 518.976,00 og at rinda tinglýsing av afturkeypsskeytinum kr. 6.200,00

Tá ið afturkeypsskeytið er tinglýst, verður tað í fyrsta lagi bjóða møguligum umsøkjara við bráfeingis tørvi og í øðrum lagi lýst alment til sølu.

Sí uppskot til afturkeypsskeyti j. nr. 14/05387-18.

**Fíggjarnevndin 20. oktober 2021:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 28. oktober 2021:** Einmælt samtykt.

## 249/21 Havnar søga og myndasavn

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 20.10.2021 | 246/21 | 21/04320-1 |
| 2 Býráðsfundur | 28.10.2021 | 249/21 | 21/04320-1 |
| 3 Býráðsfundur | | | 21/04320-1 |

**Upprunin til málið**
Havnar søga er skrivað og givin út í fleiri umførum. Tær fyrstu tvær bøkurnar komu út í 2004, síðan komu bøkurnar 3, 4 og 5 í 2009.

Túsundtals fotomyndir liggja goymdar teldutøkar í telduskipanunum hjá Tórshavnar kommunu. Hesar eru ikki skipaðar í eitt savn, sum kann varðveita myndirnar fyri eftirtíðina, og kommunan hevur tí biðið um uppskot frá fotografi um, hvussu hetta arbeiðið kann skipast Eitt uppskot er fingið til vega, og fotografurin bjóðar sær til at fara í gongd við arbeiðið at seta upp eina skipan, sum myndirnar kunnu goymast í. Ætlanin er at skipanin skal nýtast bæði til eldri myndir og nýggjar myndir, ið verða tiknar í kommunalum høpi.

**Lýsing av málinum**
Havna søga bind 6 er nú klár til endaliga prenttilgerð og prenting í 1200 eintøkum, harumframt verður skotið upp at prenta umleið 500 eyka eintøk av bind 1 og umleið 300 eintøk av bind 2. Onki er eftir av bind 1 og lítið av bind 2. Kostnaðurin fyri prent v.m. er mettur til umleið 500 tkr.

Í sambandi við myndasavnið verður mælt til, í eini royndartíð á tríggjar mánaðir, at seta 150 tkr. av til hetta arbeiðið. Hetta tíðarskeið skal brúkast til at fáa til vega yvirlit yvir vavið á samlaðu uppgávuni og hvussu loysnin tekniskt og á annan hátt skal síggja út. Eftir hetta verður støða tikin til, hvussu arbeiðið skal skipast framyvir.

**Lógir, ásetingar o.a.**

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl**

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** **(set x)**

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Møgulig frávik/lættar frá ásetingum** | | | | |

| | | | | |
|---|---|---|---|---|
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** **Ja ☐** **Nei ☐**

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og miðfyrisitingarstjórin mæla til at játta 500 tkr. til Havnar søgu og 150 tkr. til myndasavn av konto 20910 aðrar útreiðslur á konto 5366 stuðul annars.

**Fíggjarnevndin 20. oktober 2021:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið sum eykajáttan, ið krevur tvær viðgerðir.

**Býráðsfundur 28. oktober 2021:** Einmælt samtykt við fyrstu viðgerð og málið beint til aðru viðgerð.

# 250/21 Tórshavnar kvøldskúli : Samstarv við Sørvágs og Vága kommunur um undirvísing - føroyskt sum annaðmál

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Mentamálanevndin | 06.10.2021 | 231/21 | 21/03792-3 |
| 2 Fíggjarnevndin | 20.10.2021 | 248/21 | 21/03792-3 |
| 3 Býráðsfundur | 28.10.2021 | 250/21 | 21/03792-3 |

**Upprunin til málið**
Tórshavnar kvøldskúli og Uttanríkis- og mentamálaráðið (UMMR)

**Lýsing av málinum**
Í mong ár hevur Tórshavnar kvøldskúli bjóðað málundirvísing fyri tilflytarum v.m. í føroyskum. Hetta virksemi hevur verið í vøkstri farnu árini og hevur fingið alsamt størri týdning nú vaksandi tal av útlendingum flyta til landið. Í fjør bleiv undirvísingin skipað formliga av nýggjum sbrt. sonevndu CEFR-skipanini (evropeisk útbúgvingarskipan), ið tryggjar at næmingurin kann fáa eitt formligt prógv, ið kann brúkast í framhaldandi lestri v.m. Talan er um undirvísing nevnd 'Føroysk sum annaðmál 1, 2 og 3' og tekur tað vanliga hálvtannað ár at koma ígjøgnum og krevur tað, sum svarar til umleið ½ tíð tað tíðarskeiðið skeiðini eru.

Ikki øll øki kring landið hava eins góðar fyritreytir fyri at skipa hesa undirvísing, og er tí ynski frá UMMR og Sørvágs- og Vága kommunum, at Tórshavnar kvøldskúli kann skipa fyri skeiðum í Vágum hetta komandi skúlaárið. Tímajáttanin verður endurgoldin frá UMMR, meðan ávísur kostnaður er av næmingarumsitingin v.m. Hugsanin er at Sørvágs- og Vága kommunur rinda eitt ómaksgjald til Tórshavnar kvøldskúla fyri tænastuna. Hugsanin er at royna hesa skipan í eitt ár fyri fyrst og so meta um møguligt víðari samstarv.

Slíkt samstarv er heimilað í lógini um frítíðarundirvísing.

Gjørt er uppskot til samstarvsavtalu millum Tórshavnar kommunu og Sørvágskommunu og Vága kommunu. Sí hjálagt skjal.

**Lógir, ásetingar o.a.**

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl**

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** (set x)

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |

| | |
|---|---|
| **Býráðsfundur**<br>28. oktober 2021 | Blað nr.: 986<br><br>Formansins merki: |

| | | | | |
|---|---|---|---|---|
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Møgulig frávik/lættar frá ásetingum** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar: Ja ☐ Nei ☐**

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini til at samtykkja at innganga samstarvsavtalu við Sørvágs kommunu og Vága kommunu um undirvísing í 'føroyskum sum annaðmál' í Vágum skúlaárið 2021/22. Málið verður beint í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Mentamálanevndin 06. oktober 2021:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 20. oktober 2021:** Samtykt at taka undir við mentamálanevndini og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 28. oktober 2021:** Einmælt samtykt.

# 251/21 Róðrarfelagið Knørrur : Umsókn um høli / grundstykki so felagið kann samla virksemið á einum stað

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Mentamálanevndin | 12.09.2018 | 278/18 | 17/03551-2 |
| 2 Vinnunevndin | 01.10.2018 | 38/18 | 17/03551-2 |
| 3 Byggi- og býarskipanarnevndin | 28.11.2018 | 254/18 | 17/03551-2 |
| 4 Býráðsfundur | 29.11.2018 | 272/18 | 17/03551-2 |
| 5 Mentamálanevndin | 10.06.2020 | 180/20 | 17/03551-2 |
| 6 Vinnunevndin | 29.06.2020 | 58/20 | 17/03551-2 |
| 7 Mentamálanevndin | 09.09.2020 | 233/20 | 17/03551-2 |
| 8 Vinnunevndin | 07.09.2020 | 68/20 | 17/03551-2 |
| 9 Tekniska nevnd | 08.09.2020 | 42/20 | 17/03551-2 |
| 10 Byggi- og býarskipanarnevndin | 09.09.2020 | 180/20 | 17/03551-2 |
| 11 Fíggjarnevndin | 16.09.2020 | 216/20 | 17/03551-2 |
| 12 Býráðsfundur | 24.09.2020 | 189/20 | 17/03551-2 |
| 13 Mentamálanevndin | 19.10.2020 | 276/20 | 17/03551-2 |
| 14 Mentamálanevndin | 10.02.2021 | 15/21 | 17/03551-2 |
| 15 Havnanevndin | 05.10.2021 | 35/21 | 17/03551-2 |
| 16 Fíggjarnevndin | 20.10.2021 | 247/21 | 17/03551-2 |
| 17 Býráðsfundur | 28.10.2021 | 251/21 | 17/03551-2 |

**Upprunin til málið:**
Umsóknir frá Róðrarfelagnum Knørrur (RK).

**Lýsing av málinum – samandráttur**
RK ynskir at fáa greiði á hvørt verkætlanin um livandi bátasavn í Evenens pakkhúsi kann gerast veruleiki og í øðrum lagi at fara undir tilgongd at fáa lendi til ein framtíðar bygning til virksemi felagsins.

Fleiri ferðir seinnu árini hevur kommunan viðgjørt hølisviðurskiftini hjá Róðrarfelagnum Knørri.

Róðarfelagið Knørrur (Knørrafelagið) húsast í verandi støðu við sínum bátum í niðastu hædd í Evensens Pakkhúsi, ið er í Gongin 11 (Ogn hjá Føroya landsstýri), umframt í Neystinum við Lágu Kaj (ogn hjá Tórshavnar kommuna). Harumframt hevur felagið felagshølir við venjingarútgerð í Tollbúðini á Eystaru bryggju (ogn hjá Tórshavnar havn)

Felagið hevur í frágreiðing (sí hjálagt) skrivað uppskot til framtíðar ætlanir í Evensens Pakkhúsi.

Í samskifti við løgmansskrivstovuna skilst at tað eru (ikki endaliga staðfestar) ætlanir um at gera Evensens Pakkhús um til verkstovu- og fundarhøli v.m. hjá Miðfyrisitingini. Hetta sum liður í størru ætlanini um at savna størri partar av Miðfyrisitingini í Tinganesi / Úti á Reyni. Tó ikki er greitt um so verður og hevur henda óvissa verið í fleiri ár uttan nakra niðurstøðu.

RK hevur samstundis í skrivi dagfest 27. oktober 2017 søkt Tórshavnar kommunu um lendið í Álakeri til at byggi nýggj neyst á. Talan er um lendið hjá Tórshavnar havn.

Visjónin um livandi bátasavn í Evensens pakkhúsi er serstøk og vildi havt eitt serligt virði fyri bæði økið har hon ætlandi verður og býin sum heild, umframt tað sermerkta í at okkara felagsmentanararvur kann vera varðveittur á henda hátt. RK mælir samstundis Tórshavnar havn til at umhugsa at arbeitt verður framímóti at føroyskir bátar so vítt tilber framyvir koma at liggja í bátahylinum á Kongabrúnni.

Á fundi við RK hevur TK og Tórshavnar havn spurt inn til um hvat felagið ynskir sær mest - at arbeiða víðari við Evensens pakkhús-verkætlanini ella fara undir tilgongd at finna lendið til nýtt felagshús. Felagið sigur greitt at verkætlanin í Evensens pakkhúsi er tað mest ynskiliga, og ynskir at TK formliga metir um TK sær seg vera partur av verkætlanini og møguliga kunna heita á landsstýrið um at fáa greiðu á um RK kann fáa tilsøgn um verkætlanina.

Um tað ikki ber á mál kann Tórshavnar havn og TK fara undir víðari tilgongd at finna hóskandi staðseting í økinum millum Álaker og Sandágerðisnes, har tað áður hava verið ætlanir um eina komandi frítíðarhavn.Havnameistarin metir ikki at tað er hóskandi at fara undir ta tilgongdina fyrrenn tað er greitt um felagið fær framt ætlanina í Evensens pakkhúsi.

**Lógir, ásetingar o.a.**
Ikki viðkomandi.

**Upplýsingar frá umsitingini**
Málið er lutvíst fyrireikað saman við Tórshavnar havn, ið metir at skilagott er at avklára viðurskiftini viðv. Evensens pakkhúsi áðrenn mál um aðra staðseting verður viðgjørt víðari.

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**
Mál 17/04226 Evensens pakkhús sum livandi báta savn.

**Møgulig frávik/lættar frá ásetingum**
Ikki viðkomandi.

**Umhvørvisárin**
Avmarkað.

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl**

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** **(set x)**

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| Umsitingaravleiðingar | | | | |
| Umhvørvisavleiðingar | | | | |
| Sosialar avleiðingar | | | | |
| Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar: Ja ☐ Nei ☐**

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini til at samtykkja at Tórshavnar kommuna heitir á landstýrið um at lata Róðrarfelagnum Knørri Evensens pakkhús til virksemi felagsins og verkætlanina livandi søgusavn. Málið verður beint í býráðið umvegis Byggi- og býarskipanarnevndina og Vinnunevndina.

**Mentamálanevndin 12. september 2018:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið um byggi- og býarskipanarnevndina og vinnunevndina.

Heðin Mortensen og Turið Horn vóru ikki við í viðgerðini av málinum.

**Vinnunevndin 01. oktober 2018:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í byggi- og býarskipanarnevndina.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 28. november 2018:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Býráðsfundur 29. november 2018:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti**:
Síðani seinastu samtykt hevur Knørrafelagið roynt at fingið avklarað við Løgmanskrivstovuna um møguleikar í Evensens pakkhúsi fyri verkætlanini. Enn er ógreitt hvørt verkætlanin ber á mál og tykist tað ikki vera eyðsýndur hugur til at geva felagnum tilsøgn um verkætlanina í hølunum.

Tískil metir felagið tað verða hóskandi at taka umsóknina frá felagnum um lendið í Álakeri upp til víðari viðgerð, samstundis um tað verður avklárað um verkætlanina í Evensens pakkhúsi verður veruleiki. M.a. kundi verið talan um lendið á matr. 970a sunnanfyri bygningin hjá Havnar róðrarfelag. Lendið er felags ogn hjá Tórshavnar kommunu og Tórshavnar havn.

**Tilmæli**:
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini til at samtykkja at heita á vinnunevndina um at farast skal undir samráðingar við Knørrafelagið um møguligan leigusáttmála um lendi til nýtt felagshús í Álakeri á økið sunnanfyri neystini hjá Havnar róðrarfelag ella annað hóskandi stað.

**Mentamálanevndin 10. juni 2020:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Vinnunevndin 29. juni 2020:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Ískoyti**:
Umsitingin og Tórshavnar havn hava havt fund við umboð fyri Róðrarfelagið Knørrur (RK) um staðseting og innihald í einum framtíðar felagshúsi í nýggju frítíðarhavnini í Álakeri. Felagið hugsar sær ein bygning við eini ábygging á umleið 574 m$^2$ og lutvíst í tveimum hæddum. Felagið hevur skotið upp staðseting, sum framgongur á hjálagda skjali og ein bygning, ið hevur umleið hetta skapið/geometri.

Økið innanfyri bryggjukantin í frítíðarhavnini er ikki ráðlagt liðugt enn og tí verður uppskotið frá RK at taka við í ta tilgongdina, ið Tórshavnar havn og býarskipanardeildin koma at fyrireika í heyst. Marknaviðurskiftini í økinum er ikki komin heilt uppá pláss og eru ein fyritreyt fyri hesum máli, umframt at endalig ráðlegging av økinum innanfyri bryggjukantin eisini skal gerast.

Ein framtíðar bygging vil innibera, at felagið kemur at søkja um íløgu- og mentanarstuðul frá kommununi til bygging. Hetta verður væntandi í 2021 og meiri sannlíkt í 2022 og tí viðkomandi at taka hædd fyri tí í fíggjarætlanini, alt eftir nær felagið er klárt at fara víðari.

**Tilmæli:**
Havnameistarin, trivnaðarstjórin, tekniski stjórin, býararkitekturin og mentamálaleiðarin mæla vinnunevndini til at samtykkja at fara í realitetssamráðingar við RK um staðseting av bygningi í frítíðarhavnini í Álakeri og tilhoyrandi leigumál um lendi. Málið verður beint til ummælis í mentamálanevndini, byggi- og býarskipanarnevndini og teknisku nevnd, og síðani í fíggjarnevndina.

**Vinnunevndin 07. september 2020:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Tekniska nevnd 08. september 2020:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Mentamálanevndin 09. september 2020:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

Heðin Mortensen var ikki við í viðgerðini av málinum.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 09. september 2020:** Samtykt at taka undir við tilmælinum, tó uttan at verkætlanin hjá Róðrarfelagnum Knørrur í Eventsens pakkhús verður slept.

**Fíggjarnevndin 16. september 2020:** Samtykt at taka undir við byggi- og býarskipanarnevndni.

**Býráðsfundur 24. september 2020:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti**:
Í og við at Knørrafelagið nú uppá sikt hevur ætlanir um nýggj felagshølir og neyst í Álakeri og av tí tað tykist vera neyðugt at tillaga verkætlanina í Evensens pakkhúsi við livandi bátasavni hevur felagið gjørt uppskot til eina tillagaða ætlan í Evensens pakkhúsi. Sí hjálagt skjal við lýsing av dagførdari ætlan, sum nú í størri mun tykist kunna vera sannlík at fáa undirtøku fyri hjá landsstýrinum. Felagið hugsar sær at kommunan hevur tveir leiklutir:

I. T.e viðv. "Í miðhæddini vera bátasmíð og skiftandi framsýningar. Kvøldskúlin fíggjar og stendur fyri bátasmíðnum."

   Hesum tekur kvøldskúlin undir við.

II. og " Tórshavnar kommuna er sentralur samstarvsfelagi við bæði Tjóðsavnið og Tórshavnar kvøldskúla um raksturin av miðhæddini."

   Kvøldskúlin metir tað vera uttanfyri teirra virkisøki og sigur at Kvøldskúlin skipar fyri skeiði í bátasmíð og eigur amboð og maskinur til tað. Vit hava bara starvsfólkakapacitet til nevnda. Mett verður tí ikki skynsamt at áleggja skúlanum tað. Hinvegin kundi Knørrafelagið átikið sær hesa uppgávuna saman við veghæddini og so heldur søkt kommuna um rakstrarískoyti um tað er neyðugt.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini til at samtykkja at fara í víðari dialog við Knørrafelagið um samstarvsavtalu viðv. Kvøldskúlavirksemi í Evensens pakkhúsi og møguligum rakstrarískoyti til at reka miðhæddina.

**Mentamálanevndin 19. oktober 2020:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Ískoyti:**
Knørrafelagið hevur 13. desember 2020 latið inn hjáløgdu nágreinaðu umsókn um samstarv við Tórshavnar kommunu um livandi bátasavn í Evensens pakkhúsi. Uppskotið er evnað til í ávísum samstarvi við Tjóðsavnið og Tórshavnar kvøldskúla.

Í skjalinum er eisini nágreinað fíggjarætlan fyri klárgerð og rakstur. Ein týðandi fyritreyt í málinum er at

Løgmansskrivstovan tekur undir við ætlanunum. Sum skilst er ávís vælvild fyri hesum. Talan er um ein tørv á 147 tkr. til klárgerð og 131 tkr. í árligum rakstri.

Ferðavinna
Umframt at varðveita og miðla týðandi føroyskan mentanararv til føroyingar hevur verkætlanin eisini perspektiv í mun til ferðavinnu og at ferðafólk, ið vitja í økinum kunnu hava áhugaverda framsýning/tilboð at vitja. Mælt verður tí til at beina málið til ummælis í vinnunevndini.

**Tilmæli**:
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini til at umrøða málið og at beina tað til ummælis í vinnunevndini.

**Mentamálanevndin 10. februar 2021:** Umrøtt og samtykt at beina málið til ummælis í vinnunevndini.

**Ískoyti:**
Arbeiðið at gera bátahyl í Álakeri verður væntandi liðugt í 2022. Í sambandi við skipan av økinum, hevur tað verið samskift við felagið um eitt hóskandi grundøki til bygging av kappróðrarneysti.

Í umsókn frá Róðrarfelagnum Knørri, dagfest 29. august 2021, verður sókt um eitt 750 $m^2$ stórt grundøki niðan- og vestan fyri neystið hjá Havnar Róðrarfelag.

Grundøkið er egnað til bygging av neysti og at draga bát.

Um tað verður samtykt at leiga felagnum grundøki, verður hædd titkin fyri hesum í verkætlanini at gera bátahyl í Álakeri.

Viðlagt er uppskot um 25 ára leiguavtalu av grundøkinum.

**Tilmæli frá havnameistaranum:** Mælt verður til at taka undir við uppskoti til leiguavtalu j.nr. 17/03551-31.

**Havnanevndin 05. oktober 2021:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í fíggjarnevndina.Tróndur Sigurðsson var ikki við til hetta málið.

**Fíggjarnevndin 20. oktober 2021:** Samtykt at taka undir við havnanevndini og beina málið í býraðið.

**Býráðsfundur 28. oktober 2021:** Einmælt samtykt.

# 252/21 Rescue LÌV : Umsókn um stuðul til framhaldandi uppstigan av bjargingarbátinum Rescue LÍV

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Tilbúgvingarnevndin | 27.09.2021 | 11/21 | 21/03395-2 |
| 2 Fíggjarnevndin | 20.10.2021 | 263/21 | 21/03395-2 |
| 3 Býráðsfundur | 28.10.2021 | 252/21 | 21/03395-2 |

**Upprunin til málið**
Umsókn um fíggjarligan stuðul til framhaldandi uppstigan av Rescue LÍV er komin frá Havnar Bjargingarfelag.

**Lýsing av málinum**
Tórshavnar Kommuna hevur stuðlað við kr. 500 tús. árliga seinastu tvey árini, og sambært umsókn søkir Havnar Bjargingarfelag um framhaldandi stuðul uppá kr. 500 tús. árliga komandi tvey árini.

Hóast báturin er siglingarklárur, so arbeiðir Havnar Bjargingarfelag við næstu uppstigingunum, sum verða framdar so hvørt, fíggjarlig orka er til tað, og teir vóna, at tað fer at bera til at sigla bátin til Svøríkis komandi heyst, har størri arbeiði skulu gerast:

Yvirskipað er talan um hesi viðurskiftini, sum eru eftir at gera:

- Skifta fendaran. Mettur kostnaður á leið 250 tús. krónur.
- Brúgvin skal dagførast við m.ø. nýggjum navigatiónstólum. Mettur kostnaður á leið 1 mió. kr.
- El-innleggingar skulu dagførast. Mettur kostnaður á leið 600 tús. krónur.

Samlaði kostnaðurin av tí, sum restar í at uppstiga Rescue LÍV, er harvið á leið tvær mió. krónur, og ætlanin er sum sagt at gera arbeiðið so hvørt, sum peningur er tøkur og í tí raðfylgju, sum nevnt omanfyri.

Verða ráðini til tað, so verða 26 ára gomlu motorarnir eisini skiftir um sama mundið, báturin fer til Svøríkis.

Tá hesi arbeiðini eru gjørd, er báturin at meta við ein nýggjan bát, har alt er nútímansgjørt og framtíðartryggjað í nógv ár.

Eins og nevnt frammanundan, so meta teir, at nýggi Rescue LÍV er eitt stórt framstig fyri tilbúgvingina í Tórshavnar Kommunu.

**Lógir, ásetingar o.a.**

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl**

| | Býráðsfundur<br>28. oktober 2021 | Blað nr.: 993 |
|---|---|---|
| | | Formansins merki: |

Umsókn frá Havnar Bjargingarfelag

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** (set x)

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| Umsitingaravleiðingar | | | | |
| Umhvørvisavleiðingar | | | | |
| Møgulig frávik/léttar frá ásetingum | | | | |
| Sosialar avleiðingar | | | | |
| Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar: Ja ☐ Nei ☐**

**Tilmæli:**

Tekniski Stjórin og Sløkkiliðsstjórin mæla nevndini til at taka støðu til, um kommunan framhaldandi skal stuðla Havnar Bjargingarfelag við kr. 500 tús. árliga næstu tvey árini.

**Tilbúgvingarnevndin 27. september 2021:** Samtykt at kommunan framhaldandi skal stuðla Havnar Bjargingarfelag við kr. 500. árliga næstu tvey árini og beina málið í fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 20. oktober 2021:** Samtykt at taka undir við tilbúgvingarnevndini.

**Býráðsfundur 28. oktober 2021:** Einmælt samtykt**.**

# 253/21 Umsókn um makaskifti millum matr. nr. 1465a við matr. nr. 1467d, Tórshavn

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Byggi- og býarskipanarnevndin | 23.04.2020 | 81/20 | 20/00975-3 |
| 2 Fíggjarnevndin | 20.05.2020 | 128/20 | 20/00975-3 |
| 3 Byggi- og býarskipanarnevndin | 04.10.2021 | 181/21 | 20/00975-3 |
| 4 Fíggjarnevndin | 20.10.2021 | 252/21 | 20/00975-3 |
| 5 Býráðsfundur | 28.10.2021 | 253/21 | 20/00975-3 |

**Upprunin til málið:**
Umsókn um makaskifti.

**Lýsing av málinum – samandráttur**
Føroya Skipara- & Navigatørfelag søkir um makaskifti millum matr. 1465a við matr. 1467d.

Føroya Skipara- & Navigatørfelag hevur keypt stykkið matr. 1467d frá Sámal Jacobsen "eldra" og hetta stykkið er vestur ímóti barnagarðinum undir Brúnni sum er matr. 1467b.

Føroya Skipara- & Navigatørfelag vil makaskifta soleiðis, at Tórshavnar kommuna yvirtekur matr. 1467d og Føroya Skipara- & Navigatørfelag yvirtekur matr. 1465a frá Tórshavnar kommunu og rindar prísmunin, tí munur er á víddunum.

- Matr. 1467d er 1656 fermetrar til støddar.
- Matr. 1465a er 4485 fermetrar til støddar.

Føroya Skipara- & Navigatørfelag er av tí áskoðan, at hetta økið eigur at liggja sum grønt øki, og at umsøkjarin ongar ætlanir hevur at byggja á økinum matr. 1465a, teir vísa eisini til, at kommunan kann gott lýsa eina deklaratión á, at ikki byggjast kann á økið.

**Lógir, ásetingar o.a.**
Økið liggur í umráðispartinum A3 í 3. Grundumráði í almennu byggisamtyktini, har ásetingarnar m.a. eru:

- Økið verður lagt til blandaða bústaða- og miðstaðabygging, har loyvt er at hava handlar, smáhandverk og minni virkir, skrivstovur, stovnar, samkomuhús, heilsubótarhøli og tílíkt.

- Útstykkingar kunnu bert gerast sambært serstakari byggisamtykt.

**Upplýsingar frá umsitingini**
Matr. nr. 1465a, sum er 4.467 $m^2$ til víddar, er ogn hjá Tórshavnar kommuna. Økið liggur sum byggilendi og er vælegnað at byggja á.

Matr. nr. 1467d, sum er 1.656 $m^2$ til víddar, er ogn hjá Føroya Skipara- og Navigatørfelag. Økið liggur sum byggilendi og er vælegnað at byggja á.

Føroya Skipara- & Navigatørfelag leggur upp til, at matr. nr. 1465a, sum liggur framman fyri teirra bygning, skal leggjast út til grønt øki. Tað merkir so, at Føroya Skipara- & Navigatørfelag ikki hevur brúk fyri økinum

til at byggja á, men ynskir at økið liggur óbygt, fyri at tryggja, at tað ikki verður bygt nakað frammanfyri teirra bygning.

Tað er ikki vanligt, at kommunan hevur latið byggilendi til privat ella fyritøkur, fyri at hesi ikki skulu missa útsýni. Um hetta verður gjørt, kemur tað at sskapa fyridømi fyri onnur sum vilja tað sama.

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**
Onki mál sum hevur týdning.

**Møgulig frávik/lættar frá ásetingum**
Onki frávik

**Umhvørvisárin**
Er viðgjørt eftir umhvørvisstigi 1

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**
Ongar viðmerkingar

**Skjøl**
Umsókn frá Føroya Skipara&Navigatørfelag j.nr. 20/00975

**Skjøl**
Umsókn frá Føroya Skipara- & Navigatørfelag j.nr. 20/00975

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** (set x)

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| Umsitingaravleiðingar | | | | |
| Umhvørvisavleiðingar | | | | |
| Sosialar avleiðingar | | | | |
| Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar: Ja ☐ Nei ☐**

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og leiðarin á byggi- og umhvørvisdeildini mæla frá at ganga umsóknini á møti um at makaskifta matr. 1467d og 1465a, vísandi til at økið liggur í A3 í almennu byggisamtyktini.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 23. apríl 2020:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 20. mai 2020:** Samtykt at taka undir við byggi- og býarskipanarnevndini.

**Ískoyti:**
Føroya Skipara og Navigatørfelag (FSN) hevur ynski um at gera eitt makaskifti á Ternuryggi, og legði umboð fyri felagið hetta fram á fundi við kommununa í summar. Nýggj umsókn er send kommununi, har FSN leggur upp til, at eitt grønt trivnaðarøki verður skipað á matriklunum rundan um verandi bygning.

Matr.nr. 1467f, 1467a og 1467d eru ogn hjá Føroya Skipara og Navigatørfelag.
Matr. nr. 1465a er ogn hjá Tórshavnar kommunu.

Ynskið er at makaskifta matr. nr. 1476d og 1465a, har FSN letur 1656 $m^2$ og fær áleið 2633 $m^2$. Víddarmunurin er 977 $m^2$, og rindar FSN prísmunin fyri hesar fermetrarnar.

Mett verður, at makaskiftið kann verða til gagns fyri kommununa, tí ætlanin hjá FSN er at gera økið, sum teir hugsa at makaskifta við kommununa, til eitt alment trivnaðarøki við gøtum, uppihaldi, vøkstri o.s.fr. Í býarskipanarligum samanhangi kann eitt trivnaðarøki í hesum økinum gerast eitt gott bindilið millum býlingin á Blómubrekku, økið eystan fyri Sundsvegin og nærumhvørvið, sum í dag er serliga sermerkt við rundkoyringini og ferðsluæðrini millum Havnina og Hoyvík. Umsøkjari hevur ongar ætlanir um at byggja á økinum (matr. nr. 1465a), og er kommunan vælkomin til at lýsa hetta á ognina í einum møguligum makaskifti.

Grundað á omanfyri standandi er eyðsætt at broyta ein part av matriklinum (1465a) til D1 øki í almennu byggisamtyktini fyri Tórshavnar kommunu, sum í síni heild verða lagdir til almenning, náttúrufriðingar- og mentanarlig endamál og tilíkt.

Samstundis hevur Almannaverkið sent fyrispurning til kommununa um møgulig grundøki til nýggjan búfelagsskap í Tórshavnar kommunu. Hugsanin er so at bjóða Almannaverkinum at keypa matr. nr. 1467d og møguliga ein part av kommunala grundstykkinum til varda bústaðarbygging. Atkoman til grundstykkið verður umvegis Smærugøtu og privata partin av vegnum hjá FSN.

Talan verður um íbúðarbygging, og skal búfelagsskapurin rúma 12 íbúðum. Íbúðarbyggingin við vardum bústøðum hjá Bústaðir á Karlamagnusarbreyt í Hoyvík kann nýtast sum fordømi í mun til stødd á bygging, har fótavtrykkið á byggingini er 420 $m^2$. Tørvur er sostatt á einum grundøki, sum er 1800 $m^2$ til støddar. Harafturat er ynskið, at grundøkið liggur nær almennum flutningi og helst miðskeiðis í býnum, tí tey sum koma at búgva har ikki hava koyrikort. Byggingin er ætlað privatum byggiharra, men har Almannaverkið hevur visitatiónsrætt til tey, sum skulu búgva har.

**Lógir, ásetingar o.a.:**
Servituttur er lýstur á ognina í 1955, at hús ikki mugu verða bygd á trøðni uttan játtan jarðarráðsins. Økið er í dag fevnt av økisásetingini A3 í almennu byggisamtyktini fyri Tórshavnar kommunu, sum er byggilendið, men møguliga krevst loyvi frá Búnaðarstovuni í sambandi við bygging á matr. nr. 1467d. Fyrispurningur hesum viðvíkjandi er sendur Búnaðarstovuni.

Harafturat er servituttur lýstur á ognina 1467a tann 10. august 1990, at um vegurin Smærugøta inn til ognina matr. nr. 1467f, Tórshavn, skal dagførast og/ella viðlíkahaldast, so bera eigararnir av ognunum sum liggja út til vegin (matr.nr. 1467a, 1467d, 1467e og 1467f) í felag útreiðslurnar eftir einum nærri avtalaðum býtislykli.

**Onnur mál, sum hava týdning fyri málið:**
Almannaverkið: Fyrispurningur um grundøki til búfelagsskap, journal nr. 21/00641.
Áheitan á TK at keypa ognina matr. Nr. 1467e, fyri at betra um ferðslu- og parkeringsviðurskiftini við Býlingshúsið undir Brúnni, journal nr. 21/02232.
Fyrispurningur um at byggja íbúðir á matr. Nr. 1467e, Smærugøta, Tórshavn, journal nr. 21/01446.
HMP Consult: Umsókn vegna Vinnuhúsið um útstykkingarætlan á matr. Nr. 1467a og 1467f, Tórshavn, journal nr. 14/01302.

**Skjøl:**
Kortskjal av makaskifti og byggisamtykt – áðrenn og aftaná, j.nr. 20/00975-13
Føroya Skipara- og Navigatørfelag - Uppskot til útiøki, journal nr. 20/00975-12.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin, býararkitekturin og býarverkfrøðingurin mæla til:
- at loyva makaskiftið millum part av matr. nr. 1467d og allan matr. nr. 1465a.
- at broyta almennu byggisamtyktina fyri tann partin av matr. nr. 1465a, sum verður makaskiftur, til økisásetingina D1.

- at beina málið í býráðið umvegis teknisku nevnd og fíggjarnevndina.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 04. oktober 2021:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 20. oktober 2021:** Samtykt at taka undir við byggi- og býarskipanarnevndini og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 28. oktober 2021:** Einmælt samtykt**.**

# 254/21 Serstøk nevnd at fyrireika nýggjan svimjihyl

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Býráðsfundur | 23.04.2015 | 83/15 | 15/01400-1 |
| 2 Mentamálanevndin | 25.05.2016 | 148/16 | 15/01400-1 |
| 3 Fíggjarnevndin | 08.06.2016 | 225/16 | 15/01400-1 |
| 4 Mentamálanevndin | 15.06.2016 | 174/16 | 15/01400-1 |
| 5 Tekniska nevnd | 13.06.2016 | 70/16 | 15/01400-1 |
| 6 Byggi- og býarskipanarnevndin | 14.06.2016 | 179/16 | 15/01400-1 |
| 7 Náttúru- og umhvørvisnevndin | 16.06.2016 | 46/16 | 15/01400-1 |
| 8 Býráðsfundur | 16.06.2016 | 163/16 | 15/01400-1 |
| 9 Mentamálanevndin | 06.12.2016 | 314/16 | 15/01400-1 |
| 10 Fíggjarnevndin | 07.12.2016 | 402/16 | 15/01400-1 |
| 11 Býráðsfundur | 15.12.2016 | 329/16 | 15/01400-1 |
| 12 Býráðsfundur | 26.01.2017 | 46/17 | 15/01400-1 |
| 13 Mentamálanevndin | 16.10.2017 | 266/17 | 15/01400-1 |
| 14 Býráðsfundur | 02.03.2017 | 77/17 | 15/01400-1 |
| 15 Fíggjarnevndin | 15.11.2017 | 270/17 | 15/01400-1 |
| 16 Býráðsfundur | 22.11.2017 | 266/17 | 15/01400-1 |
| 17 Mentamálanevndin | 10.01.2018 | 8/18 | 15/01400-1 |
| 18 Mentamálanevndin | 07.03.2018 | 82/18 | 15/01400-1 |
| 19 Mentamálanevndin | 12.09.2018 | 277/18 | 15/01400-1 |
| 20 Býráðsfundur | 22.03.2018 | 52/18 | 15/01400-1 |
| 21 Fíggjarnevndin | 19.09.2018 | 260/18 | 15/01400-1 |
| 22 Býráðsfundur | 27.09.2018 | 214/18 | 15/01400-1 |
| 23 Mentamálanevndin | 28.11.2018 | 364/18 | 15/01400-1 |
| 24 Fíggjarnevndin | 05.12.2018 | 350/18 | 15/01400-1 |
| 25 Býráðsfundur | 13.12.2018 | 312/18 | 15/01400-1 |
| 26 Mentamálanevndin | 08.05.2019 | 157/19 | 15/01400-1 |
| 27 Fíggjarnevndin | 15.05.2019 | 127/19 | 15/01400-1 |
| 28 Býráðsfundur | 23.05.2019 | 106/19 | 15/01400-1 |
| 29 Mentamálanevndin | 17.06.2019 | 213/19 | 15/01400-1 |
| 30 Býráðsfundur | 20.06.2019 | 149/19 | 15/01400-1 |
| 31 Mentamálanevndin | 24.06.2019 | 223/19 | 15/01400-1 |
| 32 Mentamálanevndin | 03.07.2019 | 229/19 | 15/01400-1 |
| 33 Fíggjarnevndin | 03.07.2019 | 215/19 | 15/01400-1 |
| 34 Býráðsfundur | 04.07.2019 | 185/19 | 15/01400-1 |
| 35 Mentamálanevndin | 15.04.2020 | 107/20 | 15/01400-1 |
| 36 Fíggjarnevndin | 22.04.2020 | 100/20 | 15/01400-1 |
| 37 Býráðsfundur | 30.04.2020 | 77/20 | 15/01400-1 |
| 38 Mentamálanevndin | 10.06.2020 | 183/20 | 15/01400-1 |
| 39 Mentamálanevndin | 24.08.2020 | 215/20 | 15/01400-1 |
| 40 Fíggjarnevndin | 25.08.2020 | 199/20 | 15/01400-1 |
| 41 Býráðsfundur | 25.08.2020 | 166/20 | 15/01400-1 |
| 42 Mentamálanevndin | 06.11.2020 | 297/20 | 15/01400-1 |
| 43 Fíggjarnevndin | 06.11.2020 | 294/20 | 15/01400-1 |
| 44 Býráðsfundur | 06.11.2020 | 251/20 | 15/01400-1 |
| 45 Mentamálanevndin | 19.10.2021 | 254/21 | 15/01400-1 |
| 46 Fíggjarnevndin | 20.10.2021 | 278/21 | 15/01400-1 |
| 47 Býráðsfundur | 28.10.2021 | 254/21 | 15/01400-1 |

**Málslýsing**:
Til tess skjótt at fáa gongd á at betra umstøðurnar til almenna svimjing og kappingarsvimjing í høvuðsstaðarøkinum, verður bygginevndin til 50 m svimjihyl tikin av, og í staðin verður serstøk nevnd við tilvísing til fíggjarnevndina sett at gera allar neyðugar fyrireikingar til bygging av svimjihøll, herundir at:

- Gera neyva tørvslýsing av nýggjari svimjihøll til almenna svimjing og kappingarsvimjing, herundir lýsing av, hvussu verandi svimjihallir í høvuðsstaðarøkinum kunnu nýtast til at nøkta partar av nýtslutørvinum
- Gera uppskot til staðseting av nýggjari høll
- Gera byggiskrá til verkætlan, herundir hølistørv, teknisk krøv og orkukrøv
- Gera kostnaðarmeting og tíðarætlan fyri bygging
- Gera rakstrarætlan, t.e. roknað meting um árligar rakstrarkostnaðir
- Gera uppskot til fígging, herundir møguleikar at fáa til vega fígging frá uttanhýsis pørtum

Serstaka nevndin fyri bygging av svimjihøll verður mannað við politiskum umboðum og umboðum fyri trivnaðarfyrisitingina og teknisku fyrisiting. Fíggjarnevndin setir nevndina, sum í minsta lagi 2. hvønn mánaða leggur statusfrágreiðing fyri mentamálanevndina og fíggjarnevndina, ið skal góðkenna arbeiðið.

**Býráðsfundir 23. apríl 2015:** Samtykt við 10 atkvøðum fyri og ongari ímóti, at seta serstaka nevnd undir fíggjarnevndini at fyrireika nýggja svimjihøll við omanfyristandandi arbeiðssetningi og at velja Elin Lindenskov og Annfinn Brekkstein í nevndina.

Fyri atkvøddu: Heðin Mortensen, Elin Lindenskov, Bjørg Dam, Helena Dam á Neystabø, Sigrún Mohr, Tróndur Sigurdsson, Rúni Djurhuus, Bogi Andreasen, Annfinn Brekkstein og Sjúrður Olsen.

Greiddu ikki atkvøðu: Jógvan Arge, Jákup Dam og Marin Katrina Frýdal.

**Ískoyti:**
Bygginevndin hevur 23. mai 2016 samtykt byggiskrá fyri byggiverkætlanina. Byggiskráin er hjáløgd sum fylgiskjal 1 og svarar hon uppá settu spurningarnar og punktini.

Tó viðv. spurninginum um lýsing av, hvussu verandi svimjihallir í høvuðsstaðarøkinum kunnu nýtast til at nøkta partar av nýtslutørvinum, er at viðmerkja:

Tórshavnar kommuna hevur fylgjandi svimjihallir:
1). Svimjihøllin í Kollafjarðar skúla.
Verður brúkt bæði til skúlar og stovnar og er opin fyri almenninginum fleiri dagar um vikuna og alt skúlaárið. Høllin tænir einum lokalum endamáli burturav og er ikki upplagt at broyta nakað tí viðvíkjandi. Høllin er í góðum standi.

2). Svimjihøllin í eindini á Argjavegi hjá Skúlanum á Fløtum (gl. Argja Skúla). Verður brúkt burturav til skúlabrúks. Framtíðin er nógv tengd at, hvussu verður við eindini á Argjavegi tá Skúlin á Fløtum er liðugur í 2020. Uppskotini, ið hava verið nevnd eru til annað kommunalt endamál, so sum innan eldraøkið og hevur Nám X eisini verið nevnt, tó so at í løtuni verður arbeitt út frá, at Nám X fer inn í Handilsskúlabygningin. Alt eftir hvat framtíðar endamálið verður, skal støða takast til, um hylurin

framhaldandi skal verða í brúki, ella hølið verður brúkt til annað endamál. Er ynski at minka um rakstrarkostnaðir er viðkomandi at taka støðu til at niðurleggja henda hylin. Høllin er í góðum standi.

3). Svimjihøllin í Hesti. Verður vanliga brúkt summarmánaðirnar. Ikki nøkur ætlan fyribils um nakra broyting. Høllin er í hampiligum standi.

4). Svimjihøllin í Eysturskúlanum. Hylurin verður brúktur til skúlabrúks umframt til kvøldskúla og aðra undirvísing. Mælt verður til at halda fram við honum óbroytt. Er serliga áhugaverd til ymiskar sertørvir, umframt skúlabrúks. Er ynski at minka um rakstrarkostnaðir er viðkomandi at taka støðu til at niðurleggja henda hylin, ið annars er í góðum standi.

5). Svimjihøllin í Gundadali. Er nógv brúkt til alskyns endamál.

Undangóðkenning av ráðgevaratoymum
Umsitingin er í holt við at fyrireika undangóðkenning av ráðgevaratoymum til eina møguliga hugskotskapping, sum ætlandi fer í gongd um miðjan juni og gongur fram til oktober.

**Tilmæli**
Trivnaðarstjórin, tekniski stjóri, býararkitekturin og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini til at samtykkja
byggiskránna og at beina málið í býráðið, umvegis byggi- og býarskipanarnevndina, teknisku nevndina, náttúru- og umhvørvisnevndina og fíggjarnevndina.

**Mentamálanevndin 25. mai 2016:** Útsett.

**Ískoyti**
Sbrt. Býráðssamtykt 23. apríl 2015 er talan um eina serstaka nevnd, sum vísir til fíggjarnevndina. Av teirri orsøk verður viðgerðin av byggiskránni at byrja í fíggjarnevndini, sum so beinir málið víðari til aðrar nevndir, áðrenn endaliga viðgerð í fíggjarnevndini og hareftir býráðsviðgerð.

**Tilmæli**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla fíggjarnevndini til at samtykkja byggiskránna og at beina málið í býráðið umvegis mentamálanevndina, byggi- og býarskipanarnevndina, teknisku nevndina, náttúru- og umhvørvisnevndina.

**Fíggjarnevndin 08. juni 2016:** Samtykt at taka undir við byggiskránni og beina málið í býráðið umvegis mentamálanevndina, teknisku nevnd, byggi- og býarskipanarnevndina og heilsu- og umhvørvisnevndina.

**Tekniska nevnd 13. juni 2016:** Samtykt at taka undir við byggiskránni.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 14. juni 2016:** Samtykt at taka undir við byggiskránni.

**Mentamálanevndin 15. juni 2016:** Samtykt at taka undir við byggiskránni.

**Náttúru- og umhvørvisnevndin 16. juni 2016:** Samtykt at taka undir við byggiskránni.

**Býráðsfundur 16. juni 2016:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti**
Hugskotskappingin fyri langhyl í Gundadal var útskrivað í august 2016, eftir at Tórshavnar býráð 16. juni 2016 hevði samtykt byggiskránna fyri langhyl í Gundadali.

Trý ráðgevaratoymi vóru undangóðkend til at luttaka í hugskotskappingini.

Tey eru:

- Toymið Ósbjørn Jacobsen Ark.
- Toymið SNA Ark.
- Toymið Árni Winther Ark.

23. november 2016 lótu toymini inn síni boð uppá loysn og vóru tey latin navnloynt soleiðis, at dómsnevndin ikki visti, hvat toymið átti hvat uppskot.

2. desember 2016 hevur dómsnevndin gjørt úrskurð og tilmæli í málinum um, hvat uppskot skal vinna hugkappingina og fáa møguleika at innganga møguliga avtalu um projektering vm. Sí hjálagt dómsúrskurðin.

Hetta mál er tengt at máli 16/01715 Avtala við Ítróttasamband Føroya um ÍSF-húsið vm., ið eisini er til viðgerðar í løtuni.

Á løgukonto 5775 L5610 eru umleið 7.000 tkr. tøkar til verkætlanina. Ætlanin er í næstum at fara undir nærri greiningar og samráðingar við vinnandi hugskotið og koma aftur til nevndarviðgerð við nærri greining av heildarkostnaði, tíðarætlan, útboðsleisti og fíggjarætlan.

**Tilmæli**
Trivnaðarstjórin, tekniski stjórin, mentamálaleiðari og býararkitekurin mæla mentamálanevndini til at staðfesta úrskurðin hjá dómsnevndini um vinnandi hugskotið og at heimila umsitingini til at fara undir samráðingar við vinnandi ráðgevaratoymið í dómsúrskurðinum um møguliga projektering, umframt gerð av tíðarætlan, útboðsleisti, fíggjarætlan vm. og venda aftur til nevndina við einum uppskoti. Málið verður beint í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Mentamálanevndin 6. desember 2016:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 07. december 2016:** Samtykt at taka undir við mentamálanevndini og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 15. desember 2016:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Mælt verður til at skipa bygginevnd í sambandi við nýggja langhylin samsvarandi vanligu mannagongdini fyri verkætlanir, har býráðið velur 2 limir.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mælir býráðnum til at velja tveir limir í bygginevndina fyri nýggjum langhyli.

**Býráðsfundur 26. januar 2017:** Tikið av skrá.

**Býráðsfundur 02. mars 2017:** Vald vórðu Bergun Kass og Heðin Mortensen.

**Ískoyti:**
Tekstur kemur mánadagin.

**Ískoyti:**
Á løgukarminum fyri 2017 eru játtaðar 4.798 tkr. á konto 5775 mentan og frítíð.

Í fjør var hugskotskapping um verkætlanina, ið toymið við SNA ark. v.fl. vunnu. Sbrt. kappingartreytunum fingu tey bæði toymini sum luttóku, men ikki vunnu, 200 tkr. fyri luttøkuna.

Seinni í heyst kemur ætlandi til viðgerðar uppskot til sáttmála við vinnandi ráðgevaratoymið um projektering av verkætlanini.

**Tilmæli**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini til at játta 420 tkr. av løgukarminum konto 5775, mentan og frítíð á projektkonto L57015 Svimjihøll. Málið verður beint í býraðið umvegis fíggjarnevndina.

**Mentamálanevndin 16. oktober 2017:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 15. november 2017:** Samtykt at taka undir við mentamálanevndini og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 22. november 2017:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti**:
Tekstur kemur til fundin.

**Mentamálanevndin 10. januar 2018:** Tikið av skrá.

**Ískoyti**:
Tekstur kemur mánadagin.

**Ískoyti**
Serstaka nevndin fyri langhyl hevði fund 7. feb. 2018.

Soleiðis var ført í fundarfrásøgnina: "*3. Viðv. tíðarætlan og samráðingunum um projekteringssáttmála. Uppskot um projekteringssáttmála umleið 7 mió. kr. Tøkar eru umleið 4,5 mió. kr. í løgukarminum í 2017. Tað, sum er á karminum, er ikki flutt í 2018 enn. Hinvegin, hvat ið er tøkt, verður vantandi endaligt í mars 18. Stjórnin metir, at projektið eigur at vera forskotið, til fíggingin er tøk til samlaðu projekteringina og rúm er í íløguætlanini fyri byggikostnaðinum. Fundur hevur verið við SNA-toymið um at forskjóta projektið til ársskiftið 18/19. Málið verður lagt fyri mentamálanevndina á einum komandi fundi. Fyribils meting hjá teknisku fyrisiting er, at projektering tekur umleið 1 ár (við fyrivarni) + útbjóðing 2-3 mánaðir.*

*Heðin Mortensen metir ikki, at projektið eigur at útsetast, tí 4,5 mió. kr. eru avsettar í 2017, og eiga at verða fluttar yvir í 2018. Við at avseta restfígging í 2019, verður komið á mál við projekteringini. Síðani avseta pening til bygging av svimjihøllini á íløguætlanini fyri komandi árini.*"

Fráboðað er Havnar Svimjifelag og Svimjisamband Føroya at projektering ætlandi verður planløgd at byrja um árskiftið 2018/19. Í sambandi við gerð av fíggjarætlan fyri 2019 verður ætlandi gjørt eitt uppskot til fíggingarætlan fyri projektering og bygging av langhyli. Vent verður aftur í nevndina við málinum.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini til at taka undir við at projekteringin verður sett at byrja um ársskiftið 2018/19 og at fígging til projektering og bygging verður tikin upp í sambandi við fíggjarætlan 2019.

**Mentamálanevndin 07. mars 2018:** Ein meiriluti, Turið Horn, Marin Katrina Frýdal og Bergun Kass tekur undir við tilmælinum.

Ein minniluti, Heðin Mortensen og Bjørghild Djurhuus, krevja málið fyri býráðið.

**Býráðsfundur 22. mars 2018:** Heðin Mortensen, Odd Færø, Bjørghild Djurhuus, Bjørg Dam, Halla Samuelsen og Annfinn Brekkstein seta fram soljóðandi broytingaruppskot:

Mælt verður til, at projekteringin av langhylinum fer í gongd beinanvegin, at 4,5 mió. kr., avsettar á fíggjarætlanini 2017, verða fluttar til fíggjarárið 2018, og at restfígging, umleið 2,5 mió. kr. at fíggja projekteringina, verður avsett í sambandi við fíggjarætlanararbeiðið 2019.

Fyrst varð atkvøtt um broytingaruppskotið, ið fall við seks atkvøðum fyri og sjey ímóti.

Fyri atkvøddu: Heðin Mortensen, Odd Færø, Annfinn Brekkstein, Halla Samuelsen, Bjørghild Djurhuus og Bjørg Dam.

Ímóti: Annika Olsen, Marin Katrina Frýdal, Jákup Dam, Turið Horn, Bogi Andreasen, Bergun Kass og Jógvan Arge.

Síðani varð atkvøtt um tilmælið frá meirilutanum í mentamálanevndini, ið varð samtykt við sjey atkvøðum fyri, fimm ímóti og einari blankari atkvøðu.

Fyri atkvøddu: Annika Olsen, Marin Katrina Frýdal, Jákup Dam, Turið Horn, Bogi Andreasen, Bergun Kass og Jógvan Arge.

Ímóti atkvøddu: Annfinn Brekkstein, Halla Samuelsen, Bjørg Dam, Bjørghild Djurhuus og Heðin Mortensen.

Blankt atkvøddi: Odd Færø.

**Ískoyti**
Á løgukarminum 5775 mentan og frítíð fyri 2018 eru framfluttar 5.029 tkr. Umsitingin er í holt við at samráðast um ráðgevarasáttmála við vinnandi ráðgevaratoymið og kemur ætlandi í nevnd við málinum í oktober/november 2018 soleiðis at projekteringin kann byrja í desember 2018/januar 2019. Tørvur er at hava tøkan pening á projektkontuni í sambandi við samráðingarnar v.m., ið er í gongd í løtuni.

**Tilmæli**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini til at játta 5.029 tkr. av løgukarminum konto 5775, mentan og frítíð á projektkonto L57015 Svimjihøll. Málið verður beint í býraðið umvegis fíggjarnevndina.

**Mentamálanevndin 12. september 2018:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

Heðin Mortensen og Turið Horn vóru ikki við í viðgerðini av málinum.

**Fíggjarnevndin 19. september 2018:** Samtykt at taka undir við mentamálanevndini og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 27. september 2018:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
**UPPSKOT Í GERÐ!!!!!**

Serstaka nevndin (bygginevndin) fyri gerð av langhyli, hevur á fundi 16, 20 og 2x. november 2018 samtykt at taka undir við samráðingarúrslitinum frá samráðingunum um ráðgevarasáttmála við vinnandi SNA

samtakið, ið fevnir um SNA umframt LBF og SMJ. Bygginevndin mælir til at høllin og hylurin verða breiðkað nakað, umframt at støða verður tikin til um verkætlanin eisini skal fevna um 2 terapihyljar.

Fylgjandi viðurskifti eru at viðgera nærri í sambandi við ráðgevarasáttmálan:

## I. Stødd á langhylinum

Í sambandi við tilgongdina at gera ráðgevarasáttmála var 10. oktober 2018 fundur millum umsitingina, umboð fyri Svimjisambandið og Havnar Svimjifelag við Joaquin Pujol, formann í FINA (altjóða svimjisambandinum) Facilities Committtee um verkætlanina. Sí hjálagt fundarfrásøgn frá fundinum og niðurstøður.

Eftirfylgjandi hevur umsitingin fingið afturmelding frá Joaquin Pujol um, at frásøgnin er rættvísandi, og avtalað er, at tá nýtt skipanaruppskot er tøkt, ætlandi í fyrsta ársfjórðingi 2019, verða nýggj frágreiðing og tekningar sendar FINA til viðmerkingar, har støða er tikin til ymisku viðurskiftini, sum vórðu viðgjørd á fundinum í okt. 2018. Herundir sonevnt flow í høllini í sambandi við kappingar, um pláss til áskoðarar, miðlar, VIP etc. og um karmar til sjónvarp, lýsingar o.a.

Við støði í samskiftinum við FINA hevur bygginevndin viðgjørt, hvørt tað er hóskandi at breiðka hylin og høllina nakað. Semja er um, at tað er mest hóskandi at hava 10 geilar á 2,5 m. hvør, í staðin fyri 8 geilar á 2,5 m. umframt 0,5 m. skvatligeil í hvørjari síðu. Við hesi broyting verður hylurin betri egnaður til kappingar, umframt at hann fær enn betri nyttuvirði í mun til dagligu og fjølbroyttu nýtsluna hesi komandi 3-4 áratíggjuni. Vansin við hesi broyting er, at hylurin gerst størri, og harvið eisini vatnnøgdin, ið skal hitast og viðgerast størri, umframt at høllin gerst tilsvarandi breiðari. Nevndin er samd um at longdin framhaldandi verður 50 m., umframt 1 m. afturat til eina flytiliga brúgv, so til ber at býta hylin uppá ymiskan hátt bæði til 25 m. langar geilar og samansett 25 m./50 m. langar geilar.

Annað týðandi høvuðsmál er, at høllin má gerast nakað breiðri enn í verandi støðu. Hetta serliga við atliti til at kunna seta upp fyribils áskoðarapláss (rúma fleiri áskoðarum til serligar kappingar), pláss til officials, sjónvarping, lýsingar o.a. Í tí dagliga kann øki brúkast til venjingar, upphiting, avseting o.a. Samanlagt verður høllin breiðkað til umleið 46 m. Á hjáløgdu mynd sæst, hvussu bygningurin fyllir byggiøkið í plan. Kostnaðurin av hesi broyting er í lýstur í skjali x.

## II. Nýggjur innandura smábarnahylur/terapihylur og uttandura terapihylur

Í kappingaruppskotinum, ið vann, var á tekningunum lýst ein loysn við uttandura terapihyli, umframt einum serligum heitvatns-terapihyli innandura í millumøkinum millum bygningarnar. Hesin er serliga hugsaður til smærri børn, umframt til onnur, ið ynskja møguleikan at vera í einum serliga heitum hyli við terapi og vælveru í huga. Hugsanin er, at rúmið skal vera lutfalsliga lágt og tætt, soleiðis at tað er lættari at halda ein høgan hita. Meirkostnaðurin av uttandura terapihylinum og innandura terapihylinum eru lýstir í skjali x.

Bygginevndin metir at gerð av hesum báðum ískoytisverkætlanum er áhugaverd í sambandi við at umgera Svimjihøllina til ein vatndepil við vælveru, rørslu og kappingum.

III. Fleiri brúsur og skiftirúmsviðurskifti

Í byggiskránni er viðgjørt viðv. táverandi heitvatnsskipan til brúsurnar og tørv á fleiri brúsum.

Í 2017 bleiv heitvatnsskipanin til brúsurnar endurnýggjað. Í 2019 er ætlanin at greina møguleikarnar fyri útbyggingum við fleiri brúsum (óheft av langhylsverkætlanini). Miðrúmini í skiftingarrúmunum, har tað áður vóru sólir, kunnu umgerast soleiðis, at har ber til at gera fleiri brúsur. Í 2018 eru skápini í skiftingarrúmunum endurnýggjaði, og ber lutfalsliga lætt til at økja um talið av skápum. Eisini eru viðurskiftini hjá fólki, ið bera brek, og sum hava tørv hjálp til skifting o.a. tørv á at gerast betri í verandi høll. Hetta verður eisini tikið upp í 2019.

III. Ráðgevarasáttmálin og kostnaður

Hjálagdur er uppskot til sáttmála við tilhoyrandi fylgiskjølum. Samlaða upphæddin fyri projektering er ásett til tkr. 11.500. Í hjálagda skjali er greining mettu av kostnaðarviðurskiftunum fyri verkætlanina við teimum ymisku valmøguleikunum.

Verður avgjørt at verkætlanini eisini skal geva um báðar terapihyljarnar hækkar kostnaðurin fyri projektering til tkr. 12.400.

Umframt sáttmála við SNA-samtakið, er ætlanin at hava tilknýttar 2 byggiharraráðgevar t.e. Sp/f Ráð til almenna byggiharraráðgeving og byggileiðslu í sambandi við bygginingina, umframt DTI til ráðgeving og eftirlit í sambandi við hylja- og vatntøkniveiting. Hædd er tikin fyri hesum í kostnaðarmetingini.

Á løgukontu L57015 Svimjihøll eru umleið 4,9 mio.kr. tøkar til projektering o.a. Tørvur er á umleið 4 mio.kr. afturat í 2019 til projektering.

Sbrt. tíðarætlanini byrjar projektering í desember 2018 og gongur fram til á várið 2020. Hareftir skal støða takast til útbjóðing og er hugsandi at byggingin kann byrja í august 2020.

**Tilmæli**
Trivnaðarstjórin, tekniski stjórin, býararkitekturin, deildarleiðarin á verkætlanardeildini og mentamálaleiðarin mæla nevndini til at samtykkja:

a). at hylurin og høllin verða breiðkað

b). og mæla nevndini til at ráðgevarasáttmálin fevnir um projektering av uttandura heitvatnshyli og innandura heittvatns/terapihyli, og við teimum tillagingum at innganga ráðgevarasáttmála við SNA-samtakið um projektering av langhyli. Málið verður beint í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Mentamálanevndin 28. november 2018:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 05. desember 2018:** Samtykt at taka undir við mentamálanevndini og beina málið í býráðið.

**Ískoyti:**
Neyva sáttmálaupphæddin fyri ráðgevarasáttmálan (sbrt. samtykt í mentamálanevndini og fíggjarnevndini) er kr. 12.346.671.

**Býráðsfundur 13. desember 2018:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti**
Projektering av langhylsverkætlanini er í gongd. Til verkætlanina í ár eru 4.136 tkr. ætlaðar av løgukontu 5775 Ítróttaanlegg í 2019. Saman við framflyting á projektkontuni verða umleið 8.705 tkr. tøkar til verkætlanina í ár og verður tað mett hóskandi í mun til løgdu ætlan fyri projektering v.m.

**Tilmæli**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla nevndini til at samtykkja at flyta 4.136 tkr av løgukontu 5775 Ítróttaanlegg á projektkontu L57015 Svimjihøll. Málið verður beint í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Mentamálanevndin 08. mai 2019:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 15. mai 2019:** Samtykt at taka undir við Mentamálanevndini og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 23. mai 2019:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Á fundinum koma umboð fyri bygginevnd og ráðgeva at leggja fram nýggjasta skipanaruppskotið, kostnaðarmetingar o.a. Bygginevndin er í fer við at leggja seinasta hond á viðgerðina og er endaligt tilmæli ávegis.

Sí hjálagt skjal við skipanaruppskotinum.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórnin og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini til at umrøða framløguna.

**Mentamálanevndin 17. juni 2019:** Umrøtt.

**Býráðsfundur 20. juni 2019:** Tikið av skrá.

**Mentamálanevndin 24. juni 2019:** Tikið av skrá.

**Ískoyti:**
Bygginevndin (Serstaka nevndin fyri at fyrireika nýggjan svimjihyl) hevur á fundi 28. juni 2019 samtykt hjálagda skipanaruppskot. Tó so at bygginevndin ynskir at ráðgevin í víðari tilgongdini kemur við eini nøktandi takloysn, umframt kemur við uppskotum til møguligar sparingar og hvussu bygningurin kann fáa ein enn betri orkuprofil. Í mun til viðgerðina seinast, er uppskotið rættað til við støði í samtyktunum í málinum í nov-des. 2018. Harumframt hevur ráðgevin saman við bygginevndini gjøgnumgingið málið við eini longri røð av áhugapørtum innan svimjing t.e. skúlar, dagstovnar, feløg, sersamband, KVF etc. og rættað ymiskt til. Sbrt. galdandi mannagongdum skal skipanaruppskot í byggiverkætlanum góðkennast í avvarðandi nevnd, fíggjarnevnd og býráði.

Eisini er uppskotið viðgjørt við altjóða svimjisambandið FINA saman Svimjisambandi Føroya – sí hjálagt teirra metingar. Bygginevndin metir, at verkætlanin er slóðbrótandi og kann vera ein framtíðartryggjaður karmur um alskyns svimjivirksemi langt fram í tíðina og eisini gera tað møguligt at bjóða seg fram til eina røð av fleirlanda svimjikappingum.

Við støði í skipanaruppskotinum er gjørd kostnaðarmeting, sí hjálagt.

**Tilmæli**
Trivnaðarstjórin, leiðarin á verkætlanardeildini og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini til at samtykkja hjálagda skipanaruppskot og at beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Ískoyti:**
Byggiskráin fyri langhylin fevnir ikki um at víðka um skiftirúms- og brúsuviðurskiftini. Skipanaruupskotið leggur upp, at øll almenn atkomu- og skiftirúmsviðurskifti framhaldandi verða í verandi høll.

Sum upplýst í málinum til býráðsviðgerðina í desember 2018 viðvíkjandi ráðgevarasáttmálanum, fer nýggja høllin at hava økt virksemi og økt tal av brúkarum við sær.

Metast má týðandi eisini við atliti at víðari prosjekteringini, at fingið verður til vega uppskot til rúmari umstøður til skifting og brúsu v.m. hjá brúkarum sum heild og hjá brúkarum við rørslutarni, og sum á nøktandi hátt megnar at taka ímóti økta virkseminum. Útreiðslur til hesa bygging liggur uttanfyri kostnaðarmetingina fyri langhylin annars.

Til tess at fáa uppskot til vega skal roknast við ávísum útreiðslum til ráðgeving v.m. Mælt verður til at geva umsitingini heimild til at biðja um tilboð hesum viðvíkjandi.

**Tilmæli:**

Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla til at fáa til vega ítøkiligt uppskot til rúmari umstøður til skifting og brúsu v.m. hjá brúkarum sum heild og hjá brúkarum við rørslutarni, sum á nøktandi hátt megnar at taka ímóti økta virkseminum, og at umsitingin fær heimild til at biðja um tilboð til ráðgeving hesum viðvíkjandi.

**Mentamálanevndin 03. juli 2019:** Samtykt at taka undir við tilmælinum um at samtykkja skipanaruppskotið og tilmælinum um at fáa til vega uppskot til rúmari umstøður til skifting og brúsu, og at umsitingin fær heimild at biðja um tilboð til ráðgeving hesum viðvíkjandi. Málið at beina í býráðið um fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 03. juli 2019:** Samtykt at taka undir við Mentamálanevndini og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 04. juli 2019:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Projekteringin av langhylsverkætlanini er nú komin væl áleiðis og verður væntandi liðug í mai 2020 og kemur málið um góðkenning av høvuðsprojektinum, umframt útbjóðing til støðutakan í nevndum og býráð.

Til verkætlanina í ár eru 4.000 tkr. ætlaðar av løgukontu 5775 Ítróttaanlegg í 2019. Harumframt verður væntandi í apríl 2020 ein framflyting av tøkari játtan á projektkontuni frá 2019. Upphæddin er ikki endalig tøk enn, men fer í høvuðsheitum til at gera projekteringina lidna. Játtanin í 2020 fer ætlandi til at kunna byrja útinningina av verkætlanini í heyst t.e. í høvuðsheitum talan um burturbeining av ÍSF-húsinum, rigga byggipláss til og byrjan uppá jørð- og lendisarbeiðið.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla nevndini til at samtykkja at flyta 4.000 tkr av løgukontu 5775 Ítróttaanlegg á projektkontu L57015 Svimjihøll. Málið verður beint í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Mentamálanevndin 15. apríl 2020**: Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 22. apríl 2020:** Samtykt at taka undir við mentamálanevndini og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 30. apríl 2020:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti**:
Í sambandi við fyrireiking av langhylsverkætlanini er søkt um byggiloyvi til útinning av verkætlanini.

18. mai 2020 samtykti byggi- og býarskipanarnevndin í máli 20/01266 Umsókn um byggiloyvi til langhyl í Gundadali matr. 1268a, Tórshavn, at "at loyva umsitingini at geva byggiloyvi, treytað av at neyðug parkeringspláss verða gjørd og annars við teimum treytum, ið umsitingin setur." Sí hjálagt yvirlit yvir p-pláss í økinum.

Í málinum framgongur at tað skulu útvegast 80 p-pláss afturat. Í upprunaliga málinum er avrátt at p-viðurskifti í Gundadali skulu viðgerast í eini heild og inngongur m.a. í mál 18/03453 Skipan av Gundadali, ið ætlandi kemur til viðgerðar í juni 2020.

Hetta kravið er ein týðandi broyting í fyritreytunum í verkætlanini, bæði ráðleggingarliga, praktiskt og fíggjarliga. Hinvegin so má roknast við, at verkætlanin fær skotbrá inntil byggiverkætlanin er liðug til at fáa hesi útvegað, væntandi um ársskiftið 2022/23.

**Tilmæli**:
Trivnaðarstjórin, tekniski stjórin og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini til at taka til eftirtektar kravið um fleiri parkeringspláss sum liður í langhylsætlanini.

Málið verður beint til ummælis í teknisku nevnd.

**Mentamálanevndin 10. juni 2020:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í teknisku nevnd.

**Ískoyti**
Projekteringin
Verkætlanin er nú liðug projekterað og fyriliggur nú eitt sonevnt høvuðsprojekt (t.e. fullfíggjað projektering), ið er blivið granskað innanhýsis í teknisku fyrisiting, umframt hjá øðrum uttanhýsis serkønum ráðgevum.

Mett verður at tilfarið nú hevur eina dygd, ið er nøktandi til útbjóðingina. Í løtuni verða seinastu smálutirnir passaðir til áðrenn útboð.

Byggiloyvið
Verkætlanin hevur fingið byggiloyvið (sí hjálagt skjal) og er har nú ásett at verkætlanin skal útvega 42 p-pláss í nærumhvørvinum. Mett verður, at hetta ber til at loysa í nærøkinum og fáa liðugt projekterað og útinnt í 2021/2022 áðrenn Langhylurin verður tikin í nýtslu. Tekniska deild og býarskipanardeildin undir teknisku fyrisiting mæla til og leggja fyri býarskipanarnevnd og teknisku nevnd eitt ella fleiri øki í ella nærhendis Gundadali til minst 42 pláss og verður hetta loyst sum ein atknýtt men fyri seg verkætlan at prosjektera og standa liðug áðrenn langhylurin verður tikin í nýtslu. Fyribils mettur kostnaður til hetta er um 6 mió. Eitt sindur skal játtast til fyrireiking og prosjektering fyrst.

Útbjóðingartilfar
Talan er um eina útbjóðing í høvuðsarbeiðstøku sbrt. ABF06. Skotið verður upp at bjóða 5 feløgum til at luttaka í innbodnari lisitatión.

Stálhyljaviðurskifti
Í útbjóðingartilfarinum verður tilskilað, at tilboð skal fáast frá tveimum útvaldum veitarum av stálhyljaloysnum og at høvuðsarbeiðstakarin hevur viðskiftini við veitaran um hendi, tó eftir nærri góðkenning byggiharrans. Hesir báðir veitararnir eru útvaldir eftir eina umfatandi tilgongd.

Ráðgevaraleiklutir
Sbrt. ráðgevarasáttmálanum við Sp/F SNA er fyrivarni tikið fyri at byggileiðsla kann vera latin til annað felag at útinna. Hetta m.a. fyri at tryggja eina sterkari stýrings- og eftirlitsskipan kring verkætlanina. Skotið verður tí upp at byggileiðslan í verkætlanini verður latin til annað felag. Ætlanin er at sama felag eisini veitir ávísa byggiharraráðgeving eftir tørvi í sambandi við sáttmálasamráðingar og onnur yvirskipaði viðurskifti.

Kostnaðarmeting
Í hjálagda fylgiskjali eru nærri greiningar og metingar viðv. kostnaðinum fyri verkætlanina, bæði hondverkaraútreiðslur (HVÚ) og aðrar útreiðslur í verkætlanini. Av kappingar- og marknaðarávum verða tølini ikki lýst í tekstinum og verður tí frámælt til varðsemi við at nevna tøl alment.

ÍSF-húsið
Víst verður til mál 16/01715 Avtala við Ítróttasamband Føroya um ÍSF-húsið, ið er til viðgerðar á hesum sama fundi. Ætlandi verður farið undir niðurtøku av húsinum í oktober 2020. Húsaumsitingin kemur at standa fyri arbeiðinum og verður útreiðslan goldin av langhylsverkætlanini.

Tíðarætlan
Útbjóðing av verkætlanini 25 august til ultimo september.
Samráðingar um sáttmála ultimo september til ultimo oktober.
Niðurtøka av ÍSF-húsinum oktober 2020
Spakin settur í – ultimo oktober 2020

Bygging til árskiftið 2022/2023.

Rúmari umstøður til skifting og brúsu
Vísandi til samtykt í máli 19/03559 verður spurningurin um rúmari umstøður til skifting og brúsur í verandi svimjihøll loyst serskilt. Málið kemur aftur fyri í nevnd í heyst.

Grannalagsviðurskifti
Umsitingin hevur í 2019 verið á fundi við grannarnar og greitt frá verkætlanini og viðurskiftini kring byggiarbeiðið v.m. Grannar hava sum heild ymisk fyrivarni fyri spronging, larmi, dusti v.m. í sambandi við byggiarbeiðið, umframt ivamál viðv. hæddini á bygninginum. Umsitingin hevur svarað hesum eftir besta førimuni. Onnur og meiri kunning verður eftir ætlan fyriskipað áðrenn og meðan arbeiðið er í gongd.

Innrættan av byggiplássi og trygd í økinum
Saman við ráðgevanum er gjørd ein ætlan, ið eisini tekur hædd fyri ferðsluni og trygdini í økinum sum heild. Henda ætlan verður partur av HTU-ætlanini í verkætlanini og fylgt upp regluliga saman við verkætlanarleiðsluni og leiðsluni í Svimjihøllini.

Bygginevndin
Bygginevndin fyri verktætlanina hevur viðgjørt málið á fundi 21. august 2020.

Bygginevndin hevur nýggjan fund mánadagin 24. august 2020.

Á fundi í bygginevndini 24. august 2020 varð samtykt at biðja um heimild at kunna bjóða verkætlanina út í høvuðsarbeiðstøku.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin, tekniski stjórin og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini til:
a). at heimila umsitingini at bjóða verkætlanina út í høvuðsarbeiðstøku til 4-5 feløg
b). at heimila umsitingini at samráðast við bílígasta tilboðsgevara um sáttmála at leggja fyri nevnd og býráð, og
c). at heimila umsitingini at gera avtalu við ráðgeva um at hava byggileiðsluna um hendi.

Málið verður beint í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Mentamálanevndin 24. august 2020:** Ein meiriluti, Gunvør Balle, Marin Katrina Frýdal og Jákup Dam, samtykti at taka undir við:

a). at heimila umsitingini at bjóða verkætlanina út í høvuðsarbeiðstøku til 4 feløg
b) at heimila umsitingini at samráðast við bílígasta tilboðsgevara um sáttmála at leggja fyri nevnd og býráð, og
c). at heimila umsitingini at gera avtalu við ráðgeva um at hava byggileiðsluna um hendi.

Harumframt verður heitt á teknisku nevnd um at viðgera mál um fleiri parkeringspláss.

Ein minniluti, Heðin Mortensen og Halla Samuelsen, atkvøður blankt vísandi til, at áðrenn arbeiðið verður boðið út, eiga fleiri ósvaraðir spurningar í málinum um langhylin at verða svaraðir.

**Fíggjarnevndin 25. august 2020:** Ein meiriluti, Annika Olsen, Bergun Kass og Gunnvør Balle, tekur undir við Mentamálanevndini og beinir málið í býráðið.

Ein minniluti, Heðin Mortensen og Tróndur Sigurðsson, atkvøður blankt vísandi til, at áðrenn arbeiðið verður boðið út, eiga fleiri ósvaraðir spurningar í málinum um langhylin at verða svaraðir, herundir hvussu verkætlanin verður fíggjað.

**Býráðsfundur 25. august 2020:** Atkvøtt varð um tilmælið frá meirilutanum í fíggjarnevndini, ið varð samtykt við 9 atkvøðum fyri, 2 atkvøðum ímóti og 2 blonkum atkvøðum.

Fyri atkvøddu: Annika Olsen, Gunvør Balle, Marin Katrina Frýdal, Jákup Dam, Turid Horn, Bogi Andreasen, Bergun Kass, Heðin Mortensen og Bjørghild Djurhuus.

Ímóti atkvøddu: Tróndur Sigurðsson og Annfinn Brekkstein.

Blankt atkvøddu: Helena Dam á Neystabø og Halla Samuelsen.

**Ískoyti:**
Licitatión
1. oktober 2020 var licitatión í sambandi við útbjóðing av verkætlanini. Fýra feløg vóru boðin við í innbodnari licitatión. Inn komu trý tilboð. Sp/f Húsavarðatænastan lat ikki inn boð, hóast fyritøkan hevði sagt seg vilja bjóða.

Øll tilboðini, herundir allir postar í tilboðslistanum eru eftirkannaði og gjøgnumgingin og verður mett at øll trý tilboðini lúka treytirnar í útbjóðingartilfarinum og at tilboðið hjá J&K Petersen framhaldandi er lægst.

Sí endaliga yvirlitið her:

| Arbeiðstakarar | Tilboðsupphædd HVÚ | Eíndarprísur / optiónir | Samlað tilboð | Nr. |
|---|---|---|---|---|
| Articon P/F | 145.121.780,00 | 3.558.791,00 | 148.680.571,00 | 2 |
| Búsetur Sp/f | 156.249.015,00 | 3.652.428,00 | 159.901.443,00 | 3 |
| J & K Petersen Contractors P/F | 144.753.761,73 | 2.541.420,25 | 147.295.181,98 | 1 |

Viðv. avtalu við Tórshavnar havn um grót
Eftir at licitatiónin hevur verið, er tað, sbrt. ætlan, eydnast at fáa í lag semju við Tórshavnar havn at lata umleið 20.000 m3 grót til bátahylsverkætlanina í Álakeri. Hetta inniber eina ávísa sparing, tí annars skuldi grótið koyrast á goymslu í Húsahaga. Langhylsverkætanin skal tí ikki rinda nakað fyri koyring v.m. av hesi nøgdini. Hetta er longu innroknað í kostnaðarmetingina, men er treytað av at verkætlanin fer í gongd í næstum.

Sáttmálasamráðingar
Við støði í gjøgnumgongdini sum umrødd omanfyri, var í oktober 2020 farið undir samráðingar við P/F J&K Petersen um sáttmála. Tað hava verið fýra tingingarfundir, har partarnir hava gjøgnumgingið tilboðið hjá J&K Petersen, herundir tey ymisku fakini fyri at eyðmerkja møguligar avbjóðingar, óvissur og evt. manglar í verkætlanartilfarinum, og eisini um møguleikar fyri at taka onkrar postar út úr veitingini ella vita, um tað ber til at gera møguligar tillagingar, ið kunnu antin betra verkætlanina og/ella minka um kostnaðin.

Tað vísir seg at vera nakrir upplagdir møguleikar fyri at minka um kostnaðin, og sum ikki broyta nakað av týdningi viðv. dygd og funktión. Samstundis er greitt, at í nøkrum førum eru eyðmerkt nøkur viðurskifti og veitingar, ið mangla í nøgdarlistanum og útboðstilfarinum. Hetta inniber ein ávísan meirkostna.

Eisini hava samráðingar verið fyri at kanna, um tað ber til at minka um óvissur við at læsa ymisk viðurskifti í sáttmálanum. Eitt nú óveðursdagar, prís- og lønarvøksur, ávísar nøgdir í nøgdarlistanum v.m., men hevur tað ikki eydnast at fáa eina nøktandi semju um hesar postar, m.a. vegna ov stutt skotbráð hjá bæði arbeiðstakara, ráðgevum og kommununi at fáa lýst hesar óvissur og at kostnaðarmeta tær.

Byggitíðin og trygd í økinum

Undir samráðingunum er eisini komið fram, at neyðugt verður at leingja byggitíðina, tó enn óvist hvussu nógvar mánaðir, hetta m.a. fyri at kunna tilrættisleggja lendis- og speingiarbeiðið meiri skynsamt í mun til umhvørvið kring byggiplássið og herundir fyri at hava trygdina í økinum í hásæti. Longd byggitíð vil bera eyka kostna við sær til byggiplássrakstur, sum full greiða ikki er á. Kostnaðarskjalið tekur hædd fyri møguligari longdari byggitíð.

Óvissur og váðar
Gjøgnumgongdin higartil hevur eisini eyðmerkt nakrar óvissur, ið eru loystar, men hevði tað tað eisini hevði verið ynskiligt at fingið greinað og avklárað nakrar aðrar óvissur nærri og soleiðis minkað um váðan. Talan kann vera um 2-3 mio.kr.

Til tess at nágreina hesi viðurskifti krevst ein tilgongd á nakrar vikur. Í tann mun tað ikki verður gjørt, vil tann óvissan fara av postinum til ókent.

Sáttmálaupphædd/hondverkaraútreiðslur (HVÚ)
Við tillaginunum sum nevndar omanfyri verður komið fram til eina sáttmálaupphædd (HVÚ) á 147.500 tkr. uttan kommunalt MVG.

Heildarkostnaður og fígging
Greitt verður á fundinum frá heildarkostnaðurin fyri verkætlanina. Til tess at fíggja verkætlanina verður neyðugt at seta av umleið 65 mio.kr í fíggjarætlanini fyri 2021. Restupphæddin verður at fíggjað í 2022 og 2023.

Gjalds- og tíðarætlan
Í sambandi við samráðingarnar hevur kommunan biðið J&K Petersen um at koma við eini gjalds- og tíðarætlan fyri verkætlanina. Henda er ikki komin enn, men verður ein fyritreyt fyri at innganga ein sáttmála. Mett verður at útreiðslurnar í 2020 í mesta lagi vera umleið 2.500 tkr og eru hesar tøkar á projektkontu L57015 Svimjihøll.

Manningarlisti – lyklapersónar
Sum liður at tryggja eina skikkaða manning í leiðsluni av verkætlanini, hevur J&K Petersen latið TK ein lista yvir lyklapersónar í felagum, ið koma at arbeiða við verkætlanini. Umsitingin er nøgd við listan.

Tryggingarviðurskifti
Til verkætlanina hevur Tórshavnar kommuna teknað eina projektábyrgdartrygging fyri projekteringina v.m. og kemur í sambandi við høvuðsarbeiðstøkuna at tekna eina arbeiðstøkutrygging, herundir spreingitrygging í sambandi við at arbeiðið byrjar.

**Atknýttar verkætlanir**
*- Brúsu- og skiftirúmsviðurskifti í verandi høll*
4. juli 2019 samtykti býráðið at fáa útvega ítøkiligt uppskot til rúmari umstøður til skifting og brúsu v.m. hjá brúkarum sum heild og hjá brúkarum við rørslutarni, sum á nøktandi hátt megnar at taka ímóti økta virkseminum. Málið er viðgjørt nakrar ferðir í mentamálanevndini og kemur endaligt tilmæli væntandi fyri á fundi í mentamálanevndini 16. november 2020 (sí mál 19/03559 Svimjihøllin í Gundadali: Rúmari umstøður til skifting og brúsu). Sí hjálagt tekning av loysn E og tilhoyrandi kostnaðarmeting. Talan er um eina verkætlan, ið kann fremjast í stigum t.d. yvir 2-3 ár.

*- Parkeringsviðurskifti*
Í summar var spurningurin um útvegan av 42 parkeringsplássum viðgjørdur og samtykt at serstakt mál skuldi fyrireikast til at loysa tað. Tilgongdin er byrjað og kemur tilmæli væntandi í fyrsta ársfjórðingi í 2021. Byggiloyvið treytar, at hesi eru tøk áðrenn ein komandi høll verður tikin í nýtslu – væntandi í 2023.

Hesar atknýttu verkætlanir eru ikki fíggjaðar í langhylsverkætlanini.

Viðgerð í bygginevndini

Bygginevndin hevur viðgjørt málið á nøkrum fundum og seinast á fundi 6. november 2020, og hóast stutt skotbrá, metir meirilutin (Bergun Kass, Birita Wardum, Brynhild Setberg og Sigurð Vang) av bygginevndini, at tað ber til at innganga sáttmála við P/F J&K Petersen, treytað av hóskandi upphædd til ókent og møgulig tilkeyp. Mett verður, at óvissurnar í verandi støðu, kunnu rúmast í avsettu upphæddini.

Ein minniluti í bygginevndini, Heðin Mortensen, tekur støðu á seinni fundi, vegna ov stutt skotbrá og vantandi heildarupplýsingar.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin, tekniski stjórin og mentamálaleiðarin vísa til lýsingina omanfyri og mæla til:

a). at taka støðu til høvuðsarbeiðstøkusáttmála á 147.500 tkr. (uttan mvg) við P/F J&K Petersen. Útreiðslurnar í 2020 vera at rinda av tøkari upphædd á løgukontu L57015 Svimjihøll.

b). at taka støðu til at játta 65.000 tkr. í fíggjarætlanini fyri 2021 og restina av fíggingini í 2022 og 2023, og beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Mentamálanevndin 06. november 2020:** Ein meiriluti, Gunvør Balle, Marin Katrina Frýdal og Bergun Kass, samtykti at taka undir við punkt a) hvat viðvíkur sáttmálaupphæddini og fíggingini í 2020 og b), og harumframt at heimila umsitingini at gera høvuðsarbeiðstøkusáttmála við P/F J&K Petersen.

Ein minniluti, Heðin Mortensen og Halla Samuelsen, tekur støðu á seinni fundi, vegna ov stutt skotbrá og vantandi heildarupplýsingar.

**Fíggjarnevndin 06. november 2020:** Ein meiriluti, Annika Olsen, Bergun Kass og Gunvør Balle, tekur undir við meirilutanum í Mentamálanevndini og beinir málið í býráðið.

Ein minniluti, Heðin Mortensen og Tróndur Sigurðsson, tekur undir við minnilutanum í Mentamálanevndini.

**Býráðsfundur 06. november 2020:** Atkvøtt varð um tilmælið frá meirilutanum í Fíggjarnevndini, ið varð einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Formaðurin setur málið á skrá.

Sum upplýst í málslýsingini til nevndar- og býráðsviðgerðina í november 2020, eru atknýttar verkætlanir, ið ikki eru fíggjaðar. Talan er um nýggj brúsu- og umklæðingarrúm, harundir eisini til tey, ið bera brek, og at útvega tey í byggiloyvinum kravdu parkeringsplássini.

Mett verður neyðugt at fáa hesar verkætlanir neyvari útgreinaðar og kostnaðarmettar, soleiðis at hesi viðurskifti kunnu verða fíggjað og klár at taka í nýtslu í seinasta lagi samstundis sum langhylurin er liðugt bygdur.

Viðvíkjandi tørvinum á nýggjum brúsu- og umklæðingarrúmum er ynskið ein loysn, sum ikki grípur inn í gomlu høllina, men soleiðis, at báðar hallirnar kunnu virka leysar av hvørjari aðrari.

Ynskið er harumframt at kanna møguleikarnar fyri einfaldari takkonstruktión.

Hesi viðurskifti – brúsu- og umklæðingarrúm, parkeringspláss, og einfaldari takkonstruktión, skulu kostnaðarmetast hvør sær og fyri samlaðu langhylsverkætlanina.

Ynskið er eisini um at fáa uppskot til, hvussu man kann betra um umstøðurnar og tilboðini til barnafamiljurnar.

Heitt kann verða á ráðgevan um at gera hesi uppskot og kostnaðarmetingar. Skotið verður upp at játta kr. 800.000 til endamálið fíggjað av verandi langhylsjáttan 5775 Ítróttaranlegg L57015 Langhylur.

**Mentamálanevndin 19. oktober 2021:** Ein meiriluti, Annfinn Brekkstein, Súna Mørk, Kristianna Winther Poulsen og Birgir Nielsen, tekur undir við at heita á ráðgevan um at gera hesi uppskot og kostnaðarmetingar, og at játta kr. 800.000 til endamálið fíggjað av verandi langhylsjáttan 5775 Ítróttaranlegg L57015 Langhylur. Málið verður beint í býráðið um fíggjarnevndina.

Ein minniluti, Ruth Vang, atkvøður blankt.

**Fíggjarnevndin 20. oktober 2021:** Ein minniluti, Heðin Mortensen, Annfinn Brekkstein, tekur undir við mentamálanevndini og beinir málið í býráðið.

Ein minniluti, Annika Olsen og Elsa Berg, atkvøður blankt.

Tróndur Sigurðsson luttók ikki í viðgerðini av málinum.

**Býráðsfundur 28. oktober 2021:** Atkvøtt varð um tilmælið frá meirilutanum í fíggjarnevndini, Annfinni Brekkstein og Heðini Mortensen, ið varð samtykt við 9 atkvøðum fyri, 3 ímóti og einari blankari.

Fyri atkvøddu: Heðin Mortensen, Annfinn Brekkstein, Tróndur Sigurðsson, Kristianna Winther Poulsen, Kári Johansen, Súna Mørk, Bjørg Dam, Birgir Nielsen og Ruth Vang.

Blankt atkvøddi: Annika Olsen

Ímóti atkvøddu: Elsa Berg, Jón Kragesteen og Gunnvør Balle.

| | |
|---|---|
| **Býráðsfundur**<br>28. oktober 2021 | Blað nr.: 1014 |
| | Formansins merki: |

# 255/21 Kanningar í sambandi við møguligan parkeringstunnil í Havn

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Tekniska nevnd | 07.05.2019 | 27/19 | 19/01708-1 |
| 2 Byggi- og býarskipanarnevndin | 08.05.2019 | 89/19 | 19/01708-1 |
| 3 Fíggjarnevndin | 15.05.2019 | 133/19 | 19/01708-1 |
| 4 Býráðsfundur | 23.05.2019 | 119/19 | 19/01708-1 |
| 5 Tekniska nevnd | 08.10.2019 | 59/19 | 19/01708-1 |
| 6 Tekniska nevnd | 04.10.2021 | 59/21 | 19/01708-1 |
| 7 Fíggjarnevndin | 20.10.2021 | 262/21 | 19/01708-1 |
| 8 Býráðsfundur | 28.10.2021 | 255/21 | 19/01708-1 |

**Upprunin til málið:**
Borgarstjórin hevur heitt á teknisku fyrisiting, um at gera tekniskar og fíggjarligar kanningar av møguligum parkeringstunli undir miðbýnum í Havn, sum í skitsuuppskoti verður mettur at verða umleið 1 km langur og hava pláss fyri umleið 700 parkeringsbásum.

**Lýsing av málinum – samandráttur**
Stórur tørvur er á parkeringsplássum í Havn, og fleiri loysnir hava verið umrøddar. Trupult er at fáa nøktandi parkeringsøki í miðbýnum, tí tætt er bygt, og infrakervið hevur trupult at bera tað nógv øktu ferðsluna.

Týdningarmikið er, at kanningarnar av einum møguligum parkeringstunli verða samskipaðar við aðrar leiðingar, sum væntandi skulu farast undir komandi árini. Viðmerkjast skal, at eitt projektarbeiði longu er gjørt í sambandi við gerð av tunli undir jørð til dagføring av leiðingunum til býin.

Ein góð loysn hevði verið at sett ein innanhýsis arbeiðsbólkur til at gera eina yvirskipaða tørvslýsing av møguligum parkeringstunli, leiðingum o.a. og at fáa ein ráðgeva til at gera eitt skitsuprojekt, kostnaðarmeting v.m.

Mett verður, at arbeiðið at gera tørvslýsing, skitsuprojekt, kostnaðarmeting o.a. verður mett til kr. 500.000 kr.

**Lógir, ásetingar o.a.**

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

**Møgulig frávik/lættar frá ásetingum**

**Umhvørvisárin**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl**

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** (set x)

| | **Fyri Tórshavnar kommunu** | **Fyri ávís økir í kommununi** | **Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir** | **Fyri vinnuna** |
|---|---|---|---|---|

| | | | | |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** **Ja ☐** **Nei ☐**

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til
- at seta ein innanhýsis arbeiðsbólk til at gera eina yvirskipaða tørvslýsing,
- at fáa ein ráðgeva til at gera eitt skitsuprojekt og kostnaðarmeting,
- at játta kr. 500.000 av konto 8175, L00001, Løgukarmur fyri árið, til arbeiðið, og

at beina málið í byggi- og býarskipanarnevdina, fíggjarnevndina og býráðið.

**Tekniska nevnd 07. mai 2019:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 08. mai 2019:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 15. mai 2019:** Samtykt at taka undir við Teknisku nevnd og byggi- og byarskipanarnevndini og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 23. mai 2019:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Umsitingin hevur arbeitt við eini ætlan um at gera ein parkeringstunnil á Eystara havnarøki, inn frá Havnargøtu. Ætlanin er at gera tunlar til uml. 200 parkeringspláss.

Ætlanin verður framløgd á fundinum.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býarverkfrøðingurin mæla til, at vit fáa gjørt eitt meira nágreina uppskot við tíðarætlan og kostnaðarmeting, umframt at lýsa møguleikar fyri fíggingarleisti, har onnur enn kommunan kunnu verða við, at leggja fyri nevndina aftur.

**Tekniska nevnd 08. oktober 2019:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Ískoyti:**
Politiskt ynski er um at seta í verk kjarnuboringar í sambandi við parkeringstunnil á Skálatrøð.

Fortreytin fyri at nytta kann fáast úr slíkum kanningum er, at staðseting av tunlinum er føstløgd. Sum tað er lýst í málinum hevur umsitiningin kannað møguleikar fyri staðseting av parkeringstunli á Skálatrøð og Eystara havnarøki. Í fyrra førinum var m.a. komið á stórar avbjóðingar í sambandi við atkomu til og frá parkeringstunlinum og í sambandi við brunatrygdarviðurskifti. Í seinna førinum varð eisini arbeitt saman við privatum aktørum um verkætlanina, herundir eisini møguleikanum at fíggja tunnilin í samstarvi við privatu aktørarnar. Hetta arbeiðið steðgaði tá tað gjørdist greitt, at privatu aktørarnir ikki høvdu ynski um at verða við í verkætlanini, um ikki parkeringsgjald eisini varð sett í gildi uttan fyri tunnilin. Sostatt er ikki komið á mál við staðsetingini av tunlinum á Skálatrøð.

Neyðugt er tí at venda aftur til prosjektering av parkeringstunli á Skálatrøð og finna staðsetingina av tunlinum fyri síðani at venda aftur til at gera forkanningar, herundir kjarnuboringar.

**Tilmæli:**

Tekniski stjórin og býarverkfrøðingurin mæla til, at vent verður aftur til upprunaliga tilmælið í málinum:

- at seta ein innanhýsis arbeiðsbólk til at gera eina yvirskipaða tørvslýsing,
- at fáa ein ráðgeva til at gera eitt skitsuprojekt og kostnaðarmeting,
- at játta kr. 500.000 av konto 8175, LK81043 Parkeringstunnil, til arbeiðið, og

at beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Tekniska nevnd 04. oktober 2021:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og ein samd nevnd heitir enn einaferð á landsins myngugleikar um at fáa heimild til at seta gjaldsparkering í verk í Havn og at beina málið í býráðið.

**Fíggjarnevndin 20. oktober 2021:** Samtykt at taka undir við teknisku nevnd og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 28. oktober 2021:** Einmælt samtykt**.**

## 256/21 Dagføring av reglugerðini fyri Parkeringsloyvir í Miðbýnum

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Tekniska nevnd | 08.10.2019 | 56/19 | 19/03973-1 |
| 2 Tekniska nevnd | 04.10.2021 | 58/21 | 19/03973-1 |
| 3 Býráðsfundur | 28.10.2021 | 256/21 | 19/03973-1 |

**Upprunin til málið:**
Orsakað av fleiri broytingum og tørvi á betri nágreining verður dagføringin av reglugerðin løgd fyri nevnd.

**Lýsing av málinum – samandráttur**
Reglugerðin varð dagførd 10. apríl 2018, tá ávísir loyvishavarar í parkeringsøki 1 fingu serloyvir til at parkera í ávísum gøtum, har tíðaravmarkingin er 30 minuttir. Hesi serloyvir vóru eftirmett 12. mars 2019 og verða eftirmett aftur í november 2020.

Reglugerðin varð á øðrum sinni dagførd 1. mai 2019, tá loyvisøkið varð víðkað. Tá vóru kortini bæði eisini broytt.

Umsitingin er eisini gjørd varug við, at treytirnar fyri at fáa parkeringsloyvi kundu verið betur nágreinaðar.

**Lógir, ásetingar o.a.**
Ongin viðmerking

**Upplýsingar frá umsitingini**
Ongin viðmerking

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**
Ongin viðmerking

**Møgulig frávik/lættar frá ásetingum**
Ongin viðmerking

**Umhvørvisárin**
Ongin viðmerking

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**
Ongin viðmerking

**Skjøl**
Reglugerð, er knýtt í málið, við í hesum dagføringunum:
Grønt litaði teksturin kom í reglugerðina 10. apríl 2018 og er dagførdur 12. mars 2019.
Kortini og gult litaði teksturin vóru dagførd 1. mai 2019.
Haraftrat eru uppskot um smávegis nágreiningar í orðingini.

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** **(set x)**

| | **Fyri Tórshavnar kommunu** | **Fyri ávís økir í kommununi** | **Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir** | **Fyri vinnuna** |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** **Ja** ☐ **Nei** ☒

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býarverkfrøðingurin mæla til at nevndin samtykkir nágreiningarnar, broyttu orðingarnar og kortini í dagførdu reglugerðini.

**Tekniska nevnd 08. oktober 2019:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Ískoyti:**
Reglugerðin hevur tørv á nøkrum dagføringum.

Tað er vorið smidligari hjá borgarum, nú møguleiki er fyri at søkja um parkeringsloyvi á Vanganum, tó er tað framvegis møguligt at senda umsókn til journalina og við at støkka inn á gólvið í Snarskivuni. Um søkt verður um parkeringsloyvi á Vanganum, er atgongd til Akstovuna fyri at finna upplýsingar um akfarið, sum skal hava parkeringsloyvi. Umsitingin hevur fingið atgongd til upplýsingar hjá Akstovuni, so nú er ikki neyðugt hjá borgarum, sum søkja um parkeringsloyvi, at senda avrit av akfarsskrásetingini.

1. Í sambandi við mál 21/02038 Víðkan av parkeringssonuni á Tinghúsvegnum, sum varð samtykt í teknisku nevnd 7. juni 2021, og sum heimilar borgarum á Tinghúsvegi 63 til 89, at søkja um parkeringsloyvi, skulu parkeringskortini í reglugerðini dagførast, sambært korti j.nr. 19/03973-4.
   Tá parkeringssonan varð víðkað í 2019, varð ovasti partur av Tinghúsvegnum ikki tikin við, orsakað av at har er smalt og bert møguligt at avmerkja 7 parkeringsbásar.
   Økta bilatalið í býnum viðførir, at bilførarar leita út um tíðaravmarkaðu parkeringssonuna at parkera. Hettar hevur skapt avbjóðingar fyri atkomu hjá neyðsynjar akførum, ruskinnsavnan og størri veitingarbilum á nevnda strekki á Tinghúsvegnum. Tað eru 4 bústaðir, sum ikki hava parkeringsmøguleikar á egnum bústaði. Ætlanin er, at tíðaravmarkingin á teimum 7 parkeringsbásunum skal vera 2 tímar.

2. Umsitingin mælir til, at verandi skipan av serloyvunum mál nr. 17/03675 fyri Magnus Heinasonar gøtu, Bø- og Tróndargøtu og Doktara Jakobsens gøtu, heldur fram til parkeringspolitikkurin væntandi verður dagførdur komandi ár, ella í síðsta lagi í oktober 2022.

3. Í Reglugerðini undir treytum stk.3 er hendan orðing: Umsøkjarin skal eiga bilin, sum hann søkir parkeringsloyvi til, og bilurin skal vera skrásettur á bústaðnum. Umsitingin hevur havt avbjóðingar av, at borgarar hava søkt um parkeringsloyvi til útlendskar bilar. Umsitingin metir, at greiðast er at nevna at bilurin skal hava føroyskt nummarspjaldur.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býarverkfrøðingurin mæla til, at reglugerðin verður dagførd sambært niðanfyri standandi broytingum og at beina málið í býráðið.

1. At borgarar á Tinghúsvegi 63 til 89, kunnu søkja um parkeringsloyvi.
2. At verandi skipan av serloyvunum mál nr. 17/03675 fyri Magnus Heinasonar gøtu, Bø- og Tróndargøtu og Doktara Jakobsens gøtu, heldur fram til parkeringspolitikkurin væntandi verður dagførdur komandi ár, ella í síðsta lagi í oktober 2022.
3. Treytir. Stk.3: Umsøkjarin skal eiga bilin, sum hann søkir parkeringsloyvi til, og bilurin skal vera skrásettur á bústaðnum og hava føroysk nummarspjøldur.

**Tekniska nevnd 04. oktober 2021:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Býráðsfundur 28. oktober 2021:** Einmælt samtykt.

## 257/21 Áheitan um at broyta byggisamtyktina fyri matr. nr. 1175i, Tórshavn

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Byggi- og býarskipanarnevndin | 16.12.2020 | 251/20 | 20/04650-3 |
| 2 Býráðsfundur | 17.12.2020 | 331/20 | 20/04650-3 |
| 3 Byggi- og býarskipanarnevndin | 08.02.2021 | 17/21 | 20/04650-3 |
| 4 Býráðsfundur | 25.02.2021 | 60/21 | 20/04650-3 |
| 5 Byggi- og býarskipanarnevndin | 10.05.2021 | 97/21 | 20/04650-3 |
| 6 Fíggjarnevndin | 19.05.2021 | 128/21 | 20/04650-3 |
| 7 Býráðsfundur | 27.05.2021 | 149/21 | 20/04650-3 |
| 8 Byggi- og býarskipanarnevndin | 08.11.2021 | 202/21 | 20/04650-3 |
| 9 Býráðsfundur | 28.10.2021 | 257/21 | 20/04650-3 |

**Upprunin til málið:**
Eigarin av matr. nr. 1175i, Tórshavn søkir um at broyta byggisamtyktina fyri økið frá B4 vinnuøki til øki, har loyvt er at byggja íbúðir. Í umsóknini stendur, at ynskið er at byggja íbúðir til fólk, ið ynskja sær ein góðan bústað á ellisárum, sí skjal *Økið*.

Hetta er ikki í tráð við ásetingarnar fyri økið, og tískil er neyðugt at broyta byggisamtyktina, um tað skal lata seg gera. Umsøkjari ynskir, at ein tílík broyting viðførir at byggjast kann við einum høgum nýtslu- og byggistigi og í trimum hæddum. Tað kundi t.d. verið í einum A3 øki, við eini serstakari byggisamtykt, ið skipar økið til íbúðarbygging ella í einum A2 øki, sum er ætlað bústaðarbygging í fleiri hæddum.

**Lýsing av málinum – samandráttur**
Matr. nr. 1175i liggur út móti Húsahaga. Ognin liggur norðanfyri Oyggjarvegin og eru eingir bústaðir staðsettir hesumegin Oyggjarvegin. Býarskipanarliga er tískil talan um eitt býarmark, ið verður flutt.

Í Kommunuætlanini 2020 er Húsahagi útnevndur sum býarvakstrarøki, sí skjal *Brot úr Kommunuætlanini 2020*, men hevur hetta økið eina lága raðfesting. Um Húsahaga sum býarvakstrarøki stendur í Kommunuætlanini:

"*Atkomuviðurskiftini í Húsahaga eru sera góð, tá til ber at koma inn á økið frá Oyggjarvegnum. Økið liggur lutfalsliga avbyrgt og langt burturi frá øðrum. Tí eru trivnaðarviðurskiftini ikki so góð her. Mett verður, at neyðuga íløgan í kloakk, um økið skal nýtast sum bústaðarøki, er órímiliga dýr. Tí kann hugsast, um økið her kann nýtast til vinnuøki, tá tað ikki krevur eins nógv av kloakering."*

Nógv av tí, sum stendur um Húsahaga í Kommunuætlanini, er somuleiðis galdandi fyri matr. nr. 1175i – økið er avbyrgt og langt burturi frá øðrum, trivnaðarviðurskiftini eru ikki so góð og egnar økið seg betur til vinnuøki enn sum bústaðarøki.

Matr. nr. 1175i er vestasti partur av einum uml. 40.000 $m^2$ stórum vinnuøki við Oyggjarvegin, har m.a. Brandstøðin heldur til. Talan er um eitt B4 vinnuøki, ið loyvir vinnuvirkjum í umhvørvisflokki 2-4, og eru hesi tey lættastu av teimum tungu framleiðsluvirkjunum. Frástøðan til bústaðir er fyri henda flokk uml. 50-100 metrar.

Ein tílík broyting, sum søkt verður um, ávirkar ikki einans sjálvan matrikulin, men ávirkar eisini vinnuøkið, ið liggur eystanfyri, av tí at ein ávís frástøða verður kravd millum bústaðir, og vinnuvirki í umhvørvisflokki 2-4. Um bústaðir verða loyvdir á matr. nr. 1175i ávirkar hetta soleiðis ein part av vinnuøkinum við Oyggjarvegin, og kann hesin parturin ikki nýtast til tað, sum byggisamtyktin annars loyvir, sí grøna skraveraða økið á skjali *Byggisamtykt.*

Hóast tað er eftirspurningur eftir bústøðum í kommununi, so er somuleiðis eftirspurningurin eftir vinnuøkjum stórur. Tí verður tað ikki mett vera rætt at broyta eitt stykki í einum øki, ið frammanundan er planlagt til vinnu, til bústaðarøki.

**Lógir, ásetingar o.a.**
Økið liggur í B4 øki, og eru ásetingarnar fyri hetta m.a.:

- Loyvt er einans at byggja hús til vinnuvirki, verkstaðir og tílíkt og til tænastuvirksemi, ið hava samband við hesi.
- Virkini í hesum umráðisparti skulu kunna flokkast í umhvørvisflokkunum 2 til 4 sambært reglum hjá Tórshavnar kommunu.

Um møguleiki skal vera at byggja íbúðir á økinum, má økið broytast til A2 øki ella A3 øki.

Ásetingarnar fyri A2 øki eru m.a.:

- Loyvt er einans at byggja hús í fleiri hæddum til bústaðarendamál.
- Byggistigið má ikki fara upp um 0,25.
- Nýtslustigið má ikki fara upp um 0,8.
- Hús kunnu einans verða bygd við í mesta lagi 5 hæddum umframt nýttum lofti og mugu ikki vera hægri enn 15 m til hægsta punkt við útvegg og 18 m mált til mønuna. Kjallari verður roknaður sum húsahædd.

Ásetingarnar fyri A3 øki eru m.a.:

- Økið verður lagt til blandaða bústaða- og miðstaðabygging, har loyvt er at hava handlar, smáhandverk og minni virki, skrivstovur, stovnar, samkomuhús, heilsubótarhøli og tílíkt.
- Byggistig 0,3.
- Nýtslustigið má ikki fara upp um 0,6 fyri stakhús og 0,7 fyri tvíhús ella raðhús.
- Hús við vanligari mønureising mugu einans verða bygd í tveimum hæddum umframt nýttum lofti og mugu ikki vera hægri enn 6 m til hægsta punkt við útvegg og 9 m til mønuna.
- Í serstakari byggisamtykt kann víkjast frá tal av hæddum og verða loyvt at byggja hægri og fyriskipað at húsini verða sett í veglinju ella byggilinju, (víkja frá ásettu byggi- og nýtslustigunum og minstu grundstykkjavídd).

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

**Møgulig frávik/lættar frá ásetingum**

**Umhvørvisárin**
Í B4 økjum verða vinnuvirki í umhvørvisflokkunum 2 til 4 loyvd. Í vegleiðingini til flokking av vinnuvirkjum í Tórshavnar kommunu, stendur soleiðis um flokk 4:
*"Umfatar virki, ið geva ávirkan á sítt nærmasta umhvørvi, men eru tey lættastu av teimum tungu framleiðsluvirkjunum. Kann staðsetast í einum ídnaðarøki. Virkir í hesum flokkinum eru serliga matvøruvirkir og t.d. minni virkir sum bilverkstaðir við sproytukabinu. Frástøðan til bústaðir, er fyri henda flokk uml. 50-100 metrar."*

Umhvørvisdálkingin, ið stendst av vindmyllulundunum í økinum – verandi og ætlaðu – ávirka ikki matr. nr. 1175i.

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**
Málið hevur verið til hoyring hjá teknisku deild og upplýsa tey, at kommunan er í samráð við Landsverk um yvirtøku av Oyggjarvegnum, niðan til Hotel Føroyar. Annars hava tey ongar viðmerkingar til umsóknina.

**Skjøl**
- *Brot úr Kommunuætlanini 2020,* journal nr. 20/04650-5.
- *Byggisamtykt,* journal nr. 20/04650-6.
- *Økið,* journal nr. 20/04650-6.

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** **(set x)**

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| Umsitingaravleiðingar | | | | |
| Umhvørvisavleiðingar | | | | |
| Sosialar avleiðingar | | | | |
| Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar: Ja ☐ Nei ☐**

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla frá at broyta almennu byggisamtyktina fyri matr. nr. 1175i, Tórshavn, grundað á:
- Økið er ein natúrligur partur av vinnuøkinum við Oyggjarvegin.
- Økið liggur avbyrgt og uttanfyri planlagt bústaðarøki.
- Broytingin er ikki í tráð við vegleiðingina um umhvørvisflokking í Tórshavnar kommunu, og hevði ein tílík broyting havt ávirkan á møguligu nýtsluna av grannaognum.
- Tørvur er á vinnuøkjum í kommununi.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 16. desember 2020:** Marin Katrina Frýdal og Turið Horn taka undir við tilmælinum.

Bogi Andreasen og Annfinn Brekkstein mæla til at ganga umsøkjaranum á møti um at broyta byggisamtyktina.

**Býráðsfundur 17. desember 2020:** Tikið av skrá.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 08. februar 2021:** Ein meiriluti, Tróndur Sigurðsson, Annfinn Brekkstein, Kári Johansen og Ruth Vang, samtykti at ganga umsøkjaranum á møti um at broyta byggisamtyktina við treytum sum umsitingin setur og at kloakkviðurskiftini kunnu loysast uttan kostnað fyri kommununa.

Ein minniluti, Jákup Dam, tekur undir við tilmælinum.

**Býráðsfundur 25. februar 2021:** Atkvøtt varð um tilmælið frá meirilutanum í byggi- og býarskipanarnevndini, ið varð samtykt við tíggju atkvøðum fyri, tveimum atkvøðum ímóti og einari blankari atkvøðu.

Fyri atkvøddu: Heðin Mortensen, Annfinn Brekkstein, Tróndur Sigurðsson, Kristianna Winther Poulsen, Kári Johansen, Súna Mørk Bjørg Dam, Annika Olsen, Birgir Nielsen og Ruth Vang.

Ímóti atkvøddu: Jákup Dam og Gunvør Balle.

Blankt atkvøddi: Elsa Berg.

**Ískoyti:**
Á fundi hin 25. februar 2021 samtykti býráðið at broyta almennu byggisamtyktina fyri matr. nr. 1175i, Tórshavn, soleiðis at íbúðarbygging kann loyvast á stykkinum.

Býarskipanarliga verður mett, at um økið skal nýtast til bústaðabygging, so hóskar tað seg frægast at liggja sum A2 øki, sum er øki ætlað høgari bústaðabygging. Økið liggur á somu hæddarkurvu sum økið við høgari íbúðarbygging á Heimasta hornið, og er tað í tráð við øki aðrastaðni í býnum, har høg bygging verður loyvd framvið brøttum lendi. Tó er ynskið ikki, at byggingin skal koma upp um lendið norðanfyri, og tískil eigur at verða hugt eftir hæddarkurvum í økinum, tá mest loyvda hædd verður ásett – hetta verður væntandi 2-4 hæddir.

Sum víst á í málslýsingini omanfyri, so er økið í dag partur av einum B4 vinnuøki. Bilasølan og brandstøðin, ið liggja beint eystan fyri matr. nr. 1175i, verða framvegis B4 vinnuøki, og matr. nr. 1175i verður broyttur til A2 øki, soleiðis at íbúðarbygging kann loyvast. Í B4 vinnuøkjum verða vinnuvirki í flokki 2-4 loyvd. Hetta eru vinnuvirki, ið hava ávirkan á sítt nærmasta umhvørvi og tí verður í vegleiðingini um umhvørvisflokking av vinnuvirkjum í Tórshavnar kommunu mælt til, at tílík virki hava eina frástøðu til bústaðir á 20-100 m.

Á matr. nr. 1175c, sum er nærmasti granni hjá matr. nr. 1175i, er í dag ein bilasøla. Hóast ásetingarnar fyri B4 øki loyva vinnuvirkjum í umhvørvisflokki 2-4, so er virksemi á matr. nr. 1175c í dag, ikki í nøkrum umhvørvisflokki, av tí at søla av bilum ikki verður mett at dálka umhvørvið. Tó, so stendst ein ávís til/frákoyring frá bilasøluni, ið kann verða órógvandi fyri bústaðarøkið, og vanliga verða hesi ikki staðsett lið um lið.

Av tí at matr. nr. 1175c liggur í mark við matr. nr. 1175i, verður mælt til, at virksemið, og framtíðarvirksemið á matriklinum, ikki verður hægri enn umhvørvisflokkur 2. Hetta soleiðis at virksemið á matr. nr. 1175c órógvar íbúgvarnar í íbúðarbygninginum sum minst.

Býarskipanarliga amboðið í tílíkum málum, har viðurskifti, so sum loyvt virksemi, hæddir, skipan av økinum og umhvørvisflokking, skulu ásetast fyri eitt avmarkað øki, eru serstakar byggisamtyktir. Hetta er ein demokratisk mannagongd við t.d. almennari hoyring og góðkenning frá landinum, umframt at serstakar byggisamtyktir liggja alment atkomuligar.

Í hesum málinum hevur ynski tó verið frammi um at seta ásetingarnar um hædd og umhvørvisflokking í skeytið. Tað er møguligt, og leggur somu bindingar á økið og byggingina, men er ikki ein nútímans máti at skipa býin uppá. Við at brúka ásetingar í skeytum ístaðin fyri í serstakari byggisamtykt, verður tað torført hjá kommununi at býarskipa og umsita, umframt at gjøgnumskygni hjá borgarunum verður skert.

Um ásetingar viðvíkjandi mest loyvdu hædd og umhvørvisflokking verða settar í skeytið, verður mælt til, at avtala um hetta verður gjørd við eigararnar av matr. nr. 1175i og 1175c, áðrenn uppskotið til broyting av almennu byggisamtyktini verður send Umhvørvis- og vinnumálaráðnum til endaliga góðkenning.

Í avtaluni eiga ásetingar um mest loyvdu hædd, væntandi 2-4 hæddir, at verða ásettar fyri matr. nr. 1175i, umframt at treyt um, at virksemið á matr. nr. 1175c ikki skal vera í hægri umhvørvisflokki enn 2, smb. vegleiðingini um flokking av vinnuvirkjum í Tórshavnar kommunu.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til at skipa økið við serstakari byggisamtykt.

Um avtala skal gerast um at seta ásetingarnar í skeytið, mæla tekniski stjórin og býararkitekturin til:

- At áseting um mest loyvdu hædd verður sett í skeytið fyri matr. nr. 1175i. Hendan hæddin verður ásett við støði í lendinum norðanfyri og verður væntandi 2-4 hæddir (9-12 m).
- At áseting um, at vinnuvirkið á matr. nr. 1175c ikki er í hægri umhvørvisflokki enn 2, smb. vegleiðing um umhvørvisflokking av vinnuvirkjum í Tórshavnar kommunu.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 10. mai 2021:** Ein meiriluti, Tróndur Sigurðsson, Annfinn Brekkstein og Kári Johansen, samtykti at seta ásetingarnar í skeytið.

Ein minniluti, Ruth Vang og Jákup Dam, tekur undir við tilmælinum um at gera serstaka byggisamtykt.

**Fíggjarnevndin 19. mai 2021:** Ein meiriluti, Heðin Mortensen, Tróndur Sigurðsson og Annfinn Brekkstein, tekur undir við meirilutanum í byggi- og býarskipanarnevndini og beinir málið í býráðið.

Ein minniluti, Annika Olsen og Elsa Berg, tekur undir við minnilutanum í byggi- og býrskipanarnevndini.

**Býráðsfundur 27. mai 2021:** Atkvøtt varð um tilmælið frá meirilutanum í fíggjarnevndini, ið varð samtykt við 10 atkvøðum fyri, 3 ímóti og ongari blankari.

Fyri atkvøddu: Annfinn Brekkstein, Annika Olsen, Tróndur Sigurðsson, Kristianna Winther Poulsen, Kári Johansen, Súna Mørk, Bjørg Dam, Høgni Joensen, Birgir Nielsen og Súsanna Olsen.

Ímóti atkvøddu: Elsa Berg, Jákup Dam og Gunnvør Balle.

**Býráðsfundur 28. oktober 2021:** Tikið av skrá**.**

# 258/21 Nýggj serstøk byggisamtykt fyri vindmyllur í Hoyvíkshaga

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Náttúru- og umhvørvisnevndin | 05.10.2020 | 47/20 | 20/00719-6 |
| 2 Byggi- og býarskipanarnevndin | 07.10.2020 | 187/20 | 20/00719-6 |
| 3 Byggi- og býarskipanarnevndin | 26.10.2020 | 211/20 | 20/00719-6 |
| 4 Býráðsfundur | 29.10.2020 | 241/20 | 20/00719-6 |
| 5 Byggi- og býarskipanarnevndin | 12.04.2021 | 57/21 | 20/00719-6 |
| 6 Býráðsfundur | 29.04.2021 | 123/21 | 20/00719-6 |
| 7 Byggi- og býarskipanarnevndin | 08.11.2021 | 201/21 | 20/00719-6 |
| 8 Býráðsfundur | 28.10.2021 | 258/21 | 20/00719-6 |

**Upprunin til málið:**
Á býráðsfundi hin 23. mai 2019 varð samtykt at geva tilsøgn til, at vindmyllur kunnu setast upp í Hoyvíkshaga, m.a. treytað av at serstøk byggisamtykt verður gjørd fyri økið.

**Lýsing av málinum – samandráttur**
Útbygging av grønari orku minkar um brúk av dálkandi orkukeldum og mett verður, at tað er hóskandi at seta fleiri vindmyllur í øki, sum frammanundan hevur vindmyllur.

Ætlanin er at seta 6 vindmyllur upp, og hava hesar eina hædd á uml. 79 m upp til tornið, og veingjabreiddin er uml. 82 m. Soleiðis eru tær nakað hægri enn t.d. vindmyllurnar í Húsahaga, sum eru uml. 67 m høgar.

Økið, sum ætlanin er at seta vindmyllur á, er sambært Kommunuætlanini ikki partur av býarvakstrarøki fram til 2030.

**Lógir, ásetingar o.a.**
Økið liggur í 4. Grundumráði, sum m.a. hevur hesar ásetingarnar:

*§ 26, stk. 1. 4. Grundumráði verður í høvuðsheitum nýtt til landbúnað og alment frílendi og tílíkt.*

*Stk. 1, pkt. e. Harafturat kann onnur bygging og virksemi, sum ikki hóskar seg at liggja í bygdum øki, staðsetast í 4. Grundumráði.*

*Pkt. f. Øll bygging í 4. Grundumráði sambært § 25, stk. 2, litra d og e, skal gerast sambært serstakari byggisamtykt.*

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**
- *Umsókn um byggiloyvi at reisa vindmyllur í Hoyvíkshaganum (Gellingarklett) tilhoyrandi Hoyvík, matr. nr. 139a,* journal nr. 19/01208
- *Lendi til vindmyllulund,* journal nr. 19/01609
- *Umsókn um byggiloyvi til smáttur á matr. nr. 1175l, Tórshavn,* journal nr. 20/02026

**Møgulig frávik/lættar frá ásetingum**

**Umhvørvisárin**
Greiningar vísa, at partur av byggisamtyktarøki A1, D1 og F øki liggur innanfyri økið, har ljóðstøðið sambært ásetingunum ikki hóskar til bústaðabygging, sí appilsingula ringin á s. 1 í viðhefta skjali *Umhvørvisdálking*.

Kommunan hevur ikki í løtuni ítøkiligar ætlanir um at byggja bústaðir á hesum A1 økinum, men innan 20 ár er ikki óhugsandi, at bygt verður á hesum øki.

Hinvegin, so eru ítøkiligar ætlanir við matr. nr. 1175l, sum er partur av F økinum, sum liggur innanfyri appilsingula markið. 2. juni 2020 móttók kommunan umsókn um byggiloyvi til smáttur og kampingøki á matriklinum.

Staðsetingin av vindmyllunum kann ikki endaliga staðfestast, fyrr enn boriroyndir eru gjørdar í økinum og verður mælt til, at umsøkjari leggur seg eftir, at ljóðviðurskiftini órógva byggiøkini minst møguligt og flytur vindmyllurnar soleiðis, at F øki ikki verður órógvað av vindmyllunum.

Ein lítil partur av D1 økinum liggur somuleiðis innanfyri óljóðsmarkið, men mett verður, at útbyggingin av grønari orku vigar tyngri enn atliti til at verja ítøkiliga D1 øki við Villingadal.

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**
Tekniska deild:

- Møguleikin fyri óhappi, og at dálking kann ávirka vatngóðskuna í byrgingini í Havnardali og Villingadali er lítil. Vandin er størri í byggifasuni, enn tá projektið er liðugt. Vandin liggur í, at olja so ella so kann setast oman í vatnbrunnin. Atlit mugu takast til tey akfør og maskinur, sum koma at arbeiða í økinum, og tiltøk mugu vera klár, um óvæntað dálking hendir.

Málið er til hoyringar hjá friðingarmyndugleikanum og hjá Landsverki.

Málið varð sent til hoyringar hjá SEV. Teir høvdu viðmerking um at serstaka byggisamtyktin somuleiðis átti at fevnt um ætlaðu vindmyllulundina hjá SEV. Hendan ætlanin er tó ikki komin eins langt og omanfyri nevnda vindmylluætlan, og tískil verður mælt til at bíða við at gera serstaka byggisamtykt fyri ætlanina hjá SEV.

**Skjøl**

- *Serstøk byggisamtykt fyri vindmyllur í Hoyvíkshaga,* journal nr. 20/00719-19
- *Umhvørvisdálking,* journal nr. 20/00719-20

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** (set x)

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| Umsitingaravleiðingar | | | | |
| Umhvørvisavleiðingar | | | | |
| Sosialar avleiðingar | | | | |
| Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** **Ja ☐ Nei ☐**

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til at samtykkja uppskotið til serstaka byggisamtykt fyri vindmyllur í Hoyvíkshaga, treytað av:

- loyvi frá Yvirfriðingarnevndini og Landsverk
- at ljóðviðurskiftini órógva byggiøkini minst møguligt og at vindmyllurnar verða fluttar soleiðis, at F økið ikki verður órógvað.

- og beina málið í býráðið.

**Náttúru- og umhvørvisnevndin 05. oktober 2020:** Útsett.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 07. oktober 2020:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Ískoyti:**
Síðani seinastu viðgerð í byggi- og býarskipanarnevndini, eru nýggjar upplýsingar komnar í málinum.

Upplýsingarnar eru viðvíkjandi óljóðsmátingunum, og hvussu trupulleikarnir, við at partur av kampingøkinum á F økinum liggur innanfyri markið fyri óljóði, kunnu loysast.

Tá vindmyllurnar eru settar upp og smátturnar bygdar, verður mælt til at óljóðsmátingar verða gjørdar, fyri at staðfesta veruliga óljóðstøðið í økinum. Um mátingarnar vísa, at óljóðstøðið í F økinum er ov høgt, verður mælt til at vindmyllurnar, ið eru atvoldin til ov høga óljóðstøðið, steðga ella verða niðurreguleraðar tey tíðspunkt, tá óljóðið er ov høgt. Talan er um lutfalsliga fáar tímar á árinum.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til at samtykkja uppskotið til serstaka byggisamtykt fyri vindmyllur treytað av:
- Loyvi frá Yvirfriðingarnevndini og Landsverk.
- At ljóðviðurskiftini verða kannaði, tá vindmyllurnar eru settar upp og smátturnar í F økinum er bygdar. Um tað vísir seg, at óljóðstøðið er ov høgt í økinum, skulu viðkomandi vindmyllur steðgast ella niðurregulerast tey tíðspunkt, tá óljóðið er ov høgt.

og at beina málið í býráðið.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 26. oktober 2020:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Býráðsfundur 29. oktober 2020:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Serstaka byggisamtyktin fyri vindmyllur í Hoyvíkshaga varð góðkend av Umhvørvis- og vinnumálaráðnum hin 12. februar 2021. Síðani hevur umsøkjari søkt um loyvi at seta upp eitt annað slag av vindmyllum, sum er størri og effektivari – framleiða uml. 45% meira orku á sama øki og við somu staðseting av vindmyllum. Ein tílík broyting av vindmylluslagi, krevur eina broyting av serstøku byggisamtyktini fyri økið.

Hetta nýggja slagið av vindmyllum er væl størri enn tær í fyrru ætlanini og fer hæddin upp til tornið úr 79 m til 92 m og veingjabreiddin fer úr 82 m til 117 m. Umsøkjari hevur sent visualiseringar av nýggju vindmyllunum frá somu staðsetingum sum tær í fyrru ætlanini, soleiðis at til ber at meta um visuellu broytingarnar, sí skjal *Visualiseringar – Enercon og Vestas*. Tað sæst sjálvsagt, at nýggju vindmyllurnar eru størri og fara tær at verða sjónligar frá størri parti av býnum, men við støði í innsendu visualiseringunum verður ikki mett, at broytingin av vindmylluslagi/støddini hevur stóra sjónliga ávirkan á umhvørvið, sæð frá útvaldu støðunum í býnum.

Umsøkjari hevur sent nýggjar simuleringar av óljóðinum, ið stendst av vindmyllunum. Hesar vísa, at tað ikki er stórur munur, á óljóðinum frá vindmyllunum í upprunaligu ætlanini, og nýggju vindmyllunum. Sambært umsøkjara, kemst hetta av, at veingirnir á nýggju vindmyllunum eru formaðar annarleiðis.

Umhvørvisstovan hevur lagt góðkenningina av Umhvørvisárinsmetingini og Umhvørvisgóðkenningina til hoyringar.

Broytingin av vindmylluslagnum krevur eina nýggja góðkenning frá Yvirfriðingarnevndini, og hevur nevndin fingið málið til viðgerðar.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til at góðkenna broytingina av serstøku byggisamtyktini fyri vindmyllur í Hoyvíkshaga smb. skjalinum *Broytingaruppskot*, treytað av:

- Loyvi frá Yvirfriðingarnevndini.
- At ljóðviðurskiftini verða kannaði, tá vindmyllurnar eru settar upp og smátturnar í F økinum eru bygdar. Um tað vísir seg, at óljóðstøðið er ov høgt í økinum, skulu viðkomandi vindmyllur steðgast ella niðurregulerast tey tíðspunkt, tá óljóðið er ov høgt.

Og at beina málið í býráðið.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 12. apríl 2021:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og at umsitingin kannar við atliti til at vindmyllurnar eru staðsettar í einum tilrenningarøki, har drekkivatn verður savnað, um staðsetingin kann hava ávirkan á drekkivatnið í kommununi.

Kári Johansen luttók ikki í viðgerðini av málinum.

**Býráðsfundur 29. apríl 2021:** Tikið av skrá.

**Býráðsfundur 28. oktober 2021:** Tikið av skrá.

# 259/21 Umsókn um at broyta byggisamtyktina fyri matr. nr. 66, Nólsoy

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Byggi- og býarskipanarnevndin | 13.09.2021 | 149/21 | 21/02199-6 |
| 2 Nólsoyarnevndin | 21.09.2021 | 10/21 | 21/02199-6 |
| 3 Byggi- og býarskipanarnevndin | 26.10.2021 | 191/21 | 21/02199-6 |
| 4 Býráðsfundur | 28.10.2021 | 259/21 | 21/02199-6 |

**Upprunin til málið**
Eigarin av matr. nr. 66, Nólsoy, hevur søkt um at broyta byggisamtyktina fyri matr. nr. 66, Nólsoy, soleiðis at loyvi kann gevast at stykkja út grundstykkir til summarhús. Ætlanin er at stykkja út og byggja 10-16 summarhús, sí skjal *Støðumynd*. Felags parkeringspláss verður gjørt við innkoyringina og atkomuvegur verður til øll stykkini. Viðvíkjandi tekniskum viðurskiftum verður skrivað, at spillivatnsskipanin verður gjørd, so hon yvirheldur kunngerð um Spillivatn. Installatiónir so sum el, tele og vatn koma norður gjøgnum verandi veg og skipað verður fyri felags ruskinnsavnan við parkeringsplássið.

**Lýsing av málinum**
Matr. nr. 66 liggur norðuri í Stokkvík á Stongini í Nólsoy, sí skjal *matr. nr. 66, Nólsoy.* Talan er um øki, ið liggur í fríari náttúru, uml. 0,5 km frá øðrum bygdum øki.

Eingin heildarætlan er fyri summarhúsøki í kommununi, men tað hevur verið ført fram, at ynskið er at betra um møguleikarnir fyri frítíðarhúsum í bygdunum – hetta m.a. við at loyva frítíðarbústøðum á loftum í neystum og við at leggja nýggj øki av til frítíðarhús í bygdum sum t.d. Hestur. Tá skipað verður fyri økjum til summarhús er skynsamt, at hesi liggja í útjaðaranum av tí bygda økinum, soleiðis at nærleiki er til almennar hentleikar, uttan at nýggju økini gera seg ov nógv inn á bygdalagið.

Mælt verður frá at loyva summarhúsútstykking á matr. nr. 66, Nólsoy, av tí at talan er um náttúru, ið eigur at fáa frið fyri bygging, økið liggur ov langt frá bygdum øki annars, umframt at økið liggur nakað frá tekniskum leiðingum og vegurin til økið ikki er góður at koyra á.

**Lógir, ásetingar o.a.**
Ásetingar fyri H: Landbúnaðarøki í byggisamtyktini fyri Nólsoy eru m.a.:
- Landbúnaðarøki t.e. bøur og lendi, sum ikki má byggjast á. Tað eru lendi, sum løgd eru av til landbúnað, varðveitingar av náttúru, fornminnum o.t. og til at fríðka um bygdina og gera hana dámligari at búgva í.
- Útstykking má ikki fara fram.

Ásetingar fyri A: Sethúsaøki í byggisamtyktini fyri Nólsoy eru m.a.:
- Loyvt er einans at byggja sethús við upp til 2 íbúðum og – eftir serloyvi frá bygdarráðnum, - tvíhús-, rað- og ketuhús o.t. til húski. Í sambandi við bústaðirnar skal tó bera til at innrætta høli til handlar, onnur vinnuendamál og stovnar, treytað av at hesi virki ikki eru til ampa ella lýta dámin á økinum, sum sethúsabýlingi.

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**
Bygging í 4. Grundumráði krevur loyvi frá Friðingarmyndugleikanum.

**Skjøl**
- *Støðumynd,* journal nr. 21/02199-7.

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum (set x)**

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Møgulig frávik/léttar frá ásetingum** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar: Ja ☐ Nei ☐**

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla frá at broyta byggisamtyktina fyri Nólsoy, soleiðis at byggjast kunnu summarhús á matr. nr. 66, Nólsoy grundað á at:
- Talan er um náttúruøki, ið eigur at fáa frið fyri bygging.
- Økið liggur ov langt frá bygdum øki annars.
- Økið liggur nakað frá tekniskum leiðingum og vegurin til økið er ikki góður at koyra á.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 13. september 2021:** Samtykt at beina málið í Nólsoyarnevndina til hoyringar.

**Nólsoyarnevndin 21. september 2021:** Kunnað varð um málið. Staðbundna nevndin vil hava at málið um summarhús yvirhøvur verður tikið upp á næstkomandi borgarafundi.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 26. oktober 2021:** Útsett.

**Býráðsfundur 28. oktober 2021:** Tikið av skrá.

# 260/21 Endurskoðan av byggisamtyktini fyri Velbastað

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Byggi- og býarskipanarnevndin | 13.09.2021 | 147/21 | 21/03382-1 |
| 2 Kirkjubøar/Velbastaðarnevndin | 27.09.2021 | 7/21 | 21/03382-1 |
| 3 Býráðsfundur | 30.09.2021 | 235/21 | 21/03382-1 |
| 4 Byggi- og býarskipanarnevndin | 26.10.2021 | 192/21 | 21/03382-1 |
| 5 Býráðsfundur | 28.10.2021 | 260/21 | 21/03382-1 |

**Upprunin til málið**
Í málinum *Endurskoðan av byggisamtyktunum fyri bygdirnar* er samtykt, at endurskoða byggisamtyktirnar fyri allar bygdirnar í kommununi.

Fyri fleiri av bygdunum eru byggisamtyktirnar ikki vorðnar endurskoðaðar síðani tær eru blivnar partur av Tórshavnar kommunu, og tí er í nógvum førum ósamsvar millum byggisamtyktirnar fyri bygdirnar og almennu byggisamtyktina fyri Tórshavnar kommunu. Harumframt er munur á hvat loyvt verður í teimum ymisku bygdunum, og hetta ger byggisamtyktirnar fyri bygdirnar torskildar, truplar at umsita og viðførir ójavnvág í kommununi.

Í málinum *Endurskoðan av byggisamtyktunum fyri bygdirnar* eru yvirskipaði viðurskifti viðgjørd við tí endamáli, at fáa eins ásetingar í byggisamtyktunum fyri bygdirnar, tó við nøkrum frávikum, tá talan er um staðbundin viðurskifti og serstakan bygdadám.

Í hesum málinum verður serstaka byggisamtyktin fyri Velbastað viðgjørd nærri, við støði í yvirskipaðu viðurskiftunum, sum eru viðgjørd í málinum *Endurskoðan av byggisamtyktunum fyri bygdirnar.*

**Lýsing av málinum**
Velbastaður er fevndur av byggisamtyktini hjá Kirkjubøar kommunu, og varð gjørd í 1987. Í uppskotinum til endurskoðan av byggisamtyktini fyri bygdirnar verður mælt til, at bygdirnar Kirkjubøur, Velbastaður, Nólsoy, Hvítanes, Kaldbak og Hestur fáa hvør sína serstaka byggisamtykt, í trá við ásetingarnar fyri 4. Grundumráði í Almennu byggisamtyktini fyri Tórshavnar kommunu. Hetta merkir, at serstaka byggisamtyktin fyri Kirkubø/Velbastað verður býtt í tvey, soleiðis at bygdirnar fáa hvør sína serstaka byggisamtykt.

Mett verður ikki, at serstøku byggisamtyktirnar fyri bygdirnar skulu hava eins nógv ymisk øki, sum almenna byggisamtyktin hevur, av tí at talan er um minni bygdir, har ikki ber til at regulera virksemið eins neyvt og í høvuðsstaðnum. Tí eru tær ymisku ásetingarnar fyri allar bygdirnar samanbornar, og funnið er fram til nakrar felags ásetingar, ið hóska til allar bygdirnar.

Áðrenn endurskoðanina av byggisamtyktini fyri Velbastað, eru hesi ymisku økini í bygdini:

B: Sethús
C: Vinnuendamál
C:1A: Vinnuendamál
D: Havnaøki
$D^1$: Ferjuhavn
E: Almennir stovnar
F: Almenn frítíðarøki
G: Neyst og bátapláss

H: Frílendi
$H^1$: Friðað øki
J: Bóndahús
K: Landbúnaður

Niðanfyri eru ásetingarnar í uppskotinum til endurskoðan av byggisamtyktini fyri Velbastað, sum smb. uppskotinum eru tær somu fyri allar bygdirnar:

SA: Bústaðarøki
SB1: Havnaøki
SB2: Vinnuøki
SD1: Frílendi
SD2: Almennir stovnar og mentan
SE: Neyst
SF: Frítíðarhús

Tá kemur til bókstavir og tøl, verða somu tekin brúkt fyri økini í bygdunum sum í høvuðsstaðnum, men við tí muni, at “S” er sett frammanfyri bókstavirnar og tølini, t.d. “S”B1, fyri at vísa til at talan er um øki í eini serstakari byggisamtykt, og ikki í høvuðsstaðnum.

Sum sæst, so eru tað færri øki í uppskotinum til endurskoðan av byggisamtyktini fyri Velbastað.

- B: Sethúsaøki er broytt til SA: Bústaðarøki
- Tey bæði vinnuøkini C: Vinnuendamál og C1A Vinnuendamál eru broytt til SB2: Vinnuøki
- Tey bæði havnaøkini D: Havnaøki og $D^1$: Ferjuhavn, eru broytt til SB1: Havnaøki
- Tey bæði almennu økini E: Almennir stovnar og F: Almenn frítíðarøki eru broytt til SD2: Almennir stovnar og mentan
- G: Neyst og bátapláss er broytt til SE: Neyst
- Tey bæði almennu grønu økini H: Frílendi og $H^1$: Fríðað øki eru broytt til SD1: Frílendi
- Tey bæði landbúnaðarøkini J: Bóndahús og K: Landbúnaður eru broytt til 4. Grundumráði í almennu byggisamtyktini fyri Tórshavnar kommunu.

Tær ávísu broytingarnar í økjum og ásetingum eru nærri lýstar í skjalinum *KirkjubøVelbastað – áðrenn og eftir broyting,* og ein meira yvirskipað lýsing er niðanfyri:

**Bústaðarøki**
Bústaðarøkini í Almennu byggisamtyktini fyri Tórshavnar kommunu loyva typologiunum stakhús, tvíhús, raðhús og íbúðir. Í bygdunum er ein meting gjørd av, hvør typologi skal loyvast í hvørjari bygd, gjørd út frá m.a. verandi bygging/ásetingum og bygdadámi.

Á Velbastað verður mett ráðiligt at loyva stakhúsum, tvíhúsum, raðhúsum og íbúðum. Bygdin hevur eina hóskandi stødd og nærleika til høvuðstaðin, og mett verður, at dámurin í bygdini rúmar hesum typologium.

Í sethúsaøkjum í Almennu byggisamtyktini fyri Tórshavnar kommunu er minsta grundstykkjavídd 500 $m^2$. Í bygdunum verður yvirskipað mett, at grundstykkini kunnu vera minni, og á Velbastað verður mett, at ein hóskandi minsta grundstykkjavídd er 400 $m^2$. Hetta grundað á lendisviðurskifti, og verandi víddir á grundstykkjum í bygdini.

Ásetingar viðv. hædd, byggi- og nýtslustigi vera tær somu sum fyri sethúsaøki í Almennu byggisamtyktini fyri Tórshavnar kommunu.

**Vinnu-/Havnaøki**
Í summum bygdum eru vinnu- og havnaøkini tvunnin saman, meðan tað í summum bygdum eru ymiskar ásetingar – á Velbastað eru tað áðrenn endurskoðanina tvey ymisk vinnuøki og tvey ymisk havnaøki.

Mett verður, at tað er greiðast at hava eitt øki til vinnu og eitt øki til havnaendamál í serstøku byggisamtyktunum fyri bygdirnar. Soleiðis verða tey atskild, uttan at tað gerst ov ítøkiligt, júst hvat virksemi skal vera í økinum.

**Almenn øki**
Í byggisamtyktini fyri Kirkjubø/Velbastað er áðrenn endurskoðanina 4 ymisk almenn øki – Almenn frítíðarøki, øki til almennar stovnar, frílendi og friðað øki.

Mett verður, at í bygdunum eiga tvey ymisk almenn øki at vera – eitt til grøn fríøki, har ikki er loyvt at byggja, og eitt til almennar stovnar, ítrótt og mentan. Ikki er neyðugt við serskildum øki til friðað øki. Hesi eru friðað smb. løgtingslógum, t.d. nr. 48 um náttúrufriðing og nr. 19 um fornminni og bygningar.

**Neystaøki og øki til frítíðarhús**
Ynski hevur leingi verið um at loyva frítíðarbústøðum í neystum, og mett verður, at ásetingarnar fyri neystaøkini í bygdunum skulu vera soleiðis, at til ber at hava frítíðarbústað á loftinum. Tó, so skulu nakrar treytir verða, t.d. skulu kloakkir og aðrar leiðingar gjaldast av neystaeigarunum og á niðastu hædd skal vera møguligt at hava bát.

Í bygdunum eiga somuleiðis at vera løgd av øki til frítíðarhús. Hesi eiga at liggja í útjaðaranum av bygdini, soleiðis at nærleiki er til almennar hentleikar, uttan at tey gera seg ov nógv inn á bygdalagið – í hesum sambandi eiga atlit so sum støðd á øki, bygging, snið og tílíkt at verða tikin. Á økjunum til frítíðarhús eigur ikki at vera møguligt at búgva alt árið, grundstykkini kunnu vera minni, og til ber at skipa tey annarleiðis enn vanlig bústaðarøki, við t.d. felags parkeringsplássum.

**Lógir, ásetingar o.a.**
Í § 26, stk. 5 í almennu byggisamtyktini fyri Tórshavnar kommunu er ásett at:
- *Í bygdunum Kaldbak, Kaldbaksbotni, Hvítanesi, Norðradali, Syðradali, Nólsoy, Hestur, Koltur, Kirkjubø og Velbastað kann, út um tað, ið er ásett fyri 4. Grundumráði, einans verða bygd sambært serstakum byggisamtyktum.*

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**
- *Umsókn um fíggjarligan stuðul til ábøtur á spæliplássið á Velbastað, matr. nr. 50a og 50ak,* journal nr. 16/02938.

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl**
- *KirkjubøVelbastað – áðrenn og eftir broyting,* journal nr. 21/03382-2.
- *Kort – áðrenn endurskoðan,* journal nr. 21/03382-3.
- *Kort – eftir endurskoðan,* journal nr. 21/03382-3.
- *Serstøk byggisamtykt – Tekstur,* journal nr. 21/03382-4.

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** **(set x)**

| | **Fyri Tórshavnar kommunu** | **Fyri ávís økir í kommununi** | **Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir** | **Fyri vinnuna** |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Møgulig frávik/lættar frá ásetingum** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** **Ja ☐** **Nei ☐**

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til at samtykkja uppskotið til endurskoðan av byggisamtyktini fyri Velbastað smb. skjølunum *Serstøk byggisamtykt – tekstur* og *Kort – eftir endurskoðan,* og beina málið í býráðið umvegis staðbundnu nevndina.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 13. september 2021:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Kirkjubøar/Velbastaðarnevndin 27. september 2021:**

**Ein meiriluti:** Dánjal Pauli í Búðini, Eyðbjørn Gaard og Bryndis Hjartardsdóttir tekur ikki undir við at J og K umráði verða broytt til 4. grundumráði vegna væntandi kunning, men annars tekur nevndin undir við hinum punktunum.

**Ein minniluti:** Gunvør Balle tekur undir við tilmælinum.

**Ein minniluti:** Annfinn Brekkstein tekur undir við tilmælinum, men at J blívur standandi.

**Býráðsfundur 30. september 2021:** Samtykt uttan atkvøðugreiðslu at beina málið aftur i byggi- og býarskipanarnevndina.

**Ískoyti:**
Høvuðsendamálið við at endurskoða serstøku byggisamtyktirnar fyri bygdirnar, er at gera tær so eins sum gjørligt og at endurskoða tær í síni heild, soleiðis at tær eru í trá við almennu byggisamtyktina fyri Tórshavnar kommunu. Ein liður í at gera tær so eins sum gjørligt, er at leggja landbúnaðarøkini undir 4. grundumráði í almennu byggisamtyktini fyri Tórshavnar kommunu.

Sambært almennu byggisamtyktini § 26, stk. 5, liggja allar bygdirnar í kommununi í 4. grundumráði í Tórshavnar kommunu, og hava tær serstakar byggisamtyktir, ið stýra byggingini. Um serstaka byggisamtyktin fyri Velbastað skal vera í trá við almennu byggisamtyktina fyri Tórshavnar kommunu, er tað tískil eisini rættast, at taka landbúnaðarøkið úr serstøku byggisamtyktini fyri Velbastað.

Ásetingarnar fyri K: Landbúnaðarøki í verandi serstøku byggisamtyktini fyri Velbastað eru hesar:

13. gr., 1. Øki K er tað, sum eftir er av kommununi, tá frammanundan nevndu øki eru tikin frá, og verður tað nýtt til landbúnað, grótbrot, fiskaalistøðir o.a.

2. Loyvt er bert at byggja hús, ið eru neyðug til tess at tryggja fullgóðan rakstur av virkjum við teim endamálum, sum nevnd eru í stk. 1. Tó er loyvt at gera slík teknisk virki og hús, ið neyðug eru til ravmagns- og vatnveitingar, til burturveiting av skarnvatni og til telefon- og telegrafsamband og í sambandi við vegahald.

3. Hús og teknisk virki skulu vera soleiðis til útsjóndar og setast soleiðis í lendinum, at tey lýta landslagið minst gjørligt.

4. Útstykking má ikki fara fram.

Ásetingarnar fyri 4. Grundumráði í almennu byggisamtyktini fyri Tórshavnar kommunu eru hesar:

§26, 1. 4. Grundumráði verður í høvuðsheitum nýtt til landbúnað og alment frílendi og tilíkt.

2. Loyvt verður einans at byggja fjós, úthús og annað, sum hevur við vanligt traða- og jarðarbrúk at gera.

a) Tó er loyvt at umvæla verandi sethús og byggja somikið afturat teimum, at tey eru hóskilig til nútímans nýtslu sum sethús.
b) Á jarðarstykkjum oman fyri 5000 m$^2$ er í mesta lagi loyvt at byggja tilsamans 60 m$^2$ í gólvvídd harav kunnu verða eini frítíðarhús í sjálvstøðugum bygningi, ið er í mesta lagi 30 m$^2$ gólvvídd.
c) Á jarðarstykkjum undir 5000 m$^2$ er í mesta lagi loyvt at byggja tilsamans 30 m$^2$ gólvvídd, sum eisini kann vera frítíðarhús.
d) Eisini er loyvt at gera byggingar, sum neyðugar eru fyri alment gagnligar veitingar.
e) Harafturat kann onnur bygging og virksemi, sum ikki hóskar seg at liggja í bygdum øki, staðsetast í 4. Grundumráði.
f) Øll bygging í 4. Grundumráði sambært §26, stk. 2, litra d og e, skal gerast sambært serstakari byggisamtykt.

3. Hús og onnur bygging skulu vera soleiðis vorðin og sett soleiðis í landslagið, at tey lýta sum minst.

4. Í sambandi við bygging í 4. Grundumráði treytar kommuna sær rætt at seta krøv til skap og staðseting.

5. Í bygdunum Kaldbak, Kaldbaksbotni, Hvítanesi, Norðradali, Syðradali, Nólsoy, Hestur, Koltur, Kirkjubø og Velbastað kann, út um tað, ið er ásett fyri 4. Grundumráði, einans verða bygt sambært serstøkum byggisamtyktum.

Sum sæst, so eru ásetingarnar fyri 4. Grundumráði í almennu byggisamtyktini fyri Tórshavnar kommunu eitt sindur breiðari, enn tær fyri K: Landbúnaðarøki í serstøku byggisamtyktini fyri Velbastað, men annars loyva tær tí sama virkseminum, sum loyvt verður á landbúnaðarøki á Velbastað. Tí verður tað ikki mett at hava tað stóru ávirkanina á nýtsluna av økinum, um landbúnaðarøkið á Velbastað verður lagt undir 4. Grundumráði í almennu byggisamtyktini fyri Tórshavnar kommunu.

Eftir at málið varð samtykt á fundi í byggi- og býarskipanarnevndini, hava ásetingarnar fyri J: Bóndahús verið umrøddar – m.a. í staðbundnu nevndini fyri Kirkjubø/Velbastað.

Ásetingarnar fyri J: Bóndahús í serstøku byggisamtyktini fyri Velbastað eru hesar:

11. gr. 1. Øki verður lagt av til bygging í sambandi við djórahald og jarðarbrúk, og bert er loyvt at hava eini sethús til hvørt festi.

2. Sethúsini skulu annars lúka somu treytir, ið eru galdandi fyri øki B.

3. Útstykking má ikki fara fram.

Tað varð m.a. víst á, at ásetingarnar fyri J: Bóndahús geva festarunum størri frælsi til at umvæla sethús síni, enn ásetingarnar fyri 4. Grundurmáði geva. Tað hevur í eina tíð verið umrøtt, hvussu farast skal fram, tá nýggir festarar koma á festi, og fyrrverandi fara frá. Fráfarandi festararnir ynskja tíðum at yvirtaka sethúsini, ið teir hava bygt til festið, men teir fáa ikki loyvi til at matrikulera ognina frá festinum, av tí at tað ikki liggur í sethúsaøki í byggisamtyktini. Í mun til býarplanlegging, so metir man ikki, at tað er skynsamt at broyta økini kring sethús við festi til sethúsaøki, m.a. av tí at man við tíðini fer at fáa smáar býlingar á øki, sum ikki er ætlað býarmenningarøki. Tórshavnar kommuna hevur umrøtt hendan trupulleikan við Búnaðarstovuna, men inntil ein loysn er funnin, verður mett ráðiligt, at ásetingarnar fyri J: Bóndahús verða verandi í serstøku byggisamtyktini fyri Velbastað. Harafturat verður mælt til, at ásetingarnar fyri bóndahús verða settar í allar tær serstøku byggisamtyktirnar fyri bygdirnar.

**Tilmæli:**

Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til at samtykkja uppskotið til endurskoðan av byggisamtyktini fyri Velbastað smb. skjølunum *Serstøk byggisamtykt – tekstur* og *Kort – eftir endurskoðan*, við teirri broyting, at ásetingarnar fyri bóndahús verða varðveittar, og beina málið í býráðið.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 26. oktober 2021:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Býráðsfundur 28. oktober 2021:** Einmælt samtykt.

## 261/21 Almenn wc í Tórshavnar kommunu

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Tekniska nevnd | 24.02.2020 | 12/20 | 18/03758-1 |
| 2 Byggi- og býarskipanarnevndin | 24.02.2020 | 41/20 | 18/03758-1 |
| 3 Fíggjarnevndin | 27.02.2020 | 62/20 | 18/03758-1 |
| 4 Býráðsfundur | 27.02.2020 | 46/20 | 18/03758-1 |
| 5 Byggi- og býarskipanarnevndin | 04.10.2021 | 177/21 | 18/03758-1 |
| 6 Fíggjarnevndin | 20.10.2021 | 250/21 | 18/03758-1 |
| 7 Býráðsfundur | 28.10.2021 | 261/21 | 18/03758-1 |

**Upprunin til málið:**
Sum liður í ætlanini at gera býin enn meiri borgaravinarligan fyri borgarar ið ferðast í kommununi, umframt eisini fyri ferðafólk ið vitja, nú ferðavinnan vindur upp á seg, er ætlanin at betra um almennu vesiviðurskiftini í kommununi. Vesini skulu helst eisini verða løtt at viðlíkahalda.

Ynskiligt er, at vesihentleikar eru í økjum, har fólk eru bæði tá ið hugsað verður um býarrúmini í bygda umhvørvinum, men somuleiðis eisini um fríøkini og frítíðarøkini í kommununi. Kommunan hevur seinastu árini arbeitt í størri og størri mun fyri at gera fríøkini í kommununi meiri atkomulig til uppihald og fríløtur. M.a. kunnu ringurin kring Havnina og lendisgøtur í bygdunum nevnast, har vit bjóða borgaranum, ferðafólki og øðrum at njóta frílendini við gøtum og uppihaldi í fríu náttúruni.
Har almennir bygningar eru, eigur støða at verða tikin til, um vesi longu eru, sum kundu verði knýtt at einari heildarætlan í kommununi.

Tær loysnir, sum higartil hava verið brúktar í kommununi til almenn vesi, hava í stóran mun verið bygningar, bygdir á staðnum, tillagaðir til endamálið. Hendan loysnin hevur við sær, at ymiskar loysnir eru, og at viðlíkahaldið harvið kann gerast dýrari, men sjálvandi kann tað eisini gera at hesir bygningar hóska serliga væl til umhvørvið.

Langtíðar rakstur er týdningarmikil, og fyri at tryggja einfalt viðlíkahald av bygningunum, eigur at verða hugsað um standard loysnir, so at umvælingar og skiftan av eykalutum kann gerast á tryggan hátt, og at stórdriftsfyrimunir verða av valdu loysnini.
Farið eigur at verða undir at lýsa skipanina við almennum vesum, við atliti at bjóða raksturin og viðlíkahaldið út.

Støða skal takast til, um øll vesi skulu vera til rørslutarnað, og um skiftiumstøður skulu vera. Her verður bæði hugsað um vanligt blæuskift, men eisini um umstøður at skifta fjølbrekaðum við liggilegu og lyftiskinnara.
Umsitingin kemur at umrøða hendan spurningin við MEGD, áðrenn nakað verður sett í verk, soleiðis at vesini verða nøktandi til tey, ið hugsast at skula nýta vesini.

Miðað verður eftir at finna eina standard loysn, sum er einføld, vøkur á at líta, kend og haldbar.

2 dømi um loysnir eru funnin, har kostnaðurin fyri at framleiða hesi vesi, somuleiðis er fingin til vega.

Fyri at fáa nágreiniligan kostnað, er neyðugt at bjóða verkætlanina út, og fáa tilboð frá veitarum, bæði til framleiðslu av vesinum, men somuleiðis ein kostnað fyri uppseting og tað, ið hartil hoyrir. Møguliga verður kommunan partur av veitingini at seta vesini upp, tá hugsað verður um kloakkviðurskiftir osfr.

**Lýsing av heildarætlan**

Umsitingin hevur gjørt eitt yvirlit sum vísir verandi almenn vesi í kommununi, og eisini raðfestingar av, hvar mett verður at almenn vesi eiga at verða staðsett í framtíðini. Hugsað er um staðseting nærindis gøtuskipanir og virksemi í býnum, so sum frítíð- og ítrótt. Talan er bæði um almenn vesi í býarrúminum og eisini um almenn vesi úti í meira náttúrukendum øki og í bygdunum.

Nærri lýsing má gerast í hvørjum einstøkum føri, um møguligt er at knýta í kommunalu kloakkskipanina ella um skilabetri er at seta ein samlitanga upp, sum verður tømdur eftir tørvi. Tað kann eisini hugsast at vera skilagott at seta samlitanga upp til regnvatn, har langt er til kommunala vatnleiðing. Tað verður lýst nærri í hvørjum einstøkum føri.

Samlaður kostnaður fyri at seta eina royndareind upp er mettur til: 600-700 tkr.

| | |
|---|---|
| Keyp av vesieind til eitt vesi til rørslutarn er umleið: | 350-450 tkr. |
| Flutningur frá framleiðslu til Føroyar | 120 tkr. |
| Fyrireiking av lendi til at seta vesieindina á | 50 tkr. |
| Etablering av samlibrunni til frárenning | 50 tkr. |
| Íbindingar og íbindingargjald | 30 tkr. |

Ætlanin er at biðja um tilboð uppá keyp av fyrstu vesieindini, sum verður at seta upp á einum av støðunum, sum hava raðfesting 1.
Hetta kundi t.d. verið í Havnardali ella líknandi stað.

**Lógir, ásetingar o.a.**
Onga viðmerking

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**
Onga viðmerking

**Møgulig frávik/lættar frá ásetingum**
Onga viðmerking

**Umhvørvisárin**
Onga viðmerking

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**
Onga viðmerking

Áðrenn nakað arbeiði verður sett í verk, skulu øll loyvir fyriliggja og tryggjast skal, at almennu vesini uppfylla øll galdandi krøv, herundir eisini atkomu hjá rørslutarnaðum.

Kloakk- og aðrar leiðingar skal avtalast og skal samlitanga setast upp, sum verður tømdur eftir tørvi, so skal rottangatømingaskipanin góðkenna ætlanina, herundir hvussu ofta tað skal tømast, atkomu v.m.

**Skjøl**
18/03758-2 Heildarætlan almenn vesi í Tórshavnar kommunu.
18/03758-4 toilett heildarætlan og raðfesting (dagførd kort)

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** **(set x)**

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |

| | | | | |
|---|---|---|---|---|
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar: Ja ☒ Nei ☐**

Árlig játtan eigur at leggjast afturat til røkt og viðlíkahald á rakstrarkontu, sum varðar av almennu vesunum.

**Tilmæli:**

Tekniski stjórin, býarverkføðingurin og leiðarin á býarskipanardeildini mæla til,

- at tikið verður undir við heildarætlanini at betra um almennu vesiviðurskiftini í Tórshavnar kommunu og raðfestingini sambært skjali 18/03758-4, toilett heildarætlan og raðfesting.
- at játtaðar verða 550.000 kr. av konto 6275, fríðkan av kommununi L62037 framflutt íløga til brúgv oman fyri Sandagerði.
- at játtaðar verða 150.000 kr. av konto 6275, fríðkan av kommununi L00001 Løgujáttan fyri árið, til nýggja verkætlan, almenn vesi í Tórshavnar kommunu kto. 6275, til at gera eitt alment vesi í Havnardali.
- at heimila umsitingini at fara undir at bjóða ætlanina út og at seta hana í verk.
- At áðrenn fleiri nýggj wc verða tikin í nýtslu, skal ein rakstraræetlan fyriliggja og fígging til rakstur verða fingin til vega. Í hesum sambandi ger umsitingin eitt uppskot til at bjóða út raksturin av øllum almennum kommunalum toilettum í Tórshavnar kommunu.
- at beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Tekniska nevnd 24. februar 2020:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og at málið verður lagt fyri nevndina aftur, tá tilboðini fyriliggja.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 24. februar 2020:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og at málið verður lagt fyri nevndina aftur, tá tilboðini fyriliggja.

**Fíggjarnevndin 27. februar 2020:** Samtykt at taka undir við teknisku nevnd og byggi- og býarskipanarnevndini og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 27. februar 2020:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**

Verkætlanin L62041 er ikki byrjað, og játtaði peningurin upp á kr. 700.000 er í 2020 fluttur til aðra verkætlan. Verkætlanin skal tí lokast.

**Tilmæli:**

Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til at loka verkætlanina L62041, Almenn vesi í Tórshavnar kommunu, á konto 6275, og beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 04. oktober 2021:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 20. oktober 2021:** Samtykt at taka undir við byggi- og býarskipanarnevndini og beina málið í býráðið til kunninar.

**Býráðsfundur 28. oktober 2021:** Kunnað varð um málið.

## 262/21 Brúgv oman fyri Sandagerði

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Byggi- og býarskipanarnevndin | 08.05.2019 | 79/19 | 19/01667-3 |
| 2 Fíggjarnevndin | 15.05.2019 | 140/19 | 19/01667-3 |
| 3 Býráðsfundur | 23.05.2019 | 118/19 | 19/01667-3 |
| 4 Byggi- og býarskipanarnevndin | 04.10.2021 | 179/21 | 19/01667-3 |
| 5 Fíggjarnevndin | 20.10.2021 | 251/21 | 19/01667-3 |
| 6 Býráðsfundur | 28.10.2021 | 262/21 | 19/01667-3 |

**Upprunin til málið:**
Ynski hevur í longri tíð verið um at gøta verður gjørd um Sandá í Sandagerði fyri at nøktandi gonguleið verður frá Argjum yvirum ánna og soleiðis at tað verður lætt atkomuligt Havnamegin frá yvir til eitt nú Sjósavnið. Henda brúgv kemur somuleiðis at knýta seg í gøtuskipanina kring Havnina, sum arbeitt verður við.

**Lýsing av málinum – samandráttur**
Sum framhald í útbyggingini av gøtukervinum í Tórshavnar kommunu, er uppskot gjørt til at byggja brúgv um Sandá í Sandagerði, og gera samband við verandi gøtuskipan. Víst verður til skjal nr. 19-01667-2 Brúgv um Sandá

Ætlaða brúgvin og gøtusambandið liggur innanfyri forn- og náttúrufriðaða økið í Sandagerði, og skal ætlanin sostatt góðkennast av friðingarmyndugleikunum.

Uppskotið er, at brúgvin verður gjørd í sama sniði, sum aðrar brýr í grønu økjunum í býnum. Útvalda sniðið er einkult og byggitøkniliga er sniðið tillagað økið, soleiðis at ikki verður neyðugt at hava stuðlandi súlur niður í ánna.

**Lógir, ásetingar o.a.**
Økið er innanfyri friðingarlinjuna við Sandá, og nærri enn 100 m frá sjóvarmálanum.

**Upplýsingar frá umsitingini**
Vegleiðandi tilboð eru fingin til vega frá tveimum veitarum, sum hava gjørt aðrar brúgvar í kommununi. Hesir eru Jan Kann og Ólavur Reinert.
Ólavur Reinert bjóðar 286.600,- við fyrivarni fyri prísi av stáldragarum.
Jan Kann bjóðar 337.000,- uttan stáldragara og rekkverk.
Viðmerkjast skal, at kostnaðurin er sera óvissur, tí eitt veruligt prosjekt fyriliggur ikki. Sum skjal 19-01667-2 vísir, er ætlanin, at brúgvin spennir tvørturum ánna, uttan stuðul ávegis.
Statisk berokning má gerast at tryggja rætta dimensión á berandi dragarum. Kostnaðarmeting er gjørd við støði í lægra tilboðnum. Mett verður at samlaði kostnaðurin verður uml. 550.000 kr.
Grundgevingin fyri at kostnaðarmetingin er væl omanfyri tilboðið er, at sum omanfyri nevnt eru nógvar óvissur.

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**
-

**Møgulig frávik/léttar frá ásetingum**
-

**Umhvørvisárin:**
-

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**
Uppskot til brúgv um Sandá er sent til hoyringar hjá Yvirfriðingarnevndini, Búnaðarstovuni og Fornminnissavninum.

**Skjøl**
Víst verður til skjal nr. 19-01667-2 Brúgv um Sandá.

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum (set x)**

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | x | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | x | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar: Ja ☒ Nei ☐**

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til taka av bíligara tilboðnum frá Ólavi Reinert, at seta arbeiðið í verk, treytað av at loyvi verður givið frá avvarðandi myndugleikum, at játta kr. 550.000 av konto 6275, L00001, Løgukarmur fyri árið, til ráðgeving í sambandi við at avgera støddir á berandi skipanina og íverksetan av brúnni, og at beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 08. mai 2019:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 15. mai 2019:** Samtykt at taka undir við Byggi- og býarskipanarnevndini og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 23. mai 2019:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti**
Verkætlanin L62037 er ikki farin í gongd, og játtanin upp á kr. 550.000 er í 2020 flutt á aðra verkætlan. Verkætlanin L62037 skal tí lokast.

**Tilmæli**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til at loka verkætlanina L62037, Brúgv oman fyri Sandágerði, á konto 6275, og beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 04. oktober 2021:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 20. oktober 2021:** Samtykt at taka undir við byggi- og býarskipanarnevndini og beina málið í býráðið til kunningar.

**Býráðsfundur 28. oktober 2021:** Kunnað varð um málið.

## 263/21 Frílendið við Hoydalsá (2012-0881)

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Tekniska nevnd | 17.06.2014 | 205/14 | 14/00813-13 |
| 2 Tekniska nevnd | 23.06.2014 | 209/14 | 14/00813-13 |
| 3 Býráðsfundur | 25.06.2014 | 155/14 | 14/00813-13 |
| 4 Fíggjarnevndin | 24.06.2014 | 200/14 | 14/00813-13 |
| 5 Byggi- og býarskipanarnevndin | 03.10.2014 | 34/14 | 14/00813-13 |
| 6 Byggi- og býarskipanarnevndin | 20.11.2015 | 239/15 | 14/00813-13 |
| 7 Byggi- og býarskipanarnevndin | 08.01.2016 | 24/16 | 14/00813-13 |
| 8 Byggi- og býarskipanarnevndin | 04.10.2021 | 176/21 | 14/00813-13 |
| 9 Fíggjarnevndin | 20.10.2021 | 255/21 | 14/00813-13 |
| 10 Býráðsfundur | 28.10.2021 | 263/21 | 14/00813-13 |

**Lýsing av málinum - samandráttur:**
Tórshavnar býráð samtykti í 1972 at leggja økið til frílendi, at nýta til almenning, náttúrufriðing og mentunarlig endamál.
Í 1983 staðfesti Yvirfriðingarnevndin friðingarlinjur fram við ánni
Í 1995 var serstøk samtykt lýst á økið, um fríøkir, traðarbrúk og gróðursetingar.
Økisvídd: 300.000 m²
Longd: 4 km
Gøtur: 7 km
Eigaraviðurskifti: Tórshavnar kommuna, Føroya Jarðargrunnur, Føroya Landsstýri og privat ogn.
Jarðfrøði: Ovastu basaltfláir við sermerktum landslag skapt av jøkulsísi. Dalarnir eru 3 tilgróðnar gamlar tjarnir, sum í dag eita niðastu- mið- og ovastu Hoydalar (mús um Boðanesgjógv)

Hoydalsá var mark millum Hoyvík og Tórshavn, og ein av teimum størstu áunum í Føroyum. Tað hendir seg, at áin fer uppum áarbakkarnar og sæst hetta best í ovastu Hoydølum, tá tað regnar illa í toybili um veturin, tá kann allur slættin liggja undir í vatni.

Áin rennur úr Villingardali, um tveir fossar, Villingadalsfoss og Svartafoss, ígjøgnum Ternurygg og Hoydalar og á sjógv í Boðanesgjógv.

Miðað verður ímóti at áin er so rein, at sjósíl eru í ánni og at tálma útláti av dálkandi evnum í ánna. Fyrr komu sjósíl niðan til Svartafoss.

Fyrr varð sandur tikin úr ánni og koyrdur til Havnar við hestavogni til ymisk byggiarbeiðir.

Boðanesgjógv
Niðri við gjónna var í 1930'unum lýsismeltarí og síggjast leivdir av hesum enn, umframt at Tórshavnar Mekaniski Grótídnaður hevði grótbrot stutt omanfyri inntil mitt í 1980'unum.

Sanatoriið
Á fløtuni í niðasta Hoydali var um aldarskifti 1900 fyrsti fótbóltvøllur í Havn og um sama mundi varð tuberklastøðin, Sanatoriið í Hoydølum bygt. Tað lat aftur í 1965. Miðskeiðis í 1960'unum varð Studentaskúlin bygdur og er hann har enn.

Viðarlund varð byrjað eftir áheitan frá yvirlæknanum á sanatoriinum í 1913 og skipaði Det Danske Hedeselskab fyri gróðurseting av trøunum. ì 60'unum fekk plantagunevndin hjá løgtinginum ábyrgd av viðarlundini. Hetta var byrjan til gróðurseting av Hoydølum.

Skraddaratrøðin
Á Skraddaratrøðni er gamal urtagarður sum skraddarin Johannes Nolsøe lat gera í 1920-30. Hevði vogn við stórum hjólum sum hann dróg til Havnar at selja egg, róma, epli, gularøtur og avskorðin blómstur, heimaftur við hevði hann leivdir frá bakaríum at geva dýrunum. Eisini var ein stórur hylur sum varð brúktur at svimja í.

Gróðurstøðin
Í 1960 árunum var minkaaling har sum Skógrøkt Landsins nú hevur gróðurstøð til royndir við ymiskum træ og runnasløgum, ið hóska til føroyskt veðurlag.

Áin varð umløgd í sambandi við minkagarðin og kloakkskipan í niðastu Hoydølum.

Svartifossur
Eitt lýsandi Y í landslagnum, fleiri ferðir umrøddur av yrkjarum og nú ynda útferðarmál, eisini sum bakgrund til brúðarmyndir

Ternuryggur
Verandi urtagarðsskipan er frá 1930 árunum. Tann 23. juni í 1938 varð urtagarðsfelagið "Ternuryggur" stovnað við 130 stykkjum, harav nú 50 eru farin undir sethús.

**Ískoyti**
Í sambandi við fíggjarætlanarviðgerðina fyri 2011, vóru ymsar lidnar verkætlanir lokaðar av býráðnum 27. jan. 2011 (sí j. nr. 2010-2717), og avlopspeningur varð avsettur til aðrar verkætlanir í staðin – herundir ein ætlan um frílendi til borgaran á økinum við Hoydalsá. Umsitingin hevur síðani arbeitt við at eina skipanarætlan fyri lendini fram við ánni, soleiðis at tey vórðu borgarunum í býnum til bestu náttúru- og frítíðarupplivingar,  við íðkanarmøguleikum og rørslufremjandi tilboðum. À tann hátt til gagns fyri bæði heilsu og trivnaðin hjá borgarunum.

Býarskipanardeildin hevur gjørt uppskot í samráð við býararkitektin og lendisdeildina um at skipa økið

Tørvur er á at gera ítøkiligar staðsetingar, og at nágreina hvat innihaldið skal verða, fyri síðan at at meta um kostnaðin og hvussu verkætlanin kann fremjast stigvíst.

**Tilmæli.**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla nevndini til at taka undir við yvirskipaða leistinum fyri uppskotið til heildarætlanin "Frílendi við Hoydalsá", og arbeitt verður víðari við verkætlan at leggja fyri nevnd við kostnaðarmeting. Verkætlanin verður fíggjað av konto 6275-L62015.

Mikael Jacobæus var við til hetta mál.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 11. apríl 2012:** Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum.

Formaðurin ynskir málið á skrá.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 26. juni 2012:** Málið tikið av skrá.

**Ískoyti**
Arbeitt verður við málinum. Uppskot eru gjørt til fyribils kostnaðarmeting  og fyribils ætlan fyri økið. Kostnaðarmetingin er mett til uml kr. 1,5 mió. Skjal 2012-0881/8

**Tilmæli.**
Tekniski stjórin mælir til at raðfesta  játtan til verkætlanina á langtíðar íløgu ætlanini.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 3. september 2012:** Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býarskipanardeildin mæla til at játta avsetta peningin á íløguætlanini fyri 2014 til frílendisætlanina – kr. 1,0 mió. kr. á kontu 6275 – til at fara undir fremjan og fyrireiking av frílendisætlanini, so langt sum játtanin røkkur.

**Tekniska nevnd 17. juni 2014:** Útsett.

**Tekniska nevnd 23. juni 2014:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið um fíggjarnevndina í býráðið.

**Fíggjarnevnd 24. juni 2014:** Samtykt at taka undir við teknisku nevnd og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundir 25. juni 2014:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Fyrisitingin hevur arbeitt við ítøkiligum tiltøkum til tess at fremja frílendisætlanina í Hoydølum.

Ætlanin verður framd stigvíst og fevnir um hesar verkætlanir:

1. Skipan og gerð av frítíðarplássi við ymsum sløgum av skýlum og grúgvum. Frítíðarplássið er staðsett á matr.nr. 58a í Hoyvík, sum víst á kortinum, og er ætlað dagstovnum, skúlum, familjum í økinum og øðrum áhugaðum. Matrikulin er landsogn, men er við í makaskifti í sambandi við Skúladepilin. Løgdeildin arbeiðir við endaligari yvirtøku av matriklinum og uppsøgn av tí partinum av leigumálinum, sum verkætlanin kemur inn á. Sí fylgiskjal 1, 2, 3 og 4.
2. VC. Tað hevur stóran týdning fyri skúlar, stovnar og øll onnur, ið koma at brúka frítíðarplássið, at VC er á staðnum. Tílíkur VC-bygningur er við Sandágerði. Bygningurin verður staðsettur miðskeiðis á frítíðarplássinum, men fellir eisini væl inn í landslagið. VC skal vera opið um dagin, t.d. kl. 10-18. Sí fylgiskjal 1, 5 og 6.
3. Benkur. Benkur við pappírskurvum verða settir upp á ávísum støðum við góðum útsyni, og gøtur og lendisfesting verða gjørdar, har mett verður, at tað er neyðugt. Sí fylgiskjal 7.

Kostnaður til punkt 1-3 er fyribils mettur at vera 670.000 kr. Sí fylgiskjal 7.

Fyrisitingin setur fram uppskot um, at arbeitt verður víðari við rørsluøkinum. Fyri at kanna hvør áhugin er fyri einum rørsluøki, verða spurningar settir ítróttarfeløgum og fysioterapeutum um, hvussu rørsluøkið kann verða skipað, við forðingum og tilíkum. Síðani verður ítøkilig verkætlan gjørd. Tá verkætlanin er framd, verður økið opnað fyri almenninginum.

Skotið verður upp, at verkætlanaruppskotið, sum tað er, verður dagført, og at samstundis verður arbeitt víðari við eini langtíðarætlan fyri allan dalin. Endamálið við arbeiðinum er at skráseta dygdir og fyrimunir, sum longu eru í økinum, og at vísa á ymsar møguleikar at halda fram at skipa og menna frítíðarplássið í dalinum komandi 20 árini. Her verður hugsað um heilsubøtandi, mentanarligar og náttúrusøguligar møguleikar. Samstundis verður skrásett, hvørji áhugmál kommunan hevur í økinum, til dømis at ogna sær lendi, og at halda fram longur oman í dalin (Boðanesætlanin), og har tað ber til, at styrkja samleikan hjá Hoydølum sum heilsubøtandi øki.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin mælir til, at punkt 1, 2 og 3 verða framd, og at arbeitt verður víðari við at gera ætlan um náttúrurørsluøkið í samstarvi við tey ítróttarfeløg, ið eru áhugað. Harumframt verður arbeitt við at gera uppskot um heildarætlan fyri Hoydalar, frá Villingadalsvegnum til Hvítanesvegin.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 3. oktober 2014:** Samtykt at taka undir við punkt 1, 2 og 3 og at arbeitt verður víðari við at gera uppskot til heildarætlan fyri Hoydalar.

Halla Samuelsen luttók ikki í viðgerðini av málinum.

**Ískoyti:**
Umsitingin hevur gjørt uppskot og projekttilfar við kostnaðarmeting til toilettbygning við Svartafoss, (Sí skjal nr. 14/00813-25) sambært frílendisætlanina. Bygningurin verður fíggjaður yvir íløgukonto L 62023. Bygningurin verður boðin út í innboðnari lisitasjón. Innkomin tilboð verða løgd fyri nevnd á fyrsta regluliga fundi í nevndini.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 20. november 2015:** Kunnað varð um málið.

**Ískoyti:**
Arbeiðið til nýggjan toilettbygning uppi við Svartafoss, sum er partur av eini størri ætlan um "frílendið við Hoydalsá", er fyrireikað liðugt og sent út til bjóðandi. Útbjóðingartilfar er býtt upp í tríggjar partar: HVS, EL og eina stórentreprisu, sum umfatar lendisarbeiði, betong, timbur og málaraarbeiði.

Tilboðini verða Tórshavnar kommunu í hendi fríggjadagin tann 18.12.2015.

Sjálvt húsið minnir í innrætting nakað um toiletthúsið í Sandagerði, men skapið á húsinum er nakað øðrvísi.

Innkomnu tilboðini verða løgd fyri nevndina á fundinum

Tekniski stjórin ella býararkitekturin kemur at kunna um málið.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 08. januar 2016:** Útsett.

**Ísskoyti:**
2 tilboð eru komin inn. Sí hjálagt protokol frá lisitatión og kostnaðarætlan fyri lægsta tilboð.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til at taka av lægsta tilboðnum.

**Ískoyti:**
Verkætlanin er liðug fyri tíð síðan, og skal lokast. Ongin játtan er á kontuni, og ongin nýtsla hevur verið síðani 2018.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býarverkfrøðingurin mæla til at loka verkætlanina L62023, Frílendið við Hoydalsá, á konto 6275, og beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 04. oktober 2021:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 20. oktober 2021:** Samtykt at taka undir við byggi- og býarskipanarnevndini og beina málið í býráðið til kunningar.

**Býráðsfundur 28. oktober 2021**: Kunnað varð um málið**.**

## 264/21 Træplanting 2019, løguætlan 6275

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Byggi- og býarskipanarnevndin | 13.03.2019 | 38/19 | 19/00558-2 |
| 2 Fíggjarnevndin | 20.03.2019 | 84/19 | 19/00558-2 |
| 3 Býráðsfundur | 28.03.2019 | 69/19 | 19/00558-2 |
| 4 Byggi- og býarskipanarnevndin | 18.05.2020 | 95/20 | 19/00558-2 |
| 5 Fíggjarnevndin | 20.05.2020 | 132/20 | 19/00558-2 |
| 6 Býráðsfundur | 28.05.2020 | 105/20 | 19/00558-2 |
| 7 Byggi- og býarskipanarnevndin | 04.10.2021 | 178/21 | 19/00558-2 |
| 8 Fíggjarnevndin | 20.10.2021 | 256/21 | 19/00558-2 |
| 9 Býráðsfundur | 28.10.2021 | 264/21 | 19/00558-2 |

**Upprunin til málið:**
Skotið verður upp at fremja gróðurseting av 10.000 trøum og runnum á hesum økjum:

- Skúlin á Fløtum
- Kirkjugarðurin við Velbastaðvegin og í Hoyvík
- Myllutjørn/Dalurin Langi,
- Og øðrum økjum, so sum á Argjum og á Signabø

**Lýsing av málinum – samandráttur**
Ásannað verður at viðarvøkstir, trø og runnar skapa lívd, og gera fjølbroytni í umhvørvinum. Flottar summar- og vetrarmyndir, við vøkrum, vár- og heystarlitum, ið mynda gongdina í árinum. Frítíðar- og fríluftslívsumstøðurnar betrast, til spákingartúrar, rørsluítriv, íðkan og motión, upplivingar at merkja ymisleikan í veðrinum. Harumframt eisini møguleikar hjá fuglum at líva sær og reiðrast og fjølbroytni og margfeldni í floru og faunu. Í okkara grannalondum verður eisini ásannað, at viðarvøkstir gera mun at binda $CO_2$.

- 4000 stk. trø og runnar við nýggja Skúlan á Fløtum. Ætlanin er í samráð við verkætlanarbólkin av Skúlanum á Fløtum, skúlaumsitingina, børn og ung, og umhvørvisdeildina at seta plantingina á skrá nú í vár, soleiðis at trøini og runnarnir eru komin nakað fyri seg, tá skúlin letur upp á sumri 2020. Byggiverkætlanin fevnir um eina plantiætlan, og er partur av jørðarbeiðinum longu gjørt, soleiðis at tað er klárt at planta. Enn væntar tó neyv lýsing av, hvørji trø og runnar skulu plantast, umframt planleggingin av plantingini saman við umsitingini í skúlanum/skúlabørnunum. Kostnaðarmeting fyri plantingina er áljóðandi 200.000 kr. og tá er partur av verkætlanini goldin av byggiverkætlanini.

- 4000 stk. trø og runnar við báðar kirkjugarðarnar, Velbastaðvegur og í nýggja kirkjugarðinum í Hoyvík. Ætlanin er at planta 2000 plantur í hvørjum av kirkjugørðunum, nú teir báðir verða lidnir. Plantingarætlan ikki endaliga staðfest, og skal hetta gerast, áðrenn plantingin kann setast í gongd, men er ætlanin at náa at seta plantingina í gongd í vár. Kostnaðarmeting fyri planting av 4000 trøum og runnum er áljóðandi 200.000 kr.

- 1000 stk. trø og runnar í fríøkjunum við Myllutjørn/Dalurin Langi. Ynskiligt er, at fríøkið við Karlamagnusarbreyt Myllutjørn og partar av Dalinum Langa verður gróðursett, soleiðis at

økini verða hugalig og mennandi at uppihalda sær í. Kostnaðarmeting fyri plantingina er áljóðandi 50.000 kr.

- 1000 stk. trø og runnar í fríøkjum annars t.d. Signabøur, Argir. Harafturat eru fleiri økir, ið ynskja meiri planting, og er ætlanin at raðfesta hesa plantingina í 2019. Kostnaðarmeting fyri planting av 1000 trøum og runnum er áljóðandi 50.000 kr.

Samlaður kostnaður fyri plantukeyp og gróðurseting er áljóðandi 500.000 kr. Sí viðheftu kortskjøl, sum lýsa ætlaðu plantingina.

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** **(set x)**

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** **Ja ☒** **Nei ☐**

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til at taka undir við uppskotunum at raðfesta keyp og gróðurseting av plantum sambært omanfyri nevndu ætlan, og at játta 500.000 kr. av konto 6275, L00001 til planting í 2019 og at beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 13. mars 2019:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 20. mars 2019:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 28. mars 2019:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
**Sum framhald av træplanting í kommununi er ætlanin, at træplanting verður á hesum økjum í 2020.**

- Argir við brúnna og rundkoyringina 1200 stk. trø og runnar til vegskráan eystureftir við nýggju brúnna út á Argir. Ætlanin er at planta 1200 trø og runnar í vár. Kostnaðarmeting áljóðandi 60.000 kr.

- Havnardalur, 2000 stk. trø og runnar á nýggja skógfriðaða økið í Havnardali. Kostnaðarmeting áljóðandi 100.000 kr.

- Myllutjørn, 1300 stk. trø og runnar í fríøkið við Myllutjørn. Kostnaðarmeting áljóðandi 65.000 kr.

- Djúpagil, 2700 trø og runnar í Djúpagili við tjørnina norðan- og sunnanfyri gl. vatnbrunnin. Kostnaðarmeting áljóðandi 135.000 kr.

- Karlamagnusarbreyt, 1800 stk. trø og runnar í størri og smærri økjum í við Karlamagnusarbreyt.

Kostnaðarmeting áljóðandi 90.000 kr.

- Skúlin á Fløtum, 1000 trø og runnar við Skúlan á Fløtum, skúlin skipar fyri plantingini saman við næmingum.
  Kostnaðarmeting áljóðandi 50.000 kr.

**Skjøl:**
*Kort av træplanting 2020,* journal nr. 19/00558-10

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og leiðarin á býarskipanardeildini mæla til at taka undir við uppskotinum til raðfesting av træplanting sambært omanfyri nevndu ætlan, og at játta 500.000 kr. av konto 6275, L00001 til planting í 2020 og at beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 18. mai 2020:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 20. mai 2020:** Samtykt at taka undir við byggi- og býarskipanarnevndini og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 28. mai 2020**: Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Verkætlanin L62036 er liðug, og skal lokast. Játtaðar vóru kr. 500.000, og brúktar eru kr. 599.000. Avlopið er kr. 1.000.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til at loka verkætlanina L62036, Fríðkan av kommununi, træplanting, á konto 6275, flyta avlopið upp á kr. 1.000 á karmin, L00002, Framfluttur løgukarmur, ógreinað, á 6275, og beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 04. oktober 2021:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 20. oktober 2021:** Samtykt at taka undir við byggi- og býarskipanarnevndini og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 28. oktober 2021:** Kunnað varð um málið.

# 265/21 Kloakk á Signabø

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Tekniska nevnd | 07.10.2015 | 103/15 | 15/03637-1 |
| 2 Fíggjarnevndin | 21.10.2015 | 257/15 | 15/03637-1 |
| 3 Býráðsfundur | 29.10.2015 | 201/15 | 15/03637-1 |
| 4 Kollafjarðarnevndin | 19.10.2015 | 10/15 | 15/03637-1 |
| 5 Tekniska nevnd | 27.11.2018 | 66/18 | 15/03637-1 |
| 6 Fíggjarnevndin | 05.12.2018 | 357/18 | 15/03637-1 |
| 7 Býráðsfundur | 13.12.2018 | 316/18 | 15/03637-1 |
| 8 Tekniska nevnd | 04.10.2021 | 60/21 | 15/03637-1 |
| 9 Fíggjarnevndin | 20.10.2021 | 257/21 | 15/03637-1 |
| 10 Býráðsfundur | 28.10.2021 | 265/21 | 15/03637-1 |

**Málslýsing:**
Lýsing av málinum – samandráttur:
Sambært góðkendari spillivatnsætlan hjá TK, er ætlanin at fara undir arbeiðið at samla kloakkirnar á Signabø. Talan er um at savna verandi kloakk frárensl á Signabø í skipaða leiðing, sum verður leidd út á streymasjógv. Í løtuni verður stórur partur av spillivatni leitt út í á, sum munnar út í fjøruna.

**Fíggjarlig viðurskifti:**
Arbeiðið er mett at kosta kr. 0,35 mió. og er ynski um at fáa heimild at fáa Martin E. Leo at gera útbjóðingartilfar klárt, at bjóða arbeiðið út í innbodnari lisitatión.

Samlaða upphæddin fyri markaðum íløgum fyri kloakkir í 2015 er 3 mió. kr. og er ætlanin at nýta 0,35 mió. kr. til prosjektering fyri dagføring av útleiðingunum.

Sambært fíggjarligu uppgerð, j. nr. 15/03637-3 verður samlaði fíggjartørvurin fyri at gera útbjóðingartilfar kr. 0,35 mió. (við 6,25% MVG).

## Tilmæli:
Tekniski stjórin og býarverkfrøðingurin mæla til, at játta kr. 0,35 mió. av markaðum íløgum fyri kloakkir fyri 2015, konto 6875 (Kloakkir) og at beina málið, um fíggjarnevndina, í býráðið.

**Tekniska nevnd 07. oktober 2015:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Kollafjarðarnevndin 19. oktober 2015:** Umboð frá teknisku deild greiddi frá málinum.

**Fíggjarnevndin 21. oktober 2015:** Samtykt at taka undir við teknisku nevnd og játta kr. 350.000 av markaðum íløgum fyri kloakkir fyri 2015. konto 6875 (kloakkir) og at beina málið í býráðið.

**Býráðsfundir 29. oktober 2015:** Einmælt samtykt

**Ískoyti:**
Prosjektið við at savna kloakkirnar á Signabø í skipaða leiðing, sum verður veitt út á streymasjógv fyri at lúka krøvunum frá Umhvørvisstovuni í samband við spillivatnsætlanina, er liðugt.

Umsitingin hevur avgjørt at bjóða 1. Byggistig at savna kloakkirnar á Signabø út í innbodnari lisitatión j.nr. 15/03637-7

1. Byggistig umfatar savnan, tyrving og leggjan av kloakkleiðingum brunnum, pumpubrunni og írenningarkummu, herundir, útleiðing á sjógv eystanfyri bátahylin. Somuleiðis dagføring av undirføringum á strekkinum har arbeitt verður á strekkinum frá á Signabø 18 og eystureftir framvið bátahylin.

Lisitatión varð hildin 5. nov. 2018 á skrivstovuni hjá Martin E. Leo. Víst verður til lisitatiónsprotokoll j.nr. 15/03637-9.

Av innkomnum tilboðum var lægsta boð frá Sp/f Maskingrevstur v/ Frank Hellisdal uml. kr. 3,1 mió. J.nr. 15/03637-10

Umsitingin kunnar um prosjekt og tilmæli frá ráðgeva j.nr. 15/03637-11

**Fíggjarviðurskifti:**
Sambært fíggjarligu uppgerð j.nr. 15/03637-12 verður samlaði fíggjartørvurin fyri 1. byggistig kr. 3,85 mió. (v/6,25% mvg). Samlaða upphæddin fyri markaðum íløgum fyri kloakkir 2018 er kr. 10 mió.
Biðið verður um kr. 3,85 av markaðum íløgum fyri kloakkir 2018, konto 6875 (kloakkir)

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býarverkfrøðingurin mæla til at játta kr. 3,85 mió. av markaðum íløgum fyri kloakkir 2018 konto 6875 (kloakkir) og beina málið um fíggjarnevndina í býráðið.

**Tekniska nevnd 27. november 2018:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 05. desember 2018:** Samtykt at taka undir við teknisku nevnd og beina málið í býráðið.

Helena Dam á Neystabø luttók ikki í viðgerðini av málinum.

**Býráðsfundur 13. desember 2018:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti**
Verkætlanin L68027, Kloakk á Signabø, er liðug og er klár at loka. Verkætlanin gevur eitt avlop uppá kr. 32.401.

**Tilmæli**
Tekniski stjórin og býarverkfrøðingurin mæla til at loka verkætlanina L68027, flyta avlopið á kr. 32.401 á karmin L00001 á konto 6875, og beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Tekniska nevnd 04. oktober 2021:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 20. oktober 2021:** Samtykt at taka undir við teknisku nevnd og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 28. oktober 2021:** Kunnað varð um málið.

# 266/21 Planlegging av kloakkskipan á Stadionøkinum

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Tekniska nevnd | 29.11.2016 | 114/16 | 16/04347-1 |
| 2 Fíggjarnevndin | 07.12.2016 | 433/16 | 16/04347-1 |
| 3 Býráðsfundur | 15.12.2016 | 345/16 | 16/04347-1 |
| 4 Tekniska nevnd | 28.11.2017 | 76/17 | 16/04347-1 |
| 5 Fíggjarnevndin | 06.12.2017 | 298/17 | 16/04347-1 |
| 6 Býráðsfundur | 14.12.2017 | 299/17 | 16/04347-1 |
| 7 Tekniska nevnd | 06.02.2018 | 7/18 | 16/04347-1 |
| 8 Fíggjarnevndin | 21.02.2018 | 46/18 | 16/04347-1 |
| 9 Býráðsfundur | 01.03.2018 | 41/18 | 16/04347-1 |
| 10 Býráðsfundur | 22.03.2018 | 69/18 | 16/04347-1 |
| 11 Tekniska nevnd | 11.09.2018 | 48/18 | 16/04347-1 |
| 12 Tekniska nevnd | 04.10.2021 | 61/21 | 16/04347-1 |
| 13 Fíggjarnevndin | 20.10.2021 | 258/21 | 16/04347-1 |
| 14 Býráðsfundur | 28.10.2021 | 266/21 | 16/04347-1 |

**Málslýsing:**
Í sambandi við byggivirksemi á stadionøkinum í Gundadali er neyðugt at gera broytingar í kloakkskipanini á staðnum. Hetta er at taka støðu til umleggingar av verandi reinsiverki, somuleiðis umleggja og økja um dimensiónir av verandi  og komandi kloakk- og yvirflatuvatns-leiðingum.

Fíggjarlig viðurskifti:
Samlaði fíggjartørvurin fyri arbeiðið er mettur til kr. 200.000,- sambært fíggjarligu uppgerð j.nr. 16/04347-3 og er ynskið at taka av tilboð frá PB-Consult at gera uppskot til loysn. J.nr. 16/04347-1

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin mælir til at játta kr. 200.000,- av markaðum íløgum fyri kloakkir fyri 2016, konto 6875 (Kloakkir)  og beina málið, um fíggjarnevndina, í býráðið.

**Tekniska nevnd 29. november 2016:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 07. december 2016:** Samtykt at taka undir við teknisku nevnd og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 15. desember 2016:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
PB-Consult hevur lýst støðuna og vísir á loysn í samband við umlegging og dagføring av kloakkskipanini á Stadionøkinum í Gundadali, j.nr. 16/0347-7. Tekniska deild ynskir at halda fram við arbeiðinum og at fáa ráðgeva at gera prosjekt klárt til útbjóðing.

**Fíggjarlig viðurskifti:**
Samlaði fíggjartørvurin fyri arbeiðið er mettur til kr. 250.000,- sambært fíggjarligu uppgerð og er ynskið at taka av tilboð frá PB-Consult at gera uppskot til loysn. j.nr. 16/04347-7.

**Tilmæli:**
Býarverkfrøðingurin mælir til at játta kr. 250.000,- av markaðum íløgum fyri kloakkir fyri 2017, konto 6875 (Kloakkir)  og beina málið, um fíggjarnevndina, í býráðið.

**Tekniska nevnd 28. november 2017:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

Annfinn Brekkstein luttók ikki í viðgerðini av málinum.

**Fíggjarnevndin 06. desember 2017:** Samtykt at taka undir við teknisku nevnd og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 14. desember 2017:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Í sambandi við byggivirksemi á stadionøkinum í Gundadali er neyðugt at gera broytingar í kloakkskipanini á staðnum. Hetta er at taka støðu til umleggingar av verandi reinsiverki, somuleiðis umleggja og økja um dimensiónir av verandi og komandi kloakk- og yvirflatuvatns-leiðingum

PB-Consult hevur lýst støðuna og vísir á loysn í sambandi við umlegging og dagføring av kloakkskipanini á Stadionøkinum í Gundadali, j.nr. 16/0347-7. Tekniska deild ynskir at halda fram við arbeiðinum, sambært uppskot 3, j.nr. 16/0347-7, og hevur sett ráðgeva gera prosjekt klárt til útbjóðing.

**Fíggjarlig viðurskifti:**
Samlaði fíggjartørvurin fyri arbeiðið er mettur til kr. 5 mió. - sambært fíggjarligu uppgerð16/04347-12, og ynskir umsitingin at fáa heimild at bjóða arbeiðið út.

**Tilmæli:**
Býarverkfrøðingurin og virkandi tekniski stjórin mæla til at játta kr. 5 mió. til projektið. Herav. 2 mió. kr. av markaðum íløgum fyri kloakkir fyri 2018, konto 6875 (Kloakkir);
2 mió. kr. av konto 6175 umsiting og røkt av bygningum og restin (uml. 1 mió. kr.) av verkætlan fyri Tórsvøll vestara síða L57026 og beina málið, um fíggjarnevndina, í býráðið.
Umsitingin ynskir at fáa heimild at bjóða arbeiðið út í innbodnari lisitatión, at taka av lægsta tilboði og seta arbeiðið í gongd. Ætlandi skal arbeiðið byrja í vár, fyri ikki at fáa óneyðugar seinkingar í arbeiði at víðka um Tórsvøll.

**Tekniska nevnd 06. februar 2018:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 21. februar 2018:** Samtykt at taka undir við teknisku nevnd og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 01. mars 2018:** Einmælt samtykt.

**Býráðsfundur 22. mars 2018:** Einmælt samtykt.

Bergun Kass og Heðin Mortensen luttóku ikki í viðgerðini av málinum.

**Ískoyti**:
PB-Consult hevur gjørt projekt klárt til útbjóðing j.nr. 16/04347-17.
Grundað á at ein partur av projektinum er innanfyri arbeiðstøkumark hjá Tórsvølli samstundis sum tað grensar uppat arbeiðstøkuna bæði norðanfyri og sunnanfyri arbeiðstøkumark við Tórsvøll, var avgjørt í samráð við býarverkfrøðingin og virkandi tekniska stjóran at bjóða projektið út til arbeiðstakaran av Tórsvølli P/F J&K Petersen.
Arbeiðið var boðið út 20. juli 2018, j.nr. 16/04347-17 og tilboð kom inn aftur 27. aug. 2018, j.nr.16/04347-18. Tilboðið var áljóðandi kr. 4.521.457,64 u/mvg og metingin var 4,8 mió. kr. u/mvg

PB-Consult hevur saman við málsviðgera á teknisku deild, gjøgnumgingið tilboðið, j.nr. 16/04347-18, og gjørt eina innstilling j.nr. 16/04347-19,
Kostnaðurin fyri projektið er undir metingina og mælir ráðgevi og umsiting til, at tikið verður av tilboðnum, j.nr. 16/04347-19.

**Tilmæli**:
Virkandi tekniski stjórin og býarverkfrøðingurin mæla til at tikið verður av tilboðnum frá J&K Petersen, j.nr. 16/04347-18, áljóðandi kr. 4.521.457,64, u/mvg og geva umsitingini heimild at fara undir sáttmálasamráðingar og fyrireika sáttmála.

**Tekniska nevnd 11. september 2018:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Ískoyti**
Verkætlanin L68034, Planlegging av kloakkskipan á Stadionøkinum, bleiv stovnað í sambandi við framhaldandi uppíbygging av Tórsvølli. Umframt hesa verkætlan, er eisini ein onnur kloakk-verkætlan fyri økið, L68029, kloakkskipan á Stadionøkinum. Arbeiðið er í gongd, og verður væntandi liðugt fyrst í komandi ár. Verkætlærnirnar eiga at verða lagdar saman í eina verkætlan.

**Tilmæli**
Tekniski stjórin og býarverkfrøðingurin mæla til at loka verkætlanina L68034 (konto 6875), flyta avlopið á kr. 250.000, á L68029 (konto 6875), Kloakkskipan á Stadionøkinum, sum framhaldandi verkætlan, og beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Tekniska nevnd 04. oktober 2021:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 20. oktober 2021:** Samtykt at taka undir við teknisku nevnd og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 28. oktober 2021:** Kunnað varð um málið.

| | | |
|---|---|---|
| | **Býráðsfundur**<br>28. oktober 2021 | Blað nr.: 1054 |
| | | Formansins merki: |

# 267/21 Umskipan av kloakk frá Óðinshædd til Boðaneshamar

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Tekniska nevnd | 28.11.2017 | 75/17 | 17/03875-1 |
| 2 Fíggjarnevndin | 06.12.2017 | 299/17 | 17/03875-1 |
| 3 Býráðsfundur | 14.12.2017 | 296/17 | 17/03875-1 |
| 4 Tekniska nevnd | 04.10.2021 | 62/21 | 17/03875-1 |
| 5 Fíggjarnevndin | 20.10.2021 | 259/21 | 17/03875-1 |
| 6 Býráðsfundur | 28.10.2021 | 267/21 | 17/03875-1 |

**Upprunin til málið:**
Økt byggivirksemi á Óðinshædd til Boðaneshamar

**Lýsing av málinum – samandráttur**
Í sambandi við økt byggivirksemi á Óðinshædd til Boðaneshamar j.nr. 17/03875-2 og 17/03875-3 er neyðugt hjá TK at leggja nýggja kloakk til útstykking hjá Bústaðir, samstundis sum verandi kloakk- og regnvatnsleiðingar á økinum mugu umleggjast og dagførast.

Umsitingin ynskir at bjóða arbeiðið út til ráðgeva at lýsa tørvin og at gera uppskot til loysn.

**Lógir, ásetingar o.a.**
Eingin viðmerking.

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

**Møgulig frávik/lættar frá ásetingum**
Eingin viðmerking

**Umhvørvisárin.**
Betri skipan av kloakk- og yvirflatuvatnleiðingum.

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**
Eingin viðmerking.

**Skjøl**
j.nr. 17/03875-2
j.nr. 17/03875-3

**Fíggjarlig viðurskifti:**
Mett verður at samlaði fíggjartørvurin fyri at bjóða arbeiðið út til ráðgeva at gera projektuppskot til loysn er kr. 300.000.

**Tilmæli:**
Býarverkfrøðingurin mælir til at játta kr. 300.00,- av markaðum íløgum fyri kloakkir 2017, konto 6875 (Kloakkir) og beina málið, um fíggjarnevndina, í býráðið.

**Tekniska nevnd 28. november 2017:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

Annfinn Brekkstein luttók ikki í viðgerðini av málinum.

**Fíggjarnevndin 06. desember 2017:** Samtykt at taka undir við teknisku nevnd við teirri broyting, at játtanin skal av markaðum íløgum fyri kloakkir 2018 og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 14. desember 2017:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti**
Peningur bleiv í 2018 játtaður til Verkætlanina L68033, Umskipan av kloakk frá Óðinshædd til Boðaneshamar. Ætlanin var at kanna eina loysn við at umleggja kloakk og regnvatn, men hetta ikki farið í gongd enn. Um aktuelt, verður hetta tikið upp aftur seinni. Saldoin á verkætlanini er kr. 238.000.

**Tilmæli**
Tekniski stjórin og býarverkfrøðingurin mæla til at loka verkætlanina L68033, flyta avlopið á kr. 238.000 á karmin L00001 á konto 6875, og beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Tekniska nevnd 04. oktober 2021:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 20. oktober 2021:** Samtykt at taka undir við teknisku nevnd og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 28. oktober 2021:** Kunnað varð um málið.

# 268/21 Dagføring av kloakk í Tróndargøtu

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Tekniska nevnd | 08.05.2018 | 28/18 | 18/01774-1 |
| 2 Fíggjarnevndin | 18.05.2018 | 150/18 | 18/01774-1 |
| 3 Býráðsfundur | 24.05.2018 | 125/18 | 18/01774-1 |
| 4 Tekniska nevnd | 04.10.2021 | 63/21 | 18/01774-1 |
| 5 Fíggjarnevndin | 20.10.2021 | 260/21 | 18/01774-1 |
| 6 Býráðsfundur | 28.10.2021 | 268/21 | 18/01774-1 |

**Upprunin til málið:**
Í sambandi við dagføring av kloakkum í Tórshavnar kommunu eru ætlanir at fara undir at dagføra kloakkirnar í Tróndargøtu.

**Lýsing av málinum – samandráttur**
Staðfest er at kloakkirnar í Tróndargøtu eru í sera ringum standi og at íbúgvar í økinum hava trupulleikar av hesum.
Umsitingin hevur saman við ráðgeva kannað og skrásett kloakkirnar og kistuna frá Jóannesar Paturssonar gøtu til Bøgøtu.
Umsitingin saman við ráðgeva, hava gjørt prosjekt klárt til útbjóðing j.nr. 18/01774-2

Ynski er at fara í gongd við arbeiðið beinanvegin, og tí er prosjektið boðið út við treytum um góðkenning frá viðkomandi nevndum og býráði.

Tá tað er nógv handilsvirksemi í økinum, er átrokandi at fáa møguleikan at byrja beinanvegin, fyri at arbeiðið kann verða komið væl ávegis áðrenn ólavsøku og verða liðugt áðrenn jólasølan byrjar.
Treyt í útboði er, at grevstrararbeiðið verður gjørt í samráð við handilsfelagið í miðbýnum soleiðis, at tað órógvar virksemi í økinum sum minst.

Fíggjartørvur fyri verkætlanina er mettur til 2,6 mió. kr. j.nr. 18/01774-3

**Skjøl**
Útboðstilfar j.nr. 18/01774-2
Fíggjartørvur j.nr. 18/01774-3

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** (set x)

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar: Ja ☐ Nei ☒**

**Tilmæli:**
Virkandi tekniski stjórin og býarverkfrøðingurin, mæla til at:
- Játta 2,6 mió. kr. av markaðum íløgum fyri kloakkir 2018, konto 6875.
- Taka av lægsta tilboðnum og seta arbeiðið í gongd.

- Beina málið um fíggjarnevndina í býráðið.

**Tekniska nevnd 08. mai 2018:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 18. mai 2018:** Samtykt at taka undir við teknisku nevnd og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 24. mai 2018:** Einmælt samtykt.

Annika Olsen boðaði frá, at hon er ógegnig og luttók ikki í viðgerðini av málinum.

**Ískoyti**
Verkætlanin L68035, Kloakk í Tróndargøtu, er liðug, og er klár at loka. Verkætlanin gevur eitt avlop uppá kr. 318.000.

**Tilmæli**
Tekniski stjórin og býarverkfrøðingurin mæla til at loka verkætlanina L68035, flyta avlopið á kr. 318.000 á karmin L00001 á konto 6875, og beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Tekniska nevnd 04. oktober 2021:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 20. oktober 2021:** Samtykt at taka undir við teknisku nevnd og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 28. oktober 2021:** Kunnað varð um málið.

| | Býráðsfundur<br>28. oktober 2021 | Blað nr.: 1058<br><br>Formansins merki: |
|---|---|---|

# 269/21 Dagføring av kloakk í Bringsnagøtu

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Tekniska nevnd | 08.05.2018 | 29/18 | 18/01775-1 |
| 2 Fíggjarnevndin | 18.05.2018 | 151/18 | 18/01775-1 |
| 3 Býráðsfundur | 24.05.2018 | 126/18 | 18/01775-1 |
| 4 Tekniska nevnd | 04.10.2021 | 64/21 | 18/01775-1 |
| 5 Fíggjarnevndin | 20.10.2021 | 261/21 | 18/01775-1 |
| 6 Býráðsfundur | 28.10.2021 | 269/21 | 18/01775-1 |

**Upprunin til málið:**
Í sambandi við dagføring av kloakkum í Tórshavnar kommunu eru ætlanir at fara undir at dagføra kloakkirnar í Bringsnagøtu.

**Lýsing av málinum – samandráttur**
Staðfest er at kloakkirnar í Bringsnagøtu krevja ábøtur og er ynski at fara undir at dagføra hesar. Arbeiðið er átrokandi, tá nógv matstovuvirksemi v.m. er í økinum.

Arbeiðið umfatar at
Dagføra kloakk- og nýggja regnvatnsleiðing.
Skráseta og staðfesta hvørjar ábøtur eru neyðugar.
Fáa ráðgeva at gera prosjekt klárt til útbjóðing.

Ynski er at farið verður undir at prosjektera beinanvegin og at arbeiðið verður boðið út at byrja í heyst.

Samlaði fíggjartørvurin fyri arbeiðið at gera prosjekt klárt til útbjóðing er mettur til kr. 280.000,-.

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

**Umhvørvisárin**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl**

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum (set x)**

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| Umsitingaravleiðingar | | | | |
| Umhvørvisavleiðingar | | | | |
| Sosialar avleiðingar | | | | |
| Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar: Ja ☐ Nei ☐**

**Tilmæli:**

Virkandi tekniski stjórin og býarverkfrøðingurin mæla til at játta kr. 280.000,- av markaðum íløgum fyri kloakkir 2018, konto 6875, gera prosjekt klárt at bjóða út, og beina málið um fíggjarnevndina í býráðið.

**Tekniska nevnd 08. mai 2018:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 18. mai 2018:** Samtykt at taka undir við teknisku nevnd og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 24. mai 2018:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti**
Peningur bleiv í 2018 játtaður til Verkætlanina L68036, Dagføring av kloakk í Bringsnagøtu. Ætlanin var at kanna eina loysn við at kanna kloakkviðurskiftini, men hetta ikki farið í gongd enn. Um aktuelt, verður hetta tikið upp aftur seinni. Saldoin á verkætlanini er kr. 227.000.

**Tilmæli**
Tekniski stjórin og býarverkfrøðingurin mæla til at loka verkætlanina L68036, flyta avlopið á kr. 227.000 á karmin L00001 á konto 6875, og beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Tekniska nevnd 04. oktober 2021:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 20. oktober 2021:** Samtykt at taka undir við teknisku nevnd og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 28. oktober 2021:** Kunnað varð um málið.

| | Býráðsfundur<br>28. oktober 2021 | Blað nr.: 1060<br><br>Formansins merki: |
|---|---|---|

# 270/21 Orkuumvæling í Svimjihøllini – Knýta svimjihøllini í fjarhita

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Byggi- og býarskipanarnevndin | 30.05.2018 | 150/18 | 18/01992-1 |
| 2 Fíggjarnevndin | 13.06.2018 | 181/18 | 18/01992-1 |
| 3 Býráðsfundur | 20.06.2018 | 161/18 | 18/01992-1 |
| 4 Byggi- og býarskipanarnevndin | 04.10.2021 | 180/21 | 18/01992-1 |
| 5 Fíggjarnevndin | 20.10.2021 | 264/21 | 18/01992-1 |
| 6 Býráðsfundur | 28.10.2021 | 270/21 | 18/01992-1 |

**Upprunin til málið:**
Sí niðanfyri.

**Lýsing av málinum – samandráttur**
Í sambandi við at fjarhita leiðingarnar eru lagdar niðri í Gundadali verður arbeitt við at knýta kommunalu bygningarnar í fjarhitan hjá Fjarhitafelagnum, í 2018 er ætlanin at knýta svimjihøllini í Fjarhitan. Svimjihøllin hevur størstu orkunýtslu av teimum kommunalu bygninginum.

Kostnaðarmetingin fyri samlaðu verkætlanina er 1.135.000,- kr.

Húsaumsitingin hevur avsett 135.000,- kr. til hesa orkuumvælingina í 2018.

**Lógir, ásetingar o.a.**
Eingir

**Upplýsingar frá umsitingini**
Eingir

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**
Eingin

**Møgulig frávik/lættar frá ásetingum**
Eingir

**Umhvørvisárin**
Svimjihøllin fær grøna orku, og hetta minkar um $CO_2$ útlátið uml. 9 ferðir

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**
Eingir

**Skjøl**

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** (set x)

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | | | |

| | |
|---|---|
| **Býráðsfundur**<br>28. oktober 2021 | Blað nr.: 1061 |
| | Formansins merki: |

**Fíggjarligar avleiðingar:** **Ja** ☒ **Nei** ☐

Tórshavnar Kommuna hevur avtalu við Magn, ið inniber at oljukostnaðurin er lægri enn fjarhitakostnaðurin er í løtuni. Tað merkir, at svimjihøllin fær ein eyka kostnað fyri raksturin av fjarhitanum.
Harafturímóti verður minni viðlíkahald av tí man sleppur undan skorsteininum, ketlinum og oljutanganum.

**Tilmæli:**
Virkandi tekniski stjórin og leiðarin á Húsaumsitingini mæla til at játta 1.0 mió. til hesa verkætlan av 6177, sum er ætlað ESCO Orku og umhvørvistiltøk.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 30. mai 2018:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 13. juni 2018:** Samtykt at taka undir við byggi- og býarskipanarnevndini og beina málið í býraðið til tvær viðgerðir, sum eykajáttan.

**Býráðsfundur 20. juni 2018:** Einmælt samtykt at taka undir við fíggjarnevndini og játta kr. 1,0 mió. av konto 6177.

**Ískoyti:**
TK hevur lagt um til fjarhita í Svimjihøllini og gjørt aðrar orkubetringar. Arbeiðið er nú liðugt, og verkætlanin kann lokast. Játtaðar vóru 1.000.000 kr. og brúktar eru 1.064.000 kr. Verkætlanin gevur eitt hall upp á 64.000 kr.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin mælir til at loka verkætlanina L61700, Orkuumvæling í Svimjihøllini, á konto 6177, og at hallið verður flutt á karmin á konto 6177, og at beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 04. oktober 2021:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 20. oktober 2021:** Samtykt at taka undir við byggi- og býarskipanarnevndini og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 28. oktober 2021:** Kunnað varð um málið.

| | |
|---|---|
| **Býráðsfundur**<br>28. oktober 2021 | Blað nr.: 1062<br><br>Formansins merki: |

# 271/21 Fjarhiti til Býlingshúsið vesturi á Flat, matr. nr. 1xæ, Hoyvík

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Náttúru- og umhvørvisnevndin | 06.05.2019 | 20/19 | 19/01619-1 |
| 2 Fíggjarnevndin | 15.05.2019 | 134/19 | 19/01619-1 |
| 3 Býráðsfundur | 23.05.2019 | 120/19 | 19/01619-1 |
| 4 Náttúru- og umhvørvisnevndin | 05.10.2021 | 38/21 | 19/01619-1 |
| 5 Fíggjarnevndin | 20.10.2021 | 265/21 | 19/01619-1 |
| 6 Býráðsfundur | 28.10.2021 | 271/21 | 19/01619-1 |

**Upprunin til málið:**
Umhvørvispolitikkurin 'Grøna Leiðin' hjá Tórshavnar kommunu.

**Lýsing av málinum – samandráttur**
Hetta er eitt átak fyri umhvørvinum í sambandi við ætlanina, at minka um $CO_2$ útlátið og dálking, somuleiðis røkka málinum at knýta kommunalu bygningarnar í fjarhitan hjá Fjarhitafelagnum ella aðrar varandi orkukeldur. Tí er ætlanin at knýta Býlingshúsið vesturi á Flat í fjarhitan, tá útbyggingin við at víðka stovnin verður sett í verk.

Kostnaðarmetingin fyri samlaðu verkætlanina er 425.000,- kr.

**Lógir, ásetingar o.a.**
Eingir

**Upplýsingar frá umsitingini**
Eingir

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**
Lendisarbeiði tá Býlingshúsið vesturi á Flat verður útbygt í 2019.

**Møgulig frávik/lættar frá ásetingum**
Eingir

**Umhvørvisárin**
Býlingshúsið vesturi á Flat fær grøna orku, og hetta minkar um $CO_2$ útlátið uml. 9 ferðir

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**
Eingir

**Skjøl**

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** (set x)

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | X | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | X | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | x | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** **Ja** ☒ **Nei** ☐

Tórshavnar kommuna hevur avtalu við Magn, ið inniber at oljukostnaðurin er lægri enn fjarhitakostnaðurin í løtuni.
Tað merkir, at barnagarðurin fær ein eyka kostnað fyri raksturin av fjarhitanum.
Harafturímóti verður minni viðlíkahald av hitaskipan, skorsteini og oljutanga.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og leiðarin á Húsaumsitingini mæla til:

- at játta 425.000 kr. til hesa verkætlan av kontu 6177 Umsiting og røkt av bygningum, orkuloysn.
- at geva umsitingini heimild, at taka av tilboði og undirskriva sáttmála við arbeiðstakara.
- og at beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Náttúru- og umhvørvisnevndin 06. mai 2019:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.
Turið Horn luttók ikki í viðgerðini av málinum.

**Fíggjarnevndin 15. mai 2019:** Samtykt at taka undir við Nátturu- og umhvørisnevndini og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 23. mai 2019:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
TK hevur lagt um til fjarhita í Býlingshúsinum vesturi á Flat. Arbeiðið er nú liðugt, og verkætlanin kann lokast. Játtaðar vóru 425.000 kr. og brúktar eru 191.000 kr. Verkætlanin gevur eitt avlop uppá 234.000 kr.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og leiðarin fyri bygningsdeildina mæla til at loka verkætlanina L61701 á konto 6177, og at avlopið verður flutt á karmin á konto 6177, og at beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Náttúru- og umhvørvisnevndin 05. oktober 2021:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 20. oktober 2021:** Samtykt at taka undir við náttúru- og umhvørvisnevndini og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 28. oktober 2021:** Kunnað varð um málið.

# 272/21 Fjarhiti til Dagstovnin á Landavegnum, matr. nr. 918b, Tórshavn

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Náttúru- og umhvørvisnevndin | 06.05.2019 | 21/19 | 19/01620-1 |
| 2 Fíggjarnevndin | 15.05.2019 | 135/19 | 19/01620-1 |
| 3 Býráðsfundur | 23.05.2019 | 121/19 | 19/01620-1 |
| 4 Náttúru- og umhvørvisnevndin | 04.11.2019 | 47/19 | 19/01620-1 |
| 5 Fíggjarnevndin | 13.11.2019 | 312/19 | 19/01620-1 |
| 6 Býráðsfundur | 28.11.2019 | 279/19 | 19/01620-1 |
| 7 Náttúru- og umhvørvisnevndin | 05.10.2021 | 41/21 | 19/01620-1 |
| 8 Fíggjarnevndin | 20.10.2021 | 266/21 | 19/01620-1 |
| 9 Býráðsfundur | 28.10.2021 | 272/21 | 19/01620-1 |

**Upprunin til málið:**
Umhvørvispolitikkurin ‘Grøna Leiðin’ hjá Tórshavnar kommunu.

**Lýsing av málinum – samandráttur**
Hetta er eitt átak fyri umhvørvinum í sambandi við ætlanina, at minka um $CO_2$ útlátið og dálking, somuleiðis røkka málinum at knýta kommunalu bygningarnar í fjarhitan hjá Fjarhitafelagnum ella aðrar varandi orkukeldur. Ætlanin er at knýta Dagstovnin við Landavegin í fjarhitan, tí Fjarhitafelagið fer ígongd við at leggja leggja fjarhitaleiðingar á Landavegnum.

Kostnaðarmetingin fyri samlaðu verkætlanina er 425.000,- kr.

**Lógir, ásetingar o.a.**
Eingir

**Upplýsingar frá umsitingini**
Eingir

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**
Einki

**Møgulig frávik/lættar frá ásetingum**
Eingir

**Umhvørvisárin**
Barnagarðurin fær grøna orku, og hetta minkar um $CO_2$ útlátið uml. 9 ferðir

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**
Eingir

**Skjøl**

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** **(set x)**

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | X | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | X | | | |

| | | | | |
|---|---|---|---|---|
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | X | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** **Ja** ☒ **Nei** ☐
Tórshavnar kommuna hevur avtalu við Magn, ið inniber at oljukostnaðurin er lægri enn fjarhitakostnaðurin í løtuni.
Tað merkir, at barnagarðurin fær ein eyka kostnað fyri raksturin av fjarhitanum.
Harafturímóti verður minni viðlíkahald av hitaskipan, skorsteini og oljutanga.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og leiðarin á Húsaumsitingini mæla til:
- at játta 425.000 kr. til hesa verkætlan av kontu 6177 Umsiting og røkt av bygningum, orkuloysn.
- at geva umsitingini heimild, at taka av tilboði og undirskriva sáttmála við arbeiðstakara.
- og at beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Náttúru- og umhvørvisnevndin 06. mai 2019:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 15. mai 2019:** Samtykt at taka undir við Nátturu- og umhvørisnevndini og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 23. mai 2019:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Arbeiði at leggja fjarhita inn í Dagstovnum við Landavegin er bjóðað út, og vit fingu eitt tilboð frá MT Højgaard uppá graviarbeiðið áljóðandi 368.433,- kr. Harumframt kemur kostnaður uppá hitaverkið, ráðgeving, íbindingargjald og mvg, og samlaði kostnaður verður sostatt tilsamans 667.711,- kr.

Játtaðar eru 425.000,- kr. til hesa verkætlanina, og 33.787,- kr. eru higartil brúktar til ráðgeving. Írestandi eru 300.000,- kr.
Víst verður eisini til mál 19/01622.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og leiðarin á Húsaumsitingini mæla til:
1. at flyta 200.000,- kr. av konto 6177, L61704 Sólsellur til Dagstovnin á Velbastað, til konto 6177, L61702, Fjarhiti til Dagstovnin við Landavegin
2. at játta 100.000,- kr. av konto 6177, L00001 Løgukarmur fyri árið, til konto 6177, L61702, Fjarhiti til Dagstovnin við Landavegin
3. at beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Náttúru- og umhvørvisnevndin 04. november 2019:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 13. november 2019:** Samtykt at taka undir við náttúru- og umhvørvisnevndini og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 28. november 2019:** Fyrst varð atkvøtt um uppskot hjá Trónda Sigurðsson um at beina málið í náttúru- og umhvørvisnevndina, ið fall við 7 ímóti, 3 fyri og 3 blonkum.

Fyri atkvøddi: Tróndur Sigurðsson, Bjørghild Djurhuus og Helena Dam á Neystabø.

Ímóti atkvøddu: Annika Olsen, Gunvør Balle, Marin Katrina Frýdal, Jákup Dam, Turið Horn, Bogi Andreasen og Bergun Kass

Blankt atkvøddu: Heðin Mortensen, Halla Samuelsen og Annfinn Brekkstein.

Síðan varð atkvøtt um tilmælið frá fíggjarnevndini, ið varð einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
TK hevur lagt um til fjarhita á dagstovninum við Landavegin. Arbeiðið er nú liðugt, og verkætlanin kann lokast. Játtaðar vóru 925.000 kr., og brúktar eru 735.000 kr. Verkætlanin gevur eitt avlop uppá 190.000 kr.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og leiðarin fyri bygningsdeildina mæla til at loka verkætlanina L61702 á konto 6177, og at avlopið verður flutt á karmin á konto 6177, og at beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Náttúru- og umhvørvisnevndin 05. oktober 2021:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 20. oktober 2021:** Samtykt at taka undir við náttúru- og umhvørvisnevndini og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 28. oktober 2021:** Kunnað varð um málið.

| | |
|---|---|
| **Býráðsfundur**<br>28. oktober 2021 | Blað nr.: 1067<br>Formansins merki: |

# 273/21 Fjarhiti til Badmintonhøllina, matr. nr. 1268a, Tórshavn

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Náttúru- og umhvørvisnevndin | 06.05.2019 | 22/19 | 19/01621-1 |
| 2 Fíggjarnevndin | 15.05.2019 | 136/19 | 19/01621-1 |
| 3 Býráðsfundur | 23.05.2019 | 122/19 | 19/01621-1 |
| 4 Náttúru- og umhvørvisnevndin | 05.10.2021 | 39/21 | 19/01621-1 |
| 5 Fíggjarnevndin | 20.10.2021 | 267/21 | 19/01621-1 |
| 6 Býráðsfundur | 28.10.2021 | 273/21 | 19/01621-1 |

**Upprunin til málið:**
Umhvørvispolitikkurin 'Grøna Leiðin' hjá Tórshavnar kommunu.

**Lýsing av málinum – samandráttur**
Hetta er eitt átak fyri umhvørvinum í sambandi við ætlanina, at minka um $CO_2$ útlátið og dálking, somuleiðis røkka málinum at knýta kommunalu bygningarnar í fjarhitan hjá Fjarhitafelagnum ella aðrar varandi orkukeldur. Ætlanin er at knýta Badmintonhøllina í fjarhitan, fjarhitin liggur í Gundadalsvegnum framvið Badmintonhøllini.

Kostnaðarmetingin fyri samlaðu verkætlanina er 475.000,- kr.

**Lógir, ásetingar o.a.**
Eingir

**Upplýsingar frá umsitingini**
Eingir

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**
Einki

**Møgulig frávik/lættar frá ásetingum**
Eingir

**Umhvørvisárin**
Frítíðarskúlin fær grøna orku, og hetta minkar um $CO_2$ útlátið uml. 9 ferðir

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**
Eingir

**Skjøl**

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** (set x)

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | X | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | X | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | X | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar: Ja ☒ Nei ☐**

Tórshavnar kommuna hevur avtalu við Magn, ið inniber at oljukostnaðurin er lægri enn fjarhitakostnaðurin. Tað merkir, at frítíðarskúlin fær ein eyka kostnað fyri raksturin av fjarhitanum.
Harafturímóti verður minni viðlíkahald av hitaskipan, skorsteini og oljutanga.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og leiðarin á Húsaumsitingini mæla til:

- at játta 475.000 kr. til hesa verkætlan av kontu 6177 Umsiting og røkt av bygningum, orkuloysn.
- at geva umsitingini heimild, at taka av tilboði og undirskriva sáttmála við arbeiðstakara.
- og at beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Náttúru- og umhvørvisnevndin 06. mai 2019:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

Fíggjarnevndin 15. mai 2019: Samtykt at taka undir við Náttúru- og umhvørvisnevndini og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 23. mai 2019:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Arbeiðið bleiv boðið út í 2019, men bleiv útsett orsakað av, at tilboðini vóru væl hægri enn tað, sum upprunaliga bleiv mett og játtað. Arbeiðið er síðani blivið boðið út aftur í 2021 og er sett í gongd. Hetta arbeiði er partur av nýggjari verkætlan, sum er stovnað í 2021.

Verkætlanin L61703 er partvís liðug, og heldur fram í nýggju verkætlanini L61705. Tann nýggja verkætlanin verður væntandi liðug við árslok 2021.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og leiðarin fyri bygningsdeildina mæla til:

- at loka verkætlanina L61703, flyta kr. 100.000 av hesi verkætlanin á karmin á konto 6177
- at flyta restupphæddina kr. 250.228 á verkætlanina L61705, Orkupolitikkur, á konto 6177
- at beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Náttúru- og umhvørvisnevndin 05. oktober 2021:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 20. oktober 2021:** Samtykt at taka undir við náttúru- og umhvørvisnevndini og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 28. oktober 2021:** Kunnað varð um málið.

# 274/21 Sólsellur til Dagstovnin á Velbastað, matr. nr. 50af, Velbastað

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Náttúru- og umhvørvisnevndin | 06.05.2019 | 23/19 | 19/01622-1 |
| 2 Fíggjarnevndin | 15.05.2019 | 137/19 | 19/01622-1 |
| 3 Býráðsfundur | 23.05.2019 | 123/19 | 19/01622-1 |
| 4 Náttúru- og umhvørvisnevndin | 04.11.2019 | 48/19 | 19/01622-1 |
| 5 Fíggjarnevndin | 13.11.2019 | 313/19 | 19/01622-1 |
| 6 Býráðsfundur | 28.11.2019 | 280/19 | 19/01622-1 |
| 7 Náttúru- og umhvørvisnevndin | 05.10.2021 | 40/21 | 19/01622-1 |
| 8 Fíggjarnevndin | 20.10.2021 | 268/21 | 19/01622-1 |
| 9 Býráðsfundur | 28.10.2021 | 274/21 | 19/01622-1 |

**Upprunin til málið:**
Umhvørvispolitikkurin ‘Grøna Leiðin’ hjá Tórshavnar kommunu.

**Lýsing av málinum – samandráttur**
Hetta er eitt átak fyri umhvørvinum í sambandi við ætlanina at minka um $CO_2$ útlátið og dálking, somuleiðis røkka málinum at knýta kommunalu bygningarnar í varandi orkukeldur.

Tað er sera umráðandi at fylgja við allari tøkniligari framgongd og kunna verða við í áhaldandi menningini innan aðrar orkukeldur.

Hettar er fyrsti bygningur hjá kommununi, sum fer at hava sólsellur á takinum, ið framleiða “Grønan” streym. Henda royndarætlan verður roynd á Dagstovninum á Velbastað, sum m.a. miðvíst er farin at arbeiða fram ímóti at verða ein grønur stovnur.
Streymurin, sum verður framleiddur, verður seldur til SEV.

Kostnaðarmetingin fyri samlaðu verkætlanina er 575.000,- kr.

**Lógir, ásetingar o.a.**
Einki

**Upplýsingar frá umsitingini**
Eingir

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**
Einki

**Møgulig frávik/lættar frá ásetingum**
Eingi

**Umhvørvisárin**
Dagstovnurin fer at framleiða grøna el orku, og hetta minkar $CO_2$ útlátið á elnýtsluni við uml. 90%.

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**
Eingir

**Skjøl**
Skjøl við kostnaðarmeting, framleiðsla av streymi og plasering av sólsellum.

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** (set x)

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís øki í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | X | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | X | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | x | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar: Ja ☒ Nei ☐**

Tórshavnar kommuna ger avtalu við SEV um at selja streymin til SEV. Tað merkir, at Tórshavnar kommuna fær eina inntøku fyri sølu av streymi, sum húsaumsitingin fær ágóðan av.

**Tilmæli:**

Tekniski stjórin og leiðarin á Húsaumsitingini mæla til:

- at játta 575.000 kr. til hesa verkætlan av kontu 6177 Umsiting og røkt av bygningum, orkuloysn.
- at geva umsitingini heimild, at taka av tilboði og undirskriva sáttmála við arbeiðstakara.
- og at beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Náttúru- og umhvørvisnevndin 06. mai 2019:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

Fíggjarnevndin 15. mai 2019: Samtykt at taka undir við Náttúru- og umhvørvisnevndini og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 23. mai 2019:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**

Arbeiðið at seta sólsellur upp á Dagstovninum á Velbastað er bjóðað út, og lægra tilboðið er áljóðandi 211.204 kr. Harumframt kemur kostnaður til ráðgeving, mvg o.a, og samlaði kostnaðurin verður sostatt tilsamans 288.155,- kr.
Játtaðar eru 575.000,- kr. til hesa verkætlan, og 62.492,- kr. eru higartil brúktar til ráðgeving o.a. Avlopið á hesi konto í mun til verandi játtan verður væntandi umleið 200.000,- kr.
Víst verður eisini til mál 19/01620.

**Tilmæli:**

Tekniski stjórin og leiðarin á Húsaumsitingini mæla til, at flyta 200.000,- kr. av konto 6177, L61704, Sólsellur til Dagstovnin á Velbastað, til konto 6177, L61702 Fjarhiti til Dagstovnin við Landavegin og beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Náttúru- og umhvørvisnevndin 04. november 2019:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 13. november 2019:** Samtykt at taka undir við náttúru- og umhvørvisnevndini og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 28. november 2019:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**

TK hevur sett sólsellur upp á Dagstovninum á Velbastað. Arbeiðið er nú liðugt, og verkætlanin kann lokast. Játtaðar vóru 175.000 kr., og brúktar eru 568.000 kr. Verkætlanin gevur eitt hall uppá 393.000 kr. Orsøkin til hallið er skeivt býti millum verkætlanirnar á konto 6177. Hallið verður dekkað við avlopi á øðrum verkætlanum undir somu konto, 6177, sum eisini verða lokaðar í hesum sambandi.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og leiðarin fyri bygningsdeildina mæla til at loka verkætlanina L61704 á konto 6177, og at hallið verður flutt á karmin á konto 6177, og at beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Náttúru- og umhvørvisnevndin 05. oktober 2021:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 20. oktober 2021:** Samtykt at taka undir við náttúru- og umhvørvisnevndini og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 28. oktober 2021:** Kunnað varð um málið.

# 275/21 Kommunala tilbúgvingin hjá Sløkkiliðstøðini

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Tilbúgvingarnevndin | 20.03.2017 | 2/17 | 17/00954-1 |
| 2 Tilbúgvingarnevndin | 27.09.2021 | 6/21 | 17/00954-1 |
| 3 Býráðsfundur | 28.10.2021 | 275/21 | 17/00954-1 |

**Málslýsing:**
Kartni Jacobsen, sløkkiliðsstjóri greiðir frá.

**Tilbúgvingarnevndin 20. mars 2017:** Kunnað varð um málið.

**Ískoyti:**
Sambært tilbúgvingarlógini skal ein Tilbúgvingarætlan gerast og góðkennast av kommunustýrinum, og skal til Fiskimálaráðið til ummælis.

Vit gjørdu eina ætlan í 2018, sum varð góðkend í Tilbúgvingarnevndini og síðani send Fiskimálaráðnum til ummælis, og hava vit d.d ikki fingið hana aftur, hóast vit hava vent okkum til teirra.

Tilbúgvingarætlanin er endurskoðað og klár at leggja fyri Tilbúgvingarnevndina til góðkenningar og at beina víðari í Býráðið at góðkenna.

Eru seinni møguligar viðmerkingar ella broytingar frá Fiskimálaráðnum, verður tann parturin lagdur fyri nevndina aftur, og um neyðugt eisini beint í býráðið.

**Tilmæli:**
Tekniski Stjórin og Sløkkiliðsstjórin mæla til, at tilbúgvingarætlanin verður góðkend, og at beina málið í býráðið til góðkenningar.

**Tilbúgvingarnevndin 27. september 2021:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið til góðkenningar.

**Býráðsfundur 28. oktober 2021:** Einmælt samtykt.

## 276/21 Umsókn frá Nord Pack Group um leigu av grundøki á Oyrareingjum til bygging av pakkhúsi

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Vinnunevndin | 16.11.2020 | 82/20 | 20/03394-3 |
| 2 Vinnunevndin | 12.01.2021 | 5/21 | 20/03394-3 |
| 3 Havnanevndin | 16.09.2021 | 31/21 | 20/03394-3 |
| 4 Fíggjarnevndin | 22.09.2021 | 229/21 | 20/03394-3 |
| 5 Kollafjarðarnevndin | 29.09.2021 | 9/21 | 20/03394-3 |
| 6 Fíggjarnevndin | 20.10.2021 | 270/21 | 20/03394-3 |
| 7 Býráðsfundur | 28.10.2021 | 276/21 | 20/03394-3 |

**Upprunin til málið:**
Umsókn frá Nord Pack Group OU, móttikin 9. september 2020 um leigu av einum 3.000 $m^2$ stórum grundøki til bygging av goymslubygningi.

**Lýsing av málinum – samandráttur**
Felagið er úr Estlandi, og stendur fyri søluni av 80% av pakninginum, sum russisk skip taka umborð í føroyskum havnum.
Pakningurin verður sigldur til Føroyar, og nøgdin svarar til at 8 - 10 skip koma um árið, við umleið 1.300 pallum hvørja ferð.
Av tí at felagið ynskir at at fáa virksemið upp at standa skjótast til ber, er ætlanin at leiga bingjuøkið á Oyrareingjum, soleiðis at pakningurin verður goymdur í bingjum, til pakkhúsið er klárt at taka í brúk.

**Lógir, ásetingar o.a.**
Økið er í byggisamtyktini eitt B1 øki, sum avlagt til havnavirksemi.

**Upplýsingar frá umsitingini**
Sáttmáli verður gjørdur við eitt føroyskt felag, sum Nord Pack Group stovnar
Leigusáttmálin er ein 25 ára leigusáttmáli.

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

**Møgulig frávik/lættar frá ásetingum**

**Umhvørvisárin**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl**

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum (set x)**

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|

| | | | | |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** **Ja ☐** **Nei ☐**

**Tilmæli:**
Havnameistarin mælir til at ganga umsóknini á møti, og at taka undir við leiguavtaluni j.nr. 20/03394-4.

**Vinnunevndin 16. november 2020:** Málið varð útsett.

**Vinnunevndin 12. januar 2021:**

**Ein meiriluti:** Kári Johansen, Kristianna Winther Poulsen, Birgir Nielsen og Tróndur Sigurðsson samtykti at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Ein minniluti:** Elsa Berg tekur ikki undir við tilmælinum tí hædd skal takast fyri skrivinum hjá staðbundnu nevndini, tí økið eigur at bjóðast út og nýggja staðbundna nevndin eigur at hoyrast

**Ískoyti:**
Umsøkjarin ótolnast eftir svari.

**Havnanevndin 16. september 2021:** Kunnað varð um málið og beina málið í fíggjarnevndina umvegis kollafjarðarnevndina.

**Fíggjarnevndin 22. september 2021:** Samtykt at beina málið í Kollafjarðarnevndina.

**Kollafjarðarnevndin 29. september 2021:** Staðbundna nevndin vil hava at krøv verða sett. Ikki gera ein leigusáttmála upp á 25 ár tí at grundarlagið ikki er til staðar. Royndartíðin um larm skal verða avgreidd áðrenn 1. november 2021.

**Fíggjarnevndin 20. oktober 2021:** Ein meiriluti, Heðin Mortensen, Annfinn Brekkstein og Tróndur Sigurðsson, tekur undir við meirilutanum í vinnunevndin 12. januar 2021 og beinir málið í býráðið við tilmæli um at gera 25 ára leigusáttmála, ið tó ikki verður settur í verk, fyrrenn royndartíðin um larm er farin tann 1. november 2021.

Ein minniluti, Annika Olsen og Elsa Berg, tekur ikki undir við tilmælinum at gera leigusáttmála við felagið.

**Býráðsfundur 28. oktober 2021:** Atkvøtt varð um tilmælið frá meirilutanum í fíggjarnevndini, ið varð samtykt við 8 atkvøðum fyri, 3 ímóti og 2 blonkum atkvøðum.

Fyri atkvøddu: Heðin Mortensen, Annfinn Brekkstein, Tróndur Sigurðsson, Kristianna Winther Poulsen, Kári Johansen, Súna Mørk, Bjørg Dam og Birgir Nielsen

Ímóti atkvøddu: Elsa Berg, Gunnvør Balle og Annika Olsen.

Blankt atkvøddu: Jón Kragesteen og Ruth Vang.

# 277/21 Umsókn frá P/F Sandskip um leigu av grundøki á Sundi til bygging av goymsluhøll

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Havnanevndin | 05.10.2021 | 36/21 | 21/03575-2 |
| 2 Fíggjarnevndin | 20.10.2021 | 269/21 | 21/03575-2 |
| 3 Býráðsfundur | 28.10.2021 | 277/21 | 21/03575-2 |

**Upprunin til málið**
Umsókn frá P/F Sandskip um leigu av grundøki á Sundi til bygging av goymslubygningi.

**Lýsing av málinum**
P/F Sandskip eigur og stendur fyri skiparakstri.
Felagið søkir um at leiga part av matr nr 1c á Sundi, har ætlanin er at byggja eina 1.800 m$^2$ stóra høll, sum í høvuðsheitum skal brúkast til goymslu av tilfari og útbúnaði til byggi- , ali- og fiskivinnuna, sum verður innflutt við skipum hjá felagnum.

**Lógir, ásetingar o.a.**
Serstøk byggisamtykt er nýliga samtykt í býráðnum. Økið liggur í einum B6 øki, sum sambært byggisamtyktini kann brúkast til vinnuvirkir, verksmiðjur, goymslur og tílíkt og til tænastuvirksemi, ið hevur samband við hesi.
Serstaka byggisamtyktin liggur í Býarskipanarnevnd Landsins og bíðar eftir endaligari góðkenning.

**Upplýsingar frá umsitingini**
Sandskip hevur havt nógvan flutning um bryggjuna á Sundi.

Síðani 2017 hevur felagið leigað tað umtalaða økið til goymslu av sandi og skervi. Hetta leigumálið kann av báðum pørtum uppsigast 3 mánaða ávaring.

Økið er umleið 2.300 m$^2$ stórt.

Byggi- og umhvørvisdeildin hava viðgjørt umsókn um byggiloyvi frá Sandgrevstur, men kunnu ikki avgreiða byggiloyvi fyrr enn ein langtíðar leiguavtala um grundøkið er gjørd.

Uppskot er gjørt um ein 25 ára langtíðar leigusáttmála j.nr. 21/03575-3

Byggiloyvið verður givið av byggi- og umhvørvisdeildini.

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl**

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** **(set x)**

| | **Fyri Tórshavnar kommunu** | **Fyri ávís økir í kommununi** | **Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir** | **Fyri vinnuna** |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |

| | | |
|---|---|---|
| | **Býráðsfundur**<br>28. oktober 2021 | Blað nr.: 1077<br><br>Formansins merki: |

| | | | | |
|---|---|---|---|---|
| **Møgulig frávik/lættar frá ásetingum** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar: Ja ☐ Nei ☐**

**Tilmæli:**
Havnarmeistarin mælir til at ganga umsóknini um leigu av grundøki á møti, og at taka undir við uppskoti til leigusáttmála j.nr 21/03575-3.

**Havnanevndin 05. oktober 2021:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í fíggjarnevndina. Tróndur Sigurðsson var ikki við til hetta málið.

**Fíggjarnevndin 20. oktober 2021:** Samtykt at taka undir við havnanevndini og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 28. oktober 2021:** Einmælt samtykt.

| | |
|---|---|
| **Býráðsfundur**<br>28. oktober 2021 | Blað nr.: 1078<br>Formansins merki: |

# 278/21 Víðkan av sølutorginum í Vágsbotni

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Havnanevndin | 09.03.2021 | 13/21 | 21/00927-1 |
| 2 Havnanevndin | 27.04.2021 | 20/21 | 21/00927-1 |
| 3 Fíggjarnevndin | 28.04.2021 | 98/21 | 21/00927-1 |
| 4 Býráðsfundur | 29.04.2021 | 109/21 | 21/00927-1 |
| 5 Havnanevndin | 16.09.2021 | 32/21 | 21/00927-1 |
| 6 Byggi- og býarskipanarnevndin | 04.10.2021 | 190/21 | 21/00927-1 |
| 7 Havnanevndin | 19.10.2021 | 38/21 | 21/00927-1 |
| 8 Fíggjarnevndin | 20.10.2021 | 271/21 | 21/00927-1 |
| 9 Býráðsfundur | 28.10.2021 | 278/21 | 21/00927-1 |
| 10 Býráðsfundur | | | 21/00927-1 |

**Upprunin til málið**
Havnarnevndarformaðurin hevur reist málið.

**Lýsing av málinum**
Ynski er um, at bryggjukanturin framman fyri sølutorginum í Vágsbotni verður breiðkaður 2,5 metur við einari longd upp á umleið 35 metur. Hetta skal bøta um atkomuna til sølutorgið.
Eisini er ynski um, at breiðka gongubreytina frá Vágsbotni og 35 metur vestureftir.

**Lógir, ásetingar o.a.**
Økið fram við sølutorginum í Vágsbotni hoyrir undir byggisamtykt nr. 4 fyri Tinganes og gomlu Havnina.

**Upplýsingar frá umsitingini**
Vágsbotnur er seinnu árini meira og meira blivin ein partur av miðbýnum, við matstovum, sølutorgi og øðrum líknandi virksemi.
Í 2020 varð skipað fyri einari arkitekta kapping fyri økið í Vágsbotni.

Ásannandi, at bátabrúgvar, bátahavnir, økið á Kongabrúnni og í Vágsbotni, er eitt trivnaðar øki, hevur býráðið í 2005 samtykt, at íløgur á hesum økinum, verða fíggjaðar av Tórshavnar kommunu. J.nr 21/00927-2.

Fyri at koma til eina góða loysn við Vágsbotni og økinum har, eigur eitt uppskot um broyting av økinum at viðgerast í býarskipanarnevndini.

Um bryggjukanturin og gongubreytin skulu flytast longur út, er neyðugt at gera botnkanningar.

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**
Arkitekta kapping í 2020 hevur verið um skipan av økinum á Skálatrøð og Vágsbotni

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl**

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** **(set x)**

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Møgulig frávik/lættar frá ásetingum** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar: Ja ☒ Nei ☐**

**Tilmæli:**
Havnarmeistarin mælir til at beina málið um víðkan av sølutorginum í Vágsbotni í byggi- og býarskipanarnevndina.
Eisini verður mælt til at gera botnkanningar, at fíggja av konto 7476 smábátahavnir L74007 Bátahylur við Sjógv

**Havnanevndin 09. mars 2021:** Samtykt at arbeiða víðari við málinum og bjóða bryggjukantin út sum heildarloysn millum tríggjar arbeiðstakarar.

**Ískoyti:**
Arbeiðið varð bjóðað út millum J&K Petersen, Articon og West-Trading.

Biðið var um tilboð upp á eina loysn við stuðlamúri og eina loysn við L-elementum.

Lisitatión varð hildin 19.04.2021.
.
Inn komu tilboð frá J&K Petersen og Articon.
Tilboðini upp á stuðlamúr vóru: frá J&K Petersen 2.151.608,- kr. og frá Articon 2.167.322,- kr.

Harumframt hevði Articon tilboð upp á L-element loysn fyri 1.876.000,- kr.

Fyrimunurin við eini elementloysn er, at minni arbeiði er á staðnum.
Viðv. uppgrevstri og planering verður bert arbeitt frá sjósíðuni. Leysa tilfarið á botni kann gravast upp frá krókinum, og ein vegbreyt verður leypandi planerað omanfyri sjóvarmálan fram við bryggjukantinum.
Tá botnurin er planeraður, verða elementini sett niður. Tá er neyðugt, at krani stendur á økinum við sølubásarnar umleið ein dag.
Fylt verður aftanfyri elementini og liðugtgerð av hamara, leiðingum og lendinum kann gerast.

Mælt verður til at taka av tilboðnum frá Articon upp á L-element loysn, og at játta 2.076.000,- kr. til arbeiðið.

Um arbeiðið verður sett í verk 1. mai 2021 verður rokna við, at tað kann verða liðugt í fyrru helvt av juli.

Um arbeiðið verður sett í verk 1. september 2021, verður roknað við, at tað verður liðugt mánaðarskiftið oktober/november.

Vágsbotnur verður nógv vitjaður nú várið og summarið kemur. Hóast arbeiðið í stóran mun verður gjørt frá sjósíðuni, verður mælt til ikki at byrja arbeiðið fyrr enn 1. september 2021. Hetta eigur eisini at geva eitt betri úrslit, tá arbeiðið kann fyrireikast í góðari tíð.

**Tilmæli frá havnameistaranum:** Mælt verður til:

- at taka av tilboðnum frá Articon, at gera bryggjuna av L-elementum fyri kr.1.876.000.
- at arbeiðið byrjar 1. september 2021
- at nevndin tekur støðu til hvussu íløgan skal fíggjast.

**Havnanevndin 27. apríl 2021:**

**Ein meiriluti:** Kári Johansen, Tróndur Sigurðsson, Birgir Nielsen og Annfinn Brekkstein samtykti at taka av tilboðnum frá Articon, at gera bryggjuna av L-elementum fyri kr.1.876.000. Og at fíggja arbeiðið av játtan til bátahyl í Álakeri konto 7460,L 00001íløgukarmar fyri árið. Arbeiðið byrjar beinanvegin.

**Ein minniluti:** Elsa Berg tekur ikki undir við tilmælinum tí hon vil hava at arbeiðið skal gerast í samsvar við ætlanina skipan av Vágsbotn.

**Fíggjarnevndin 28. apríl 2021:** Ein meiriluti, Heðin Mortensen, Annfinn Brekkstein og Tróndur Sigurðsson, tekur undir við meirilutanum í Havnanevndini og beinir málið í býráðið.

Ein minniluti, Annika Olsen og Elsa Berg, atkvøður ímóti.

**Býráðsfundur 29. apríl 2021:** Atkvøtt varð um uppskot frá Gunvør Balle um at beina málið í byggi- og býarskipanarnevndina, ið fall við fýra atkvøðum fyri, níggju ímóti og ongari blankari atkvøðu.

Fyri atkvøddu: Elsa Berg, Jákup Dam, Gunvør Balle og Ruth Vang.

Ímóti atkvøddu: Heðin Mortensen, Annfinn Brekkstein, Tróndur Sigurðsson, Kristianna Winther Poulsen, Kári Johansen, Súna Mørk, Bjørg Dam, Kristian M. Skála og Birgir Nielsen.

Síðani varð atkvøtt um uppskotið frá meirilutanum í fíggjarnevndini, ið varð samtykt við níggju atkvøðum fyri, trimum ímóti og einari blankari atkvøðu.

Fyri atkvøddu: Heðin Mortensen, Annfinn Brekkstein, Tróndur Sigurðsson, Kristianna Winther Poulsen, Kári Johansen, Súna Mørk, Bjørg Dam, Kristian M. Skála og Birgir Nielsen.

Blankt atkvøddi: Ruth Vang.

Ímóti atkvøddu: Elsa Berg, Jákup Dam og Gunvør Balle, ið viðmerkja i gerðabókina, at tey atkvøða ímóti, tí tey vilja hava, at arbeiðið skal gerast í samsvari við ætlanina skipan av Vágsbotni.

**Býráðsfundur 29. apríl 2021:** Atkvøtt varð um uppskot frá Gunvør Balle um at beina málið í byggi- og býarskipanarnevndina, ið fall við fýra atkvøðum fyri, níggju ímóti og ongari blankari atkvøðu.

Fyri atkvøddu: Elsa Berg, Jákup Dam, Gunvør Balle og Ruth Vang.

Ímóti atkvøddu: Heðin Mortensen, Annfinn Brekkstein, Tróndur Sigurðsson, Kristianna Winther Poulsen, Kári Johansen, Súna Mørk, Bjørg Dam, Kristian M. Skála og Birgir Nielsen.

Síðani varð atkvøtt um uppskotið frá meirilutanum í fíggjarnevndini, ið varð samtykt við níggju atkvøðum fyri, trimum ímóti og einari blankari atkvøðu.

Fyri atkvøddu: Heðin Mortensen, Annfinn Brekkstein, Tróndur Sigurðsson, Kristianna Winther Poulsen, Kári Johansen, Súna Mørk, Bjørg Dam, Kristian M. Skála og Birgir Nielsen.

Blankt atkvøddi: Ruth Vang.

Ímóti atkvøddu: Elsa Berg, Jákup Dam og Gunvør Balle, ið viðmerkja i gerðabókina, at tey atkvøða ímóti, tí tey vilja hava, at arbeiðið skal gerast í samsvari við ætlanina skipan av Vágsbotni.

**Ískoyti:**
Arbeiðið at breiðka bryggjukantin 35 m frá Vágsbotni og suðureftir, er liðugt.

Alt strekkið, frá krókinum og út á endan á tí gamla bryggjukantinum, er tilsamans 94 m, sum merkir, at um allur bryggjukanturin skal breiðkast, mangla tað 59 m í.

Dýpið á tí innara strekkinum er 2½ m. Á tí uttara strekkinum er tørvur á at leggja større bátar, tí eigur dýpið ikki at fara undir 3 m, sum er dýpið á verandi bryggju.
Best hevði verið, um dýpið kundi komið niður á 3,5 m.

Miðskeiðis í økinum liggur ein flótandi eind, sum verður brúkt til vitjandi bátar og uppihaldsøki annars. Um bryggjan skal breiðkast, verður neyðugt at stytta tað flótandi eindina.

At breiðka teir eftirverandi 59 m, líkist nógv tí fyrra arbeiðinum, tí eigur tað at bera til at samráðast við tann sama arbeiðstakaran.
Partur av fyrireikingini eigur at vera, at gera neyvar botnkanningar saman við arbeiðstakaranum, so tær óvantaðu útreiðslurnar verða avmarkaðar.

Økið er partur av Vágsbotni, og eigur eisini at verða viðgjørt av býarskipanarnevndini.

**Havnarmeistarin mælir til:**
At samráðast við sama arbeiðstakara, fyri at koma við einari ætlan og einum samlaðum kostnaði, við grundarlagi í botnkanningum, sum eru gjørdar av arbeiðstakara og -ánara í felag.

At fíggjarnevndin vísir á fígging

At beina málið í býarskipanarnevndina.

**Havnanevndin 16. september 2021:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og at beina málið í byggi- og býarskipanarnevndina. Og taka sølutorgið við sum ein part av málinum.

**Ískoyti:**
Býarskipanarliga verður mett best, um bryggjukanturin verður longdur heilt út til verandi træbrúgvar longur suðuri, soleiðis at teinurin kann upplivast sum ein heild. Talan er helst um eitt 60 metra langt strekki, sum bryggjukanturin skal leingjast.

Víst verður á omanfyri standandi tilmælir, har mælt verður til, at fara í samráðingar við fyrrverandi arbeiðstakaran á økinum og saman við honum at gera neyðugu botnkanningarnar, soleiðis at óvæntaðu útreiðslurnar verða avmarkaðar.

Viðv. Sølutorginum, so er helst neyðugt at fara undir at viðlíkahalda søluplintarnar við nøktandi ljósi o.s.fr., umframt at teir eru nakað illa farnir, grundað á lítið og einki viðlíkahald. Mett verður hóskandi, at fáa søluplintarnar settar í stand, soleiðis at økið kemur at virka á fullgóðan hátt fram til at Vágsbotn-torgið í síni heild verður raðfest.

Fyri at fara undir hetta arbeiðið, so eigur sølutorgið at verða eftirhugt, soleiðis at ábøturnar, sum skulu gerast, verða nágreinaðar. Mett verður, at talan er ikki um eina stóra íløgu, men fyrr enn neyðugu tiltøkini eru skrásett, er trupult at meta um fíggjartørvin.

Um farið verður undir at gera bryggjukantin, og ein arbeiðstakari kemur á økið at arbeiða, so verður mett hóskandi, at sami arbeiðstakari ger neyðuga viðlíkahaldið av sølutorginum, hetta fyri at loysa uppgávuna so skynsamt sum gjørligt.

**Tilmæli:**

Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til:
- At Havnaskrivstovan fer undir samráðingar við arbeiðstakaran, fyri at koma við eini ætlan og einum samlaðum kostnaði, við grundarlagi í botnkanningum, umframt staðfesting av ábótum á søluplintunum, sum eru gjørdar av arbeiðstakara og -ánara í felag.
  At fíggjarnevndin vísir á fígging, og at málið verður beint í býráðið.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 04. oktober 2021:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í havnanevndina.

**Ískoyti**
Samskift hevur verið við entreprenørin, P/F Articon, sum gjørdi tann fyrra partin av bryggjukantinum frá Vágsbotni og suðureftir, sum vóru lidnir áðrenn ólavsøku.
Arbeiðið umfatar:
- Dýpdarmáting, botnkanning og projektering av betongelementum til leinging av bryggjuni við 60 m.
- Bryggjan verður dimentionerað fyri flatulast upp á 5 kN/m2 og punktlast 45 kN.
- Treytað av, at uppmáting og botnkanningin vísa, at tað er møguligt, so er roknað við dýpi upp á 3,0 m á fyrstu 30 m av leingingini og dýpi upp á 3,5 m á eystasta partinum á leingingini.
- Samanbygging verður gjørd í eystara horni við bryggjuna sum varð gjørd í 2011.
- 7 stk pullartar 10 tons verða settir í bryggjuhamaran og 5 stk gøtuljóssteyar.
- Arbeiðishátturin verður sum við arbeiðinum, sum var gjørt í summar.

Um sáttmáli kann gerast innan 1. nov. 2021 verður arbeiðið liðugt í seinasta lagi 1. apríl 2021, kostnaður kr. 5.175.363,-

Søluplintar:
Ábøtur skulu gerast á søluplintarnar. Hetta arbeiðið er mett til kr.1.000.000

Kafe brúgvin:
Neyðugt verður at stytta brúna, hetta arbeiðið er mett til kr. 100.000

Projekt, eftirlit og óvantað:
Tað eru altíð óvissur bundnar við at arbeiða undir vatnskorpuni, har tað er trupult at skráseta botnviðurskiftini neyvt, saman við eftirlitinum er hetta mett til 12% ella kr. 753.000.

**Tilmæli frá havnameistaranum:** Mælt verður til at gera avtalu við Articon um at gera arbeiðið, og at játta tilsamans kr. 7.028.363,-
At fíggjarnevndin finnur fígging, og at málið verður beint í býráðið.

**Havnanevndin 19. oktober 2021:**

Ein meiriluti: Kári Johansen og Annfinn Brekkstein samtykti at taka undir við tilmælinum.

Ein minniluti: Elsa Berg tekur ikki undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 20. oktober 2021:** Ein meiriluti, Heðin Mortensen, Annfinn Brekkstein og Tróndur Sigurðsson, tekur undir við havnanevndini og játtar kr. 7.028.363 av meirinntøkum og beinir málið í býráðið sum eykajáttan, ið krevur tvær viðgerðir.

Ein minniluti, Annika Olsen og Elsa Berg, tekur ikki undir við tilmælinum, tí aðrar raðfestingar innan tekniska økið eiga at raðfestast fremri, t.d. kloakkir í økinum og orkuskiftið. Tá arbeitt verður við menning

av Vágsbotni og nærumhvørvinum eigur arbeiðið at verða gjørt samsvarandi vinnandi arkitektauppskotinum fyri økið.

**Býráðsfundur 28. oktober 2021:** Atkvøtt varð um tilmælið frá meirilutanum í fíggjarnevndini, ið varð samtykt við níggju atkvøðum fyri, trimum ímóti og einari blankari atkvøðu.

Fyri atkvøddu: Heðin Mortensen, Annfinn Brekkstein, Tróndur Sigurðsson, Kristianna Winther Poulsen, Kári Johansen, Súna Mørk, Bjørg Dam, Birgir Nielsen og Ruth Vang.

Ímóti atvøddu: Elsa Berg, Gunvør Balle og Annika Olsen.

Blankt atkvøddi: Jón Kragesteen.

# 279/21 Fíggjarætlan 2022, Tórshavnar kommuna

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 28.09.2021 | 239/21 | 21/03493-3 |
| 2 Býráðsfundur | 30.09.2021 | 237/21 | 21/03493-3 |
| 3 Mentamálanevndin | 06.10.2021 | 244/21 | 21/03493-3 |
| 4 Havnanevndin | 05.10.2021 | 37/21 | 21/03493-3 |
| 5 Vinnunevndin | 07.10.2021 | 33/21 | 21/03493-3 |
| 6 Byggi- og býarskipanarnevndin | 04.10.2021 | 189/21 | 21/03493-3 |
| 7 Tekniska nevnd | 04.10.2021 | 66/21 | 21/03493-3 |
| 8 Náttúru- og umhvørvisnevndin | 05.10.2021 | 42/21 | 21/03493-3 |
| 9 Trivnaðarnevndin | 07.10.2021 | 69/21 | 21/03493-3 |
| 10 Heilsu- og eldranevndin | 05.10.2021 | 26/21 | 21/03493-3 |
| 11 Fíggjarnevndin | 20.10.2021 | 272/21 | 21/03493-3 |
| 12 Býráðsfundur | 28.10.2021 | 279/21 | 21/03493-3 |
| 13 Mentamálanevndin | | | 21/03493-3 |

**Upprunin til málið**
Fíggjarnevndin skal sambært kommunustýrislógini leggja uppskot til fíggjarætlan fyri býráðið í seinasta lagi 1. oktober.

Býráðið skal síðani viðgera uppskotið tvær ferðir við í minsta lagi 14 daga millumbili. Fíggjarætlanin skal vera endaliga samtykt í seinasta lagi 1. desember.

Býráðið hevur fyrstu viðgerð 28. oktober og aðru viðgerð 25. november.

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

**Lýsing av málinum**

**Fortreytir fyri fíggjarætlan 2022**
Í uppskotinum til fíggjarætlan 2022 er roknað við, at kommunuskattaprosentið og barnafrádrátturin framhaldandi verða ávikavist 19,00% og 8.000 kr.

Kendar framskrivingar og virksemisbroytingar eru eisini tiknar við.

Virksemisbroytingar eru t.d sáttmála- og lógarbundnar broytingar, rakstrarkostnaðar-ávirkan av nýggjum íløgur og íløgum, ið koma ístaðin fyri aðrar og eisini samtyktar og/ella ætlaðar broytingar í virksemi og tænastustøði.

Í talvuni niðanfyri síggjast høvuðstølini býtt á kommunugreinar.

| tkr | | Roknskapur 2020 | Ætlan 2021 | Ætlan 2022 | Broyting 2021/2022 pst | kr |
|---|---|---|---|---|---|---|
| **Inntøkur** | | | | | | |
| 20501 | Kommunuskattur | 890.147 | 873.135 | 920.000 | 5,4% | *46.865* |
| 20601 | Felagsskattur | 55.298 | 28.000 | 35.000 | 25,0% | *7.000* |
| 20502 | Húsaleiguskattur | 602 | 2.000 | 2.000 | 0,0% | *0* |
| 20801 | Skattur af eftirlønarinngjøldum | 155.841 | 154.817 | 154.817 | 0,0% | *0* |
| 20802 | DIS, FAS og frádráttir | 36.675 | 33.844 | 36.072 | 6,6% | *2.228* |
| | **Inntøkur íalt** | **1.138.562** | **1.091.796** | **1.147.889** | **5,1%** | ***56.093*** |
| | | | | | | |
| **Rakstur** | | | | | | |
| §1 | Kommunal fyrisiting | 93.422 | 95.895 | 99.138 | 3,4% | *3.243* |
| §2 | Almanna- og heilsumál | 256.186 | 282.668 | 302.171 | 6,9% | *19.503* |
| §3 | Børn og ung | 190.635 | 200.198 | 214.617 | 7,2% | *14.419* |
| §4 | Undirvísing | 42.880 | 45.008 | 47.159 | 4,8% | *2.151* |
| §5 | Mentan og frítíð | 61.694 | 65.573 | 63.830 | -2,7% | *-1.743* |
| §6 | Teknisk mál | 150.203 | 144.852 | 147.141 | 1,6% | *2.289* |
| §7 | Kommunal virkir TK | 87.825 | 79.062 | 81.139 | 2,6% | *2.077* |
| §7 | Kommunal virkir TH | -44.681 | -32.858 | -32.353 | -1,5% | *505* |
| | **Rakstur íalt** | **838.165** | **880.398** | **922.842** | **4,8%** | ***42.444*** |
| | | | | | | |
| **Aðrar útreiðslur** | | | | | | |
| 20101 | Stuðul til rentuútreiðslur | 18.141 | 18.000 | 18.000 | 0,0% | *0* |
| 20910 | Aðrar inntøkur | 3.231 | 2.000 | 2.000 | 0,0% | *0* |
| | **Aðrar útreiðslur íalt** | **21.372** | **20.000** | **20.000** | **0,0%** | ***0*** |
| | | | | | | |
| | **Úrslit áðrenn rentur** | **279.024** | **191.398** | **205.047** | **7,1%** | ***13.649*** |
| | | | | | | |
| **Rentur** | | | | | | |
| 20301 | Rentuútreiðslur TK | - | 800 | 2.225 | 178,1% | *1.425* |
| 20301 | Rentuútreiðslur TH | - | 5.500 | 5.700 | 3,6% | *200* |
| 20401 | Rentuinntøkur TK | - | 0 | 0 | 0,0% | *0* |
| 20401 | Rentuinntøkur TH | - | 0 | 0 | - | - |
| | **Rentur íalt** | **2.517** | **6.300** | **7.925** | **25,8%** | ***1.625*** |
| | | | | | | |
| | **Úrslit av rakstri TK/TH** | **276.507** | **185.098** | **197.122** | **6,5%** | **12.024** |
| | | | | | | |
| | **Avdráttir TK** | **1.234** | **1.234** | **1.234** | **0,0%** | ***0*** |
| | **Avdráttir TH** | **15.873** | **15.873** | **19.900** | **25,4%** | ***4.027*** |
| | **Úrslit av rakstri TK/TH** | **259.400** | **167.991** | **175.988** | **4,8%** | ***7.997*** |
| | | | | | | |
| | **Avlop til skattafíggjaðar íløgur hjá TK*** | **230.592** | **156.506** | **169.235** | **8,1%** | **12.729** |

Búskaparráðið hevur nýliga lagt sína heystfrágreiðing fram, og har metir ráðið fyri 2022 ein búskaparvøkstur/vøkstur í bruttotjóðarúrtøkuni BTÚ upp á 3,3% í leypandi prísum.

Ráðið endurmetir eisini búskaparvøksturin fyri 2020 og 2021. Metingin er nú ávikavist
-2,4% (-6,9%) og 7,9% (5,5%).

**INNTØKURNAR**
Tað ber ikki til at siga, at korona hevur sæst stórvegis aftur í inntøkunum hjá kommununi. Væntandi verður tó felagsskatturin lakari komandi.

Inntøkumetingin av **kommunuskattinum** er við støði í staðfestu inntøkunum fyrstu átta mánaðarnar í 2021 og fíggjarætlanartølini síðstu 4 mánaðarnar við 1,00% væntaðum vøkstri løgdum omaná. Oman á samlaða metta talið fyri 2021 eru síðani løgd 2,00% fyri at koma fram til metingina fyri 2022. Inntøkurnar frá kommunuskattinum vaksa tá 5,4% ella 46,9 mió.kr upp í 920 mió.kr í mun til 873,1 mió.kr í fíggjarætlanini fyri 2021.

Inntøkurnar av **skatti av eftirlønarinngjøldum** eru mettar til 154,8 mió.kr. Hetta er sama metta tal sum fyri 2021. Ein nýgg meting fyri 2022 kemur frá Fíggjarmálaráðnum kemur væntandi skjótt. Fyri 2020 var staðfesta talið 155,8 mió.kr.

Inntøkan frá **felagsskatturin** er fyri 2022 mett at verða 35,0 mió.kr, sum er 7,0 mió.kr ella 25% hægri enn metingin í fjør. Staðfesti felagsskatturin fyri 2020 bleiv 55,3 mió.kr, og tá var metingin 35 mió.kr. Munurin ímillum tá og nú er tó, at Fíggjarmálaráðið væntar, at korona fer at síggjast aftur í rakstrarúrslitunum hjá feløgnum og harvið eisini skattinum.

**Samlaðu inntøkurnar** vaksa sostatt 56,1 mió.kr ella 5,1% upp í 1.147,9 mió.kr í mun til metingina upp á 1.091,8 mió.kr í fíggjarætlanini 2021. Til samanberingar vuksu inntøkurnar í fíggjarætlanini 2021 við 27,4 mió.kr ella 2,6% upp í 1.091,8 mió.kr í mun til fíggjarætlanina 2020.

**RAKSTRARÚTREIÐSLURNAR**
Virksemið í høvuðsstaðarkommununi er enn sum áður í stórum vøkstri.

Talið av íbúgvum í kommununi vaks frá 2020 til 2021 við 1,79% ella 397 upp í 22.607 frá 22.210. Frá 2013 og fram til 2021 er talið av íbúgvum vaksið 2.664 ella 13,4%.

Ein sovorðin vøkstur hevur náttúrliga við sær øking í virksmeminum, tænastunum og harvið eisini rakstrarútreiðslunum.

Samanløgdu rakstrarútreiðslurnar hjá kommununi vaksa í fíggjarætlanini fyri 2022 netto 42,4 mió.kr upp í 922,8 mió.kr úr 880,4 mió.kr. Hetta er ein vøkstur upp á 4,8% í mun til fíggjarætlanina 2021.

**Lønir eru størsti partur av rakstrarkostnaðunum**
Av samlaða bruttokostnaðinum eru lønirnar 61% og 74% av nettokostnaðunum. Fyri ár 2022 eru lønirnar mettar at vaksa 33,8 mió.kr ella 5,17%í mun til fíggjarætlan 2021.

Av hesum vøkstrinum eru 9,96 mió.kr lønarhækkingar, tvs sáttmálabundnar hækkingar.

Haraftrat er tað vøksturin í virkseminum, ið økir um lønirnar við 23,8 mió.kr. Størsti parturin av hesum vøkstri í krónum er á grein 2, og her er tað serliga eldraøkið. Eisini er stórur vøkstur á grein 3, dagstovnaøkið.

Sí talvuna niðanfyri.

| | *tús.kr* Grein | Lønar-hækking | Lønar-øking | íalt |
|---|---|---|---|---|
| §1 | Kommunal fyrisiting | 1.443 | 1.576 | **3.019** |
| §2 | Almanna- og heilsumál | 4.128 | 11.097 | **15.225** |
| §3 | Børn og ung | 1.777 | 9.779 | **11.556** |
| §4 | Undirvísing | 392 | 2 | **394** |
| §5 | Mentan og frítíð | 573 | 1.752 | **2.325** |
| §6 | Teknisk mál | 1.117 | -603 | **514** |
| §7 | Kommunal virkir TK | 530 | 251 | **781** |
| | | **9.960** | **23.854** | **33.814** |

**Høvuðsútreiðslutøl á greinunum**

Á **§ 1 Kommunual fyrisiting** økjast nettoúreiðslurnar 3,4% ella 3,2 mió.kr. Størsti parturin av vøkstrinum er í lønum á Teknisku fyrisiting við 1,723 mió.kr / 7,00%. Tvey størv sum byggimálsviðgerðar á tekniska økinum blivu á heysti 2019 játtaði sum eykajáttan og eru harvið ikki í fíggjarætlanini fyri 2022. Hesi mugu tískil raðfestast í 2022. Eisini er lønarvøkstur í Miðfyrisitingini, sum í høvuðsheitum er ein fylgja av øktum lógarkrøvum ísv persónsdátuverju og kt-trygd.

Nettoútreiðslurnar á **§ 2 Almanna- og heilsumál** økjast íalt við 6,9% ella 19,5 mió.kr, herav 15,2 mió.kr er hækking í lønum.

*Barnavernd* økist 0,8 mió.kr ella 13,0%. *Børn sett heiman í fosturfamliju* hækkar 3,2 mió.kr ella 19,2% í mun til í fjør. Av hesum er hækking í lønum 1,9 mió.kr. *Brúkaragjøld, serstovnar* hækkar 1,2 mió.kr, ið er ein hækking á 30,8%. Útreiðslugongdin innan barnaverndarøkið hevur síðstu árini verið vaksandi, lutvíst av vaksandi tali av barnaverndarmálum og vaksandi tali av umsorganaryvirtøkum.

Eldraøkið stendur fyri størstu hækkingini innan almanna- og heilsumál. Serliga er talan um hækking í *konto 2721 Røktartænastur* 8,5 mió.kr svarandi til hækking á 5,7%. Herav eru t.d 800 tkr til heilstænastuna í Nólsoy og 4 mió.kr er uppraðfesting av røktarøkinum. *Konta 2722 Tilboð* hækkar við 2,8 mió.kr, ið er hækkking á 7,6%. 1 mió.kr er til lógarfesta endurvenjing og 1 mió.kr til virksemisfólk. *Lógarbundin ansingarsamsýning* økist 590 tkr ella 23,5%.

Nettoútreiðslurnar á **§ 3 Børn og ung** fylgja í høvuðsheitum barnatalinum og økjast 14,4 mió.kr ella 7,2%.

*Útreiðslurnar í teim fýra eindunum, B-A-R-N* økjast netto 8,6 mió.kr ella 5,8%. Barnatalið økist 18 í vøggustovunum, 28 í barnagørðunum og 46 í frítíðarskúlunum. Harumframt er ein ungdómsklubbur komin aftrat. Útrokningarlykilin er tann sami sum í fjør, tó er lønarstigin hjá leiðarum hækkaður til 29 samsvarandi miðaltalinum. Foreldragjaldið er óbroytt 27%.

*Útreiðslur til systkinaavsláttur* vaksa 2,1 mió.kr ella 16,9%.

*Kontan 3215 Aðrar útreiðslur* lækkar 2,9 mió.kr ella 22%. Lækkingin kemst serliga av, at játtanin til serstovur er tikin úr. Lagt er upp fyri nýggjum dagstovnaplássum svarandi til eina vøggustovu (12 børn) og eina barnagarðsstovu (20 børn), íalt 2,1 mió.kr. Nýggj konta 3218 Serstovur er skipað og økt við 2 mió.kr til 6 mió.kr svarandi til tørvin (barnatal á serstovu).

Nettoútreiðslurnar á **§ 4 Undirvísing** hækka 2,2 mo.kr ella 4,8%. Játtanin fylgir metta næmingatalinum. Størsti vøksturin er ísv nýggja Skúlan á Fløtum, 0,7 mió.kr ella 6,3%, hetta skyldast serliga økt tal av flokkum.

Nettoútreiðslurnar á **§ 5 Mentan og frítíð** lække 1,7 mió.kr ella -2,7%. Størsta broytingin er lække í *Stuðul til íløgur* upp á 4,3 mió.kr ella 84,3%, sum er vegna serstsaka játtan í 2020. Musikkskúlin hækkar 1 mió.kr ella 11,3%, sum kemst av øktum undirvísingartímatali eftir broyting í løgtingsfíggjarlógini.

Kontan Ítróttaranlegg økist 520 tkr ella 3,5% vegna nýggjar rakstrarútreiðslur ísv høllina á Fløtum og Tórsvøll.

Nettoútreiðslurnar á **§ 6 Teknisk mál** økjast við 1,6% ella 2,3 mió.kr. Av hesum eru t.d 0,6 mió.kr ella 5,6% øking til fríðkan og viðlíkhald.

Nettoútreiðslurnar á **§ 7 Kommunal virkir** økjast við 5,6% ella 2,6 mió.kr. Konta 7110 Renovatión veksur 1,6 mió.kr ella 7,1%.

----

Í fyriliggjandi uppskoti til fíggjarætlan við nevndu fortreytum og virksemisbroytingum verður úrslit áðrenn rentur 205,1 mió.kr.

Úrslit av rakstri og rentum, men áðrenn avdráttir og íløgur, verður 197,1 mió.kr.

Avlop til skattafíggjaðar íløgur verður 169,2 mió.kr.

Er avlopið til skattafíggjaðar íløgur lægri enn samlaðu íløgurnar, má munurin fíggjast við meiri inntøku og/ella, lægri útreiðslum og/ella lántøku.

Lániskuldin hjá kommununi var síðst í august mánaða 227 mió.kr íalt. Av hesum eru 217 mió.kr knýttar at Tórshavnar havn.

Í samband við byggingina av endurvenjingardepilinum URD var í fíggjarætlanini 2020 tikið hædd fyri eini lántøku á 57 mió.kr. Lánið er ikki tikið enn.

Tórshavnar havn hevur í løtuni eina samlaða láníheimild upp á 64 mió.kr, sum kann takast, um tørvur er á tí.

Býráðið ásetir kommunuskattaprosentið og barnafrádráttin og kann umvegis hesi bæði broyta fortreytirnar fyri fíggjarætlanina.

**Skjøl**

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum (set x)**

| | **Fyri Tórshavnar kommunu** | **Fyri ávísøkir í kommununi** | **Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir** | **Fyri vinnuna** |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Møgulig frávik/lættar frá ásetingum** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** **Ja ☒** **Nei ☐**

**Tilmæli:**
Sambært kommunustýrislógini skal fíggjarnevndin leggja uppskot til fíggjarætlan fyri býráðið innan 1. oktober.

**Fíggjarnevndin 28. september 2021:** Framlagt og beint í býraðið.

**Býráðsfundur 30. september 2021:** Framlagt.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 04. oktober 2021:** Framlagt.

**Tekniska nevnd 04. oktober 2021:** Framlagt.

**Náttúru- og umhvørvisnevndin 05. oktober 2021:** Framlagt.

**Havnanevndin 05. oktober 2021:** Framlagt.

**Heilsu- og eldranevndin 05. oktober 2021:** Framlagt.

Ein minniluti, Annika Olsen og Birgir Nielsen, mælir til at gongd verður sett á at byggja eldradepilin í Kollafirði, og at neyðug upphædd verður sett av at projektera depilin, soleiðis at byrjast kann at byggja í komandi ári.

**Mentamálanevndin 06. oktober 2021:** Framlagt.

Ein minniluti, Annika Olsen og Ruth Vang, mælir til at hækka normeringarnar á dagstovnaøkinum, sambært framferðarætlan um hægri normering á dagstovnaøkinum, sum var einmælt samtykt á býráðsfundi 26. november 2020.

**Trivnaðarnevndin 07. oktober 2021:** Framlagt.

**Vinnunevndin 07. oktober 2021:** Framlagt.

**Fíggjarnevndin 20. oktober 2021:** Ein meiriluti, Heðin Mortensen, Annfinn Brekkstein og Tróndur Sigurðsson, taka undir við fyriliggjandi uppskoti til fíggjarætlan fyri 2021 við niðanfyristandandi broytingaruppskoti viðvíkjandi íløguætlanini. Meirilutin beinir málið í býráðið til 1. viðgerð.

## Broytingaruppskot:

| | | |
|---|---|---|
| | | **Íløguætlan 2022** |
| | | |
| | **§2 Almanna- og heilsumál** | **8.000.000** |
| 2375 | Tannlæknamiðstøð | 1.000.000 |
| 2775 | Nýtt røktarheim við røktaríbúðum | 6.000.000 |
| 2775 | Eldradepil í Kollafirði | 1.000.000 |
| | **§4 Undirvísing** | **2.000.000** |
| 4175 | Dagføring av skúlum, Hoyvíkar skúli | 2.000.000 |
| | **§5 Mentan og frítíð** | **89.500.000** |
| 5475 | Býarbókasavn | 2.000.000 |
| 5775 | Tórsvøllur | 13.000.000 |
| 5775 | Fótbóltsvallir / Argir-Hoyvík | 10.000.000 |
| 5775 | Langhylur | 40.000.000 |
| 5775 | Skjótibreyt | 5.000.000 |
| 5775 | Golf | 4.500.000 |
| 5775 | Stórhøll | 10.000.000 |
| 5775 | Fimleikahøll/borgarhús í Kaldbak | 5.000.000 |
| | **§6 Teknisk mál** | **72.200.000** |
| 6175 | Umsiting og røkt av fastari ogn - Keyp av Kurlu | 1.200.000 |
| 6275 | Miðbýðarætlan | 10.000.000 |
| 6275 | Fríðkan av býnum | 5.000.000 |
| 6275 | Fríðkan, bygdir og økir | 2.000.000 |
| 6275 | Lendisgøtur | 4.000.000 |
| 6275 | Spælipláss, grasagarð, glaðsheygg o.a. | 5.000.000 |

| | | |
|---|---|---|
| 6275 | Viðarlundin, træplanting o.a. | 1.000.000 |
| 6275 | Vetrarfriðing í Kollafirði og Nólsoy | 1.000.000 |
| 6675 | Orkupolitikkur - átøk | 8.000.000 |
| 6775 | Vatnreinsiverk í Havnardali | 1.000.000 |
| 6875 | Kloakkir | 8.000.000 |
| 8175 | Parkering | 3.000.000 |
| 8175 | Innkomuvegur | 10.000.000 |
| 8175 | Vegir | 8.000.000 |
| 8375 | Rakstrargøgn (Verkstaðið) | 5.000.000 |
| | **§7 Kommunal virki** | **25.000.000** |
| 7175 | Renovatión | 7.000.000 |
| 7476 | Smábátahavn Álakeri | 18.000.000 |
| | **Íløguætlan uttan TH** | **196.700.000** |

Ein minniluti, Annika Olsen og Elsa Berg, atkvøður blankt.

**Býráðsfundur 28. oktober 2021:** Atkvøtt varð við 1. viðgerð um tilmælið frá meirilutanum í fíggjarnevndini, ið varð samtykt við átta atkvøðum fyri, fimm blonkum og ongari atkvøðu ímóti.

Fyri atkvøddu: Heðin Mortensen, Annfinn Brekkstein, Tróndur Sigurðsson, Kristianna Winther Poulsen, Kári Johansen, Súna Mørk, Bjørg Dam og Birgir Nielsen.

Blankt atkvøddu: Elsa Berg, Jón Kragesteen, Gunvør Balle, Annika Olsen og Ruth Vang.

## 280/21 Góðkenning av mánaðarroknskapinum 2021

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 17.02.2021 | 34/21 | 21/00010-1 |
| 2 Býráðsfundur | 25.02.2021 | 68/21 | 21/00010-1 |
| 3 Fíggjarnevndin | 17.03.2021 | 68/21 | 21/00010-1 |
| 4 Býráðsfundur | 25.03.2021 | 103/21 | 21/00010-1 |
| 5 Fíggjarnevndin | 21.04.2021 | 96/21 | 21/00010-1 |
| 6 Býráðsfundur | 29.04.2021 | 130/21 | 21/00010-1 |
| 7 Fíggjarnevndin | 19.05.2021 | 131/21 | 21/00010-1 |
| 8 Býráðsfundur | 27.05.2021 | 157/21 | 21/00010-1 |
| 9 Fíggjarnevndin | 16.06.2021 | 166/21 | 21/00010-1 |
| 10 Býráðsfundur | 23.06.2021 | 203/21 | 21/00010-1 |
| 11 Fíggjarnevndin | 22.09.2021 | 230/21 | 21/00010-1 |
| 12 Býráðsfundur | 30.09.2021 | 242/21 | 21/00010-1 |
| 13 Fíggjarnevndin | 20.10.2021 | 273/21 | 21/00010-1 |
| 14 Býráðsfundur | 28.10.2021 | 280/21 | 21/00010-1 |

**Upprunin til málið:**
Sambært kunngerð nr. 89 frá 15. oktober 2008 um roknskaparverk kommununnar o.t. §10 skulu kommunur innraportera roknskapardátur hvønn mánað til Fíggjarmálaráðið. Sambært § 9 skal kommunustýrið góðkenna.

**Lýsing av málinum – samandráttur**

**Lógir, ásetingar o.a.**

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

**Møgulig frávik/lættar frá ásetingum**

**Umhvørvisárin**

| | **Býráðsfundur**<br>28. oktober 2021 | Blað nr.: 1092<br><br>Formansins merki: |
|---|---|---|

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl**

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** (set x)

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** **Ja ☐** **Nei ☐**

**Ískoyti:**
Roknskapurin fyri januar verður lagdur fram á fundinum.

**Fíggjarnevndin 17. februar 2021:** Framlagt og góðkent.

**Býráðsfundur 25. februar 2021:** Framlagt og góðkent.

**Ískoyti:**
Roknskapurin fyri februar verður lagdur fram á fundinum.

**Fíggjarnevndin 17. mars 2021:** Framlagt og góðkent.

**Býráðsfundur 25. mars 2021:** Framlagt og góðkent.

**Ískoyti:**
Roknskapurin fyri mars verður lagdur fram á fundinum.

**Fíggjarnevndin 21. apríl 2021:** Framlagt og góðkent.

**Býráðsfundur 29. apríl 2021:** Framlagt og góðkent.

**Ískoyti:**
Roknskapurin fyri apríl verður lagdur fram á fundinum.

**Fíggjarnevndin 19. mai 2021:** Framlagt og góðkent.

**Býráðsfundur 27. mai 2021:** Framlagt og góðkent.

**Ískoyti:**
Roknskapurin fyri mai verður lagdur fram á fundinum.

**Fíggjarnevndin 16. juni 2021:** Framlagt og góðkent.

**Býráðsfundur 23. juni 2021:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Roknskapurin fyri juni, juli og august verður lagdur fram á fundinum.

**Fíggjarnevndin 22. september 2021:** Framlagt og góðkent.

**Býráðsfundur 30. september 2021:** Framlagt og góðkent.

**Ískoyti:**
Roknskapurin fyri september verður lagdur fram á fundinum.

**Fíggjarnevndin 20. oktober 2021:** Framlagt og góðkent.

**Býráðsfundur 28. oktober 2021:** Framlagt og góðkent.

**<u>FUNDURIN LOKIN KL. 21:00</u>**

**<u>GERÐABÓKIN GÓÐKEND:</u>**

| | | |
|---|---|---|
| Heðin Mortensen | Annfinn Brekkstein | Tróndur Sigurðsson |
| Kári Johansen | Kristianna Winther Poulsen | Súna Mørk |
| Bjørg Dam | Elsa Berg | Gunvør Balle |
| Annika Olsen | Birgir Nielsen | Ruth Vang |
| | Jón Kragesteen | |